

# Álit um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil

Álit um

# Vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil

MENTAMÁLARÁÐIÐ

2018

Álit um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil, 2018
Útgevari: Mentamálaráðið
Ritstjórn: Arbeiðsbólkurin at fyrireika skipaða vaksnamannaútbúgving
Í arbeiðsbólkinum sótu John Dalsgarð, Snorri Fjallsbak, Marita Klein Joensen, Jenny Lydersen, Jóhanna Kristina Lützen og Heri Petersen,
Ritstjóri: John Dalsgarð
Skrivari: Jóhanna Kristina Lützen
Myndir: Ólavur Frederiksen
Prent: Føroyaprent
ISBN: 978-99918-3-551-8



# Innihaldsyvirlit


Formæli 7
Tilmælini frá arbeiðsbólkinum 8
Ein stutt lýsing av hugtakinum vaksnamannaútbúgving 9
Arbeiðsmarknaðarútbúgvingar 9
Arbeiðssetningurin 10
Fundarvirksemið hjá arbeiðsbólkinum 11
Fundir í arbeiðsbólkinum 11
Fundir og samrøður við avvarðandi partar 11
Eitt samfelag og ein arbeiðsmarknaður í broyting 15
Avbjóðingarnar eru drívmegin 16
Samstarv millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum 16
Tørvurin á førleikamenning í føroyska samfelagnum 16
Útbúgving gevur lívsvirðisvøkstur 18
Ófaklærd vaksin 19
Umleið sætti hvør eldri enn 25 hevur ikki útbúgving 19
Førleikamenning økir um tilvitskuna hjá arbeiðsfólki 21
Gjald fyri skeið 21
Tilflytarar og virkin luttøka 23
Tilflytarar 24
Ikki nóg væl fyri í føroyskum 24
Vantandi førleikar at meta um útbúgvingar 25
Málskeið 25
National Qualification Framework (NQF) 27
Vaksnamannaútbúgvingar í Norðurlondum 29
Danmark 29
Noreg 31
Finnland 32
Svøríki 33
Ísland 33
Grønland 35
Vaksnamannaútbúgving í Føroyum í dag 37
Fyrireikingarbreyt 37
Fríðtíðarundirvísingarskipanin og fólkaupplýsing 37
Stakgreinarlestur í kvøldskúlunum 38
Lóg um yrkisskeið ella arbeiðsmarknaðarútbúgvingar 39

Dugni 39
Heilsuskúlin 40
ALS 40
Lóg um førleikameting 41
Fíggjarligu fortreytirnar hjá vaksnum at fara undir útbúgving 42
Uppihaldsgrundarlag hjá teimum, sum eru í útbúgving 43
Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk 44
Smidligari útbúgvingarmøguleikar skulu byrgja fyri mismuni 45
Norðurlendskt samstarv um vaksnamannalæring 45
Vaksnamannaútbúgving og lívlong vegleiðing 47
Berandi liðirnir í skipanini, sum skal útvega førleikar 47
Fólkaupplýsing 49
Lívlong læring og lívlong vegleiðing 51
Skilvís grundgeving og mál fyri lívlanga vegleiðing 51
Støðan hjá vegleiðing í Føroyum 52
Karrieruførleiki og lívlong vegleiðing í Føroyum – ein stutt lýsing 53
Øktir møguleikar við fjarundirvísing, -vegleiðing
og nýtslu av t-amboðum 57
Fjarlestrarmøguleikar í Føroyum 57
T-amboð í vegleiðingini, førleikametingini og førleikamenningini 58
Trípartasamstarv og arbeiðsmarknaðardepil 60

Tilmæli 1 Lógarkarmar um vaksnamannaútbúgvingar 63
Tilmæli 2 Eitt samskipað førleikamenningarsamstarv 65
Tilmæli 3 Trípartasamstarv um arbeiðsmarknaðardepil 67
Tilmæli 4 Útbúgving og førleikamenning til øll 69
Tilmæli 5 Málbólkurin 71
Tilmæli 6 Tilflytarar og bólkar í serstøðu 73
Tilmæli 7 Lívlong vegleiðing verður skipað 75
Tilmæli 8 Førleikamenningargrunnur 77

Kostnaðarmeting 79

Samanumtøka 80
Niðurstøða 83

Keldur 85



# Formæli

Í fylgiskjali til samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn (september 2015) verður sagt, *at farið verður í holt við at fyrireika at seta á stovn vaksnamannaútbúgving. Neyðugir tættir í eini tilíkari skipan eru lívslong vegleiðing og førleikameting eins og ymisk sløg av førleikamenning og eftirútbúgving.*

Í londunum rundan um okkum hevur skipað vaksnamannaútbúgving verið roynd við góðum úrsliti í mong ár. Tað merkir, at í hesum londum hava vaksnir persónar, við ongari útbúgving, havt serligar skipanir, ið gera tað lættari og høgligari hjá teimum at fáa sær eina útbúgving sum vaksin.

Vaksnamannaútbúgving er við til at styrkja búskaparliga haldførið og vælferðina í samfelagnum, umframt kappingarførið hjá vinnuni og landinum sum heild. Útbúgving og førleikamenning eru av stórum týdningi fyri møguleikarnar hjá tí einstaka at taka lut á arbeiðsmarknaði og í samfelagsligum virksemi yvirhøvur, eins og hesi eru av stórum týdningi fyri kappingarførið hjá vinnuni.

Í hesum áliti verður roynt at lýsa støðuna viðvíkjandi vaksnamannaútbúgving í Føroyum. Harumframt eru orðað nøkur tilmæli um, hvussu vit á einfaldan hátt kunnu skipa og samskipa útbúgvingartilboðini hjá vaksnum í Føroyum, ið samstundis gera tað lættari hjá vaksnum og tilkomnum at taka eina útbúgving ella verða førleikament.

Á sumri 2016 setti landsstýrið arbeiðsbólk við umboðum úr fýra avvarðandi stjórnarráðum at kortleggja og greina møguleikarnar fyri einum samstarvið millum stjórnarráðini í arbeiði landsstýrisins at seta í verk eina skipaða vaksnamannaútbúgving í Føroyum.

Í arbeiðsbólkinum hava verið: **Heri Petersen** fulltrúi í Almannamálaráðnum, **Johanna Kristina Lützen** umboðandi Samferðslumálaráðið, sum varðar av arbeiðsmarknaðarmálum, **Marita Klein Joensen** umboðandi Samferðslumálaráðið frá 1. desember 2017, **Snorri Fjallsbak** ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum, **Jenny Lydersen** undirvísingarleiðari í Mentamálaráðnum og **John Dalsgarð** fulltrúi í Yrkisdeplinum.

Harumframt hava ráðgevarar, umboðandi fakfeløg, áhugafeløg og vinnuna verið knýtt at bólkinum. Hesi hava verið **Esther Dahl** ráðgevi í Vinnuhúsinum, **Axel Hansen** stjórnarlimur í Føroya Fiskimannafelag umboðandi Samtak, **Ester Poulsen** forkvinna í Vegleiðarafelag Føroya, og **Anna Johannesen** skrivari hjá Starvsmannafelagnum og **Vigdis Johannesen** forkvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag, umboðandi Fakfelagssamstarvið.

John Dalsgarð hevur verið formaður í arbeiðsbólkinum og staðið fyri tí samskipandi arbeiðinum. Jóhanna Kristina Lützen hevur verið skrivari.

# Tilmælini frá arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin er komin ásamt um at mæla til at seta í verk niðanfyri standandi átta tilmæli, um at skipa vaksnamannaútbúgvingar og arbeiðsmarknaðardepil. Tey átta tilmælini eru nærri lýst á síðunum 63-78.

**Tilmæli 1: Lógarkarmar um vaksnamannaútbúgvingar**
Vaksnamannaútbúgving og førleikamenning verða raðfest politiskt og skipað við lóg, s. 63

**Tilmæli 2: Eitt samskipað førleikamenningarsamstarv**
Ein førleikasamskipan ella eitt førleikasamstarv, sum skal samskipa vegleiðing, førleikameting og førleikamenning, umframt at ráðgeva í málum, sum hava týdning fyri alt vaksnamannaútbúgvingar-økið og lívlanga læring sum heild, verður skipað, s. 65

**Tilmæli 3: Trípartasamstarv um arbeiðsmarknaðardepil**
Samstarvið um vaksnamannaútbúgving og førleikamenning millum tað almenna og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, verður styrkt og ment við einari heildarætlan um førleikar í samfelagnum, s. 67

**Tilmæli 4: Útbúgving og førleikamenning til øll**
Fjølbroyttir og høgligir útbúgvingarmøguleikar skulu standa øllum vaksnum í boði, s. 69

**Tilmæli 5: Málbólkurin**
Øll vaksin, 25 ár og eldri, sum hava tørv á útbúgving ella førleikamenning, skulu vera fevnd av skipanini, s. 71

**Tilmæli 6: Tilflytarar og bólkar í serstøðu**
Tiltøk at tryggja tilflytarum og bólkum í serstøðu javnbjóðis og betri møguleikar at vera virknir borgarar á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum sum heild, verða sett í verk, s. 73

**Tilmæli 7: Lívlong vegleiðing verður skipað**
Lívlong vegleiðing verður sett í verk sum eitt yvirskipað tilboð til allar borgarar, s. 75

**Tilmæli 8: Førleikamenningargrunnur**
Grunnur at fíggja arbeiðsmarknaðar-, vaksnamanna- og eftirútbúgvingar verður settur á stovn, s. 77



## Ein stutt lýsing av hugtakinum *vaksnamannaútbúgving*

Ymiskt er, hvussu vaksnamannaútbúgving verður allýst. Við støði í Lissabon-ætlanini samtykti ES-nevndin í 2006 eina frágreiðing um vaksnamannaútbúgving[1]. Vaksnamannaútbúgving varð í frágreiðingini allýst sum:

> *"allir formar fyri læring, sum vaksin eru partur av, eftir at tey eru liðug við upprunaliga grundútbúgving og yrkisútbúgving, uttan mun til, hvussu long útbúgvingin hevur verið".*

Henda allýsing javnsetir hugtakið *vaksnamannaútbúgving* við lívlanga læring. Hugtakið vaksnamannaútbúgving verður í hesum álitinum nýtt sum allýsing fyri læring og útbúgving, sum 25 ára gomul og eldri kunnu nema sær. Hetta er eisini galdandi fyri vaksin, sum fara undir eina grundútbúgving, yrkisútbúgving ella aðra miðnámsútbúgving ella hægri lesnað.
Í stuttum er ein vaksnamannaútbúgving ein útbúgving, ið er løgd til rættis og skipað fyri vaksin, og sum byggir á arbeiðs- og lívsroyndir hjá tí vaksna, áðrenn viðkomandi fer undir útbúgvingina. Undirvísingin verður løgd til rættis soleiðis, at hon tekur atlit til, at tann vaksni hevur arbeiði ella er tøkur á arbeiðsmarknaðinum, og at hann hevur ávísar skyldur at svara, bæði fíggjarligar og sosialar. Vaksnamannaútbúgvingar fevna bæði um einstøk skeið og heilar útbúgvingar, eins og tær kunnu fevna um einstakar undirvísingartímar um vikuna, parttíðarútbúgving yvir longri tíð og fulltíðarútbúgving.

## Arbeiðsmarknaðarútbúgvingar

Hugtakið arbeiðsmarknaðarútbúgvingar fevnir í hesum áliti um allar yrkisútbúgvingar, umframt tær útbúgvingar, ið eru beinleiðis knýttar at arbeiðsmarknaðinum, og sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum varða av, harímillum førleikamenning og eftirútbúgving av starvsfólki, har tað almenna ikki hevur eins stóran leiklut, ella har, ið almennu eftirútbúgvingarskipanirnar ikki røkka.

---

[1] Voksenuddannelse: Det er aldrig for sent at lære. Kommissionen for de europæiske fællesskaber, 2006

# Arbeiðssetningurin

Í londunum rundan um okkum vísa royndir og kanningar, at vaksnamannalæring og -útbúgving hava stóran týdning fyri arbeiðsmarknaðin og trivnaðin hjá landsins borgarum. Fyrimunurin við vaksnamannaútbúgving er, at fleiri av landsins borgarum fáa øktan møguleika at ogna sær grundleggjandi førleikar at søkja inn á eina útbúgving ella lærupláss, at endurútbúgva seg og troyta teir útbúgvingarmøguleikar, sum samfelagið bjóðar. Harumframt er vaksnamannaútbúgving við til at lyfta útbúgvingarstøðið, sum er við til at styrkja kappingarførið og búskapin í samfelagnum.

Neyðugt er at gera skipanir, ið veita vaksnum borgarum fíggjarligar umstøður at taka eina útbúgving, umframt at gera skipanir, har vaksin kunnu fáa mett sínar førleikar, sum tey hava vunnið sær í arbeiði, á skeiðum, í frítíðarvirksemi o.s.fr.

Slík skipan verður best skipað og tryggjað, tá ið myndugleikar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum samstarva um endamálið.

Útbúgving og læring er fortreytin, tá ið landsins tilkomnu borgarar skulu menna sínar førleikar sum grundarlag undir starvsleið, og at nøkta tann økta og alsamt broytiliga tørvin á vælútbúnum fólki.
Skipanir við vaksnamannalæring og -útbúgving eru væl kendar í okkara grannalondum. Saman við serstøkum skipanum fyri tey við skerdum førleikum hava hesar skipanir virkað fyri einum støðufføstum arbeiðsmarknaði og tryggari arbeiðskorum hjá landsins borgarum.

Í Føroyum eru ongar serstakar skipanir, ið lætta um og gera tað høgligari hjá vaksnum fólki at fáa sær eina útbúgving. Tó hava vit lógina um arbeiðsfremjandi tiltøk, men er hon í høvuðsheitum avmarkað til fólk við skerdum førleika, og serstaka frítíðarundirvísing, sum gevur vaksnum møguleika at taka 10. flokk, stakgreinalesur, dugnaskaparroyndir og landbúnaðarskeið. Nógv vaksin aftra seg við at fara undir eina útbúgving, tí ongar serstakar skipanir eru, sum geva teimum serligar sømdir at taka eina útbúgving. Serliga er tað fíggjarligi spurningurin, sum er avgerandi, tá tilkomnir persónar umhugsa møguleikan at fáa sær eina útbúgving. Ofta eru vaksin fíggjarliga bundin, t.d. av føstum útreiðslum til bústað og húsarhald, og hetta fær tey at halda seg frá at taka eina førleikagevandi útbúgving. Hetta hevur havt við sær, at fólk eru flutt av landinum at taka eina útbúgving ella fara í læru sambært serligari skipan, eitt nú við vaksnamannaløn, og soleiðis fáa eina útbúgving og prógv fyri sínum førleikum.

Endamálið við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at gera uppskot til eitt 3-partasamstarv, um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil, ið skal gera tað lættari hjá vaksnum ófaklærdum at fara undir eina útbúgving, og at seta í verk skipaða førleikameting, førleikamenning og lívlanga vegleiðing.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum er at gera uppskot til

- karmar um skipaða vaksnamannalæring, -útbúgving og arbeiðsmarknaðardepil
- hvussu hetta arbeiði verður fyrireikað og skipað sum samstarv millum avvarðandi myndugleikar og partarnar á arbeiðsmarknaðinum
- hvussu sjálv skipanin skal síggja út (bygnaður)
- hvat vaksnamannaútbúgving skal fevna um (innihald)
- hvør skal vera fevndur av skipanini (málbólkur)
- hvussu skipanin við førleikameting og lívlangari vegleiðing kann verða partur av einari vaksnamannaútbúgvingarskipan (lóg og kunngerð um førleikameting)
- hvussu skipanin kann verða fíggjað (arbeiðsmarknaðarútbúgvingargrunnur)
- fíggjarligar umstøður hjá vaksnum at fara í útbúgving ella læru, og
- hvar skipanin kann verða staðsett.

# Fundarvirksemið hjá arbeiðsbólkinum

## Fundir í arbeiðsbólkinum

Arbeiðsbólkurin hevur havt 12 fundir frá sumri 2016 til apríl 2018. Fundirnir hava verið, tann 06.07.2016, 29.09.2016, 25.10.2016, 03.11.2016, 07.12.2016, 24.05.2017, 07.09.2017, 21.11.2017, 28.11.2017, 05.12.2017, 08.03.2018 og 24.04.2018.

## Fundir og samrøður við avvarðandi partar

Eitt týðandi sjónarmið í arbeiðnum hjá arbeiðsbólkinum hevur verið, at arbeiðið við at skipa vaksnamannaútbúgvingar í Føroyum, skal vera gjørt í samstarvi millum avvarðandi partar á arbeiðsmarknaðinum og avvarðandi myndugleikar. Eftir teir fyrstu innleiðandi fundirnar fór arbeiðsbólkurin undir at kalla feløg og stovnar til fundar, har ið vit ynsktu at kunna um arbeiðið og seta pørtunum spurningar. Hetta var eina mest gjørt fyri at kunna okkum um tørvin á vaksnamannalæring, men eisini fyri at økja um tilvitanina og fáa partarnar til at seta orð á, hvørjar møguleikar, teir sóu í einari vaksnamannaútbúgvingarskipan, ið avvarðandi myndugleikar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum vóru saman um at seta í verk.

Fakfeløgini, sum vit høvdu samrøður við, vórðu vald út frá teirri fortreyt, at tey umboðaðu ein breiðan skara av løntakarum, bæði á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Harumframt hava nøkur av fakfeløgunum limir, sum starvast á ávísum yrkisøkjum, men hava ikki viðkomandi útbúgving.

Vaksnamannaútbúgving og førleikamenning, eru somuleiðis ein natúrligur partur av virkisøkinum hjá teimum stovnum, arbeiðsbólkurin hevur havt samrøður við.

Tær flestu samrøðurnar hava verið í tíðarskeiðnum frá januar til apríl 2017. Arbeiðsbólkurin hevur havt fund við tveir partar eftir hetta, í august og í oktober 2017.

Arbeiðsbólkurin hevur havt samrøður við hesar partar:

**Fakfeløg og fakfelagssamstørv**

*Samtak*, ið fevnir um Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag (18-01-17).

*Fakfelagssamstarvið,* ið fevnir um Starvsmannafelagið, Føroya Pedagogfelag, Føroya Lærarafelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Akademikarafelag Føroya og Havnar Arbeiðskvinnufelag (15-02-17).
Landsfelag Handverkanna, Havnar Handverkarafelag, S&K felagið (14-03-17).

**Arbeiðsgevarafeløg**

*Vinnuhúsið* umboðandi Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Føroya Handverksmeistarafelag, umframt tveir ráðgevar og stjóran í Vinnuhúsinum (19-01-17).
Kommunufelagið (04-04-17).

**Stovnar**

ALS (08-02-2017).
Almannaverkið (21-03-17).
Útlendingastovan (28-03-17).
Dugni (09-10-17).

**Onnur**

Mentanarnevnd Løgtingsins (13-12-16)
Vegleiðarafelag Føroya (10-04-17).

## Spurningarnir, sum vórðu viðgjørdir saman við feløgum og stovnum

- Hvat skilja vit við hugtakið vaksnamannaútbúgving ella arbeiðsmarkn-aðarútbúgving?
- Hvør er tørvurin á slíkum útbúgvingum? (tørvurin hjá tí einstaka, hjá fakinum, hjá vinnuni, hjá samfelagnum o.s.fr. )
- Hvørjar eru royndirnar við arbeiðsmarknaðarútbúgvingum ella førleikamenning innan tykkara starvsøki?
- Hvør er útbúgvingarstøðan á føroyska arbeiðsmarknaðinum? (avvarðandi feløg og stovnar eiga at meta um støðuna á teirra starvsøki)
- Hvørjar eru tykkara visjónir í sambandi við útbúgving og førleikamenning, við atliti at útbúgvingum, sum arbeiðsmarknaðurin, vinnan og einstaklingurin hevur tørv á?
- Hvørjar grundleggjandi treytir eiga at galda fyri vaksnamannaútbúgvingar?
- Hvør skal, eigur ella kann verða fevndur av skipanini?
- Hvat skilja vit við hugtakið arbeiðsmarknaðardepil?
- Hvar halda tit, ein skipan við vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepli eigur at verða staðsett? (í einum nýggjum stovni, í onkrum verandi stovni/felag, hvør skal hava ábyrgdina ella stýringina um hendur, hvør kann leikluturin hjá tykkara felag vera í hesum sambandi?)
- Hvussu kann ella eigur ein skipan við vaksnamannaútbúgving at verða fíggjað?
- Skulu tey, sum taka eina vaksnamannaútbúgving ella verða førleikament hava møguleika fáa endurgoldið fyri mista lønarinntøku í útbúgvingartíðini, og hvussu kann hetta verða fíggjað?



## Spurningar viðvíkjandi einum møguligum trípartasamstarvi, ið vórðu umrøddir

- Hvat er trípartasamstarv?
- Hvørjar áskoðanir eru um trípartasamstarv sum heild – fyri ella ímóti?
- Hvat eigur endamálið við einum trípartasamstarvi at vera?
- Hvussu eigur eitt trípartasamstarv at verða skipað, og hvat eigur tað at fata um?
- Hvørjar eru áskoðanirnar um eitt trípartasamstarv á útbúgvingarøkinum?
- Á hvørjum øðrum økjum kundi trípartasamstarv verið skipað?

Aðrir viðkomandi spurningar vórðu eisini umrøddir.



# Eitt samfelag og ein arbeiðsmarknaður í broyting

Stórar avbjóðingar eru í dagsins og framtíðar samfelag okkara, sum krevja nýhugsan og størri samstarv innan útbúgvingarskipanina og á arbeiðsmarknaðinum. Nakrar av hesum avbjóðingum eru:[2]

**Krøv til førleikar**. Búskaparligu og mentanarligu árinini av einum alsamt meira altjóðagjørdum heimi, hava skapt ein skjótt broytiligan veruleika, sum hevur við sær, at eftirspurningurin eftir førleikum á arbeiðsmarknaðinum er vorðin meira samansettur. Vørur og tænastur kunnu ferðast tvørtur um landamørk uttan stórvegis trupulleikar. Fyri at varðveita kappingarførið krevst, at arbeiðsstyrkin hevur rættar og neyðugar førleikar. Hetta setir nýggj krøv til bæði arbeiðsstyrkina og til útbúgvingarstovnarnar og læruplássini, sum skulu geva arbeiðsstyrkini hesar førleikar.

**Økt flytføri.** Alt fleiri tilflytarar við aðrari mentanarligari bakgrund flyta til landið, eins og landsins íbúgvar flyta seg meira og meira millum lond og heimspartar. Fyri at fáa gagnnýtt teir førleikar, sum tilflytarar hava við sær, og fyri at hesi á besta hátt kunnu fáa ein virknan leiklut í okkara samfelag, mugu átøk setast í verk, so tað gerst høgligari hjá teimum at fáa arbeiði og at útbúgva seg, samsvarandi síni útbúgving og førleikum.

**Fleiri eldri.** Lutfallið millum eldri og yngri borgarar er í broyting, har tey eldru gerast alsamt fleiri. Tað hevur við sær, at alt færri vera til at uppihalda teimum mongu, ið fara av arbeiðsmarknaðinum fyri aldur. Fyri at varðveita eldru arbeiðsstyrkina á arbeiðsmarknaðinum so leingi sum gjørligt, samstundis sum alt fleiri krøv verða sett til førleikar og evnini at taka við nýggjum avbjóðingum, krevjast betri umstøður og møguleikar fyri førleikamenning og eftirútbúgving.

**Nýggir framleiðsluhættir.** Umhvørvi og heilsa standa ovarlaga á dagsskrá kring allan heim, og soleiðis er eisini í Føroyum. Vaksandi krøv um atlit fyri umhvørvinum og heilsuni hjá borgarunum hava eisini við sær broytingar í framleiðsluháttum. Gamlir ótíðarhóskandi, umhvørvis- og heilsuskaðiligir framleiðsluhættir hvørva, og nýggir og nýskapandi og umhvørvisvinarligir framleiðsluhættir daga undan kavi. Hetta krevur eisini, at arbeiðsmegin er før fyri at laga seg eftir broyttu umstøðunum, og at hon fær so góðar møguleikar at gera hetta sum gjørligt.

**Broytingar í arbeiðsinnihaldi.** Tann skjóta tøkniliga menningin er óivað tann størsta drívmegin undir broytingunum á arbeiðsmarknaðinum. Tey seinastu árini hava vit sæð, at tøkniliga menningin gongur alsamt skjótari, og at nýggj sløg av talgildan og sjálvvirkan longu hava broytt og framvegis fara at broyta arbeiðsinnihald og krøv um nýggjar førleikar innan fleiri yrkisgreinar.

[2] Green og Skjerve, 2017. Kompetens ur ett arbetslivsperspektiv, NVL 2017

**Nýggjar og vaksandi vinnur.** Sjóneykan hevur seinastu árini verið sett á íverksetan í Føroyum, eitt nú fyri at skapa nýggjar vinnur, sum geva føroyska búskapinum fleiri bein at standa á, umframt at ferðavinnan í Føroyum er í menning. Nýggjar vinnur í Føroyum krevja eisini, at arbeiðsmegin hevur møguleikar at tillaga seg.

## Avbjóðingarnar eru drívmegin

Øll hesi viðurskiftini seta krøv til framleiðsluna og førleikarnar á arbeiðsmarknaðinum, og tað er týdningarmikið, at tað almenna gongur á odda við at geva øllum borgarum, sum hava hug og hegni, møguleika at vera partur í hesi menning. Um farið verður rætt fram, kunnu nevndu avbjóðingar vera ein drívmegi fyri øktari framleiðslu og virðisøking, sum eisini er ein fortreyt, um vit skulu varðveita sosiala og búskaparliga javnvág og tryggleika í samfelagnum. Um ikki rætt verður farið fram, ella einki verður gjørt fyri at taka ímóti avbjóðingunum, kann hetta skjótt hava við sær sera óhepnar avleiðingar á nevndu økjum.

## Samstarv millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum

Arbeiðsbólkurin at fyrireika skipaða vaksnamannaútbúgving, sum varð settur í juni 2016, fór eftir fyrstu fyrireikandi fundirnar undir at kanna, um áhugi var millum avvarðandi feløg og stovnar á arbeiðsmarknaðinum at vera við í einum samstarvi, ið hevur til endamáls, at fáa eina góða skipan setta á stovn við vaksnamanna- og arbeiðsmarknaðarútbúgving í Føroyum. Eitt lyklaorð í hesum sambandi hevur verið *samstarv*, serliga samstarv millum partarnar, ið varða av viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum, t.e. vinnan, fakfeløgini og tað almenna.

Í samgonguskjalinum frá september 2015 stendur, at trípartasamstarv skal vera við til at styrkja arbeiðsmarknaðin á ávísum økjum. Trípartasamstarv millum fakfeløg, vinnuna og tað almenna er longu á ymiskum økjum, eitt nú í ALS-stýrinum, Fasta gerðarættinum og í Yrkisútbúgvingarráðnum.

Trípartasamstarv í sambandi við vaksnamannaútbúgvingar og førleikamenning skal vera við til at tryggja, at bæði vinnan, fakfeløgini og tað almenna hava ein leiklut, tá ið avgerðir verða tiknar í viðurskiftum sum viðvíkja øllum trimum pørtum. Eitt nú, tá ið støða skal takast til, hvørjar útbúgvingar verða bjóðaðar út, hvørjum fakbólkum og førleikum, vinnan hevur tørv á, og tá ið raðfestingar verða gjørdar á politiskum stigi í samfelagnum, serliga á útbúgvingarøkinum.

## Tørvurin á førleikamenning í føroyska samfelagnum

Fyri at kunna standa seg betur á arbeiðsmarknaðinum, er týdningarmikið, at eisini vaksin hava møguleikar at nema sær útbúgving og framhaldandi menna sínar førleikar, og harumframt fáa so góðar umstøður at gera hetta sum gjørligt.

Tá arbeiðsmarknaðurin broytist alsamt, vera eisini krøvini til útbúgving og førleikar hjá tí einstaka meira samansett. Í dag fara broytingarnar á arbeiðsmarknaðinum fram við slíkari ferð og í so stórum vavi, ið ikki hevur verið sætt áður. Broytingarnar ávirka nærum allar liðir í samfelagnum, bæði vinnur og starvsøkir – bæði ófaklærd størv og størv, sum krevja høgt útbúgvingarstig. Hetta skapar nýggjar fortreytir hjá fyritøkum og løntakarum, bæði í privata og almenna geiranum, samstundis sum hetta setir størri krøv til tann einstaka.

Við einum so umbroytiligum arbeiðsmarknaði, sum tí, vit síggja í dag, og fyri at ganga vaksandi krøvunum um førleikar á møti, hevur tað stóran týdning, at karmar verða skaptir, so at føroyski løntakarin kann útvega sær teir neyðugu førleikarnar og fær møguleika at menna sínar førleikar alla tíðina. Her hevur tað týdning, at tað almenna gongur á odda fyri at tryggja, at útbúgvingarskipanin nøktar henda tørv. Í grannalondum okkara, hevur vaksnamannaútbúgving, lívlong læring og førleikamenning verið skipað í fleiri ár. Londini hava formliga bundið seg til at raðfesta vaksnamannaútbúgving,hetta m.a. við at vera partur av ES-sáttmálum viðvíkjandi vaksnamannaútbúgving. Ásannandi, at vaksnamannaútbúgving, umframt at stuðla undir persónligu menningina hjá tí einstaka, eisini er avgerandi fyri, at náa málunum í felags evropeisku *Lissabon-ætlanini* um øktan búskaparvøkstur, økt kappingarføri og betri sosiala integratión.

Hóast tað í Føroyum finnast skipanir, har vaksin kunnu fáa ment sínar førleikar, er eingin skipan, sum beinleiðis vendir sær til málbólkin tey vaksnu, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, og sum t.d. einans hava eitt fólkaskúlaprógv sum einastu og hægstu útbúgving. Hetta sama er galdandi fyri tilflytarar, sum umframt at hava tørv á førleikagevandi málskeiðum eisini hava tørv á førleikameting og førleikamenning, og ikki minst, at teirra førleikar kunnu verða viðurkendir. Serliga innan tað sonevnda "ófaklærda" arbeiðsøkið síggja vit, at tørvur er á grundleggjandi førleikum hjá ávísum bólkum í landinum, eitt nú hjá útlendskum kvinnum, sum eru komnar til landi og duga ikki málið, kenna ikki til lógir og samfelagsviðurskifti sum heild. Hesi fólk kenna sostatt heldur ikki síni rættindi og tær skyldur, sum áliggja, og hetta ávirkar støðuna og tilknýtið hjá børnunum og allari familjuni til restina av samfelagnum.

Sama er galdandi fyri tey mongu, sum arbeiða ymiskt fyrifallandi ófaklært arbeiði, uttan at hava nóg holla ástøðiliga vitan um neyðug trygdar- og heilsuviðurskifti, ið ofta kunnu vera tengd at teirra uppgávum. Hesi hava tørv á ymiskum styttri arbeiðsmarknaðarrættaðum skeiðum, ið eru við til at betra um grundleggjandi viðurskifti á arbeiðsplássunum. Arbeiðsumhvørvið er ein týdningarmikil táttur í førleikamenningini av landsins borgarum, bæði teimum ófaklærdu og teimum við útbúgving.

Gransking vísir, at bæði almenni og privati geirin fáa stórt gagn av, at londini gera íløgu í vaksnamannaútbúgving. Tað er staðfest, at vaksnamannaútbúgving, umframt at lyfta førleikarnar hjá arbeiðsstyrkini, økir um framleidnið í samfelagnum, og er við til at minka um útreiðslurnar til arbeiðsloysis- og fyritíðarpensjónsskipanir. Harumframt hevur vaksnamannaútbúgving stórt gagnvirði í mun til økta borgaraluttøku í samfelagnum, betri heilsu, lægri kriminalitet og størri persónliga vælveru og nøgdsemi. Kanningar vísa, at eldri, sum luttaka í skipaðari lívlangari læring eru betur fyri andliga og kropsliga. Út frá einum búskaparligum sjónarmiði, so er hetta við til at lækka kostnaðin til sjúkra- og heilsurøkt.[3]

[3] Voksenuddannelse: Det er aldrig for sent at lære, Kommisionen for de europæiske fællesskaber, 2006. http://ec.europa.eu/transparency/regdoc/rep/1/2006/DA/1-2006-614-DA-F1-1.Pdf

# Útbúgving gevur lívsvirðisvøkstur

Ein háttur at máta samfelagsliga avkastið av útbúgving, er at hyggja eftir samfelagsbúskaparliga virðinum, sum útbúgvingin gevur. Hetta verður gjørt við at kanna, hvussu stóran *lívsvirðisvøkstur,* útbúgvingin gevur gjøgnum eitt lív. Tað vil siga lønarinntøkan og inntøkan av virkseminum drigin frá kostnaðinum av útbúgvingini. Lívsvirðisvøksturin er sostatt virðið á tí øktu vælferðini, sum útbúgvingin hevur við sær, og tað er ein sannroynd, at allar útbúgvingar kasta samfelagsligt virði av sær.

Hjá einum ófaklærdum verður roknað við einum lívsvirðisvøkstri uppá umleið 10 mió. kr., meðan lívsvirðisvøksturin hjá einum, sum hevur tikið eina hægri útbúgving í miðal liggur um 20 mió. kr.[4] Harumframt bendir alt á, at jú hægri útbúgvingin er, jú meira lívsvirðisvøkstur kastar hon av sær. Hetta vísir, at útbúgving er ein góð íløga fyri samfelagsbúskapin, og at bæði samfelag, arbeiðsmarknaður og tann einstaki vinna nakað við, at fólk verða eggjaði til at fáa sær útbúgving.[5]

Vaksnamannaútbúgvingar eru partur av yvirskipaða hugtakinum lívlong læring, sum eisini hugtakið "empowerment" er týðandi partur av. Meira enn nakrantíð fyrr verður læring mett sum týdningarmikil og høgt virðismett. Fólk verða eggjað til at menna sínar dygdir og eginleikar alt lívið við støði í tí tey longu hava lært (Aagaard og Dahler, 2011, s. 24). Í 1972 kunngjørdi UNESCO[6] tað sonevnda lærandi samfelagið í frágreiðingini "*Learning to be – The world of education today and tomorrow*", (Faure et al., 1972). Her verða m.a. staðfestar nakrar felags meginreglur, sum eru galdandi fyri tað lærandi samfelagið:

Læring snýr seg um annað og meira enn bara útbúgving

Lívlong læring er alneyðug, tí grundleggjandi førleikar og vitan eru ikki ein bygnaðarlig trygd fyri starvsleið

At tilogna sær førleikar er ikki avmarkað til formliga læring ella útbúgving, men fevnir eisini um óformliga læring og ikki-formliga læring; og øll hesi sløg av læring verða mett sum virðismikil læring

Samfelagið kann verða sætt sum ein sosialur og búskaparligur bygnaður, har øll – tilvitað, ella ótilvitað – hava ein hugburð og hugsandi kunnu læra, og har øll – alt lívið – mugu taka medábyrgd fyri læring.

Í hesum sambandi fær einstaki borgarin sum lærandi einstaklingur møguleika at menna síni evni og gera seg galdandi á flestum øllum økjum í samfelagnum. Læringin er tætt knýtt at samfelagsligu menningini og virkar fyri at geva tí einstaka frælsi at leggja sítt egna lív til rættis og virka sambært hesum.

4 Tølini skulu takast við fyrivarni, tí tey byggja á útrokningar frá 2007, og útrokningarhættirnir kunnu vera ymiskir.

5 https://www.ae.dk/files/dokumenter/analyse/ae_store-samfundsoekonomiske-gevinster-af-uddannelse.pdf.

6 UNESCO er ST-stovnurin fyri útbúgving, vísindi og mentan.



# Ófaklærd vaksin

Sambært ALS er samanhangur millum longdina á útbúgving, og hvussu leingi fólk steðga í ALS-skipanini. Eisini er samanhangur millum vandan fyri at gerast arbeiðsleysur og longdina á útbúgving. Ítøkiliga merkir hetta, at tað eru tey við lítlari ella ongari útbúgving, sum eru longst í ALS-skipanini, og hava torført við at fáa arbeiði. Tá ið arbeiðsloysið er lágt, gerst tað enn týðiligari, tá útboðið av førleikum ikki samsvarar við eftirspurningin eftir førleikum. At hava teir røttu førleikarnar, hevur eisini stórar fíggjarligar fyrimunir við sær, og sum altíð er útbúgving ein góð íløga, bæði fyri tann einstaka og samfelagið. Umframt at styrkja um støðuna hjá tí einstaka á arbeiðsmarknaðinum, økir útbúgving um framleidni, og hetta er við til at geva vøkstur og økja um vælferðina í samfelagnum, tá høg vælferð eisini er treytað av stórari arbeiðsfjøld.

## Umleið sætti hvør yvir 25 hevur ikki útbúgving

Hagtøl frá Hagstovuni (Manntal 2011) og Studna vísa, at umleið 16% av føroyingum millum 25 og 69 ár hava onga framhaldsútbúgving eftir fólkaskúlan, og eru heldur ikki í útbúgving. Tølini vísa, at ein rættiliga stórur partur av føroyingum hevur onga útbúgving eftir fólkaskúlan.[7]

Sum gongdin er á arbeiðsmarknaðinum í dag, er eftirspurningurin eftir ófaklærdari arbeiðsmegi í minking, og alt bendir á, at eftirspurningurin eisini fer at minka í framtíðini. Ein stórur partur av ófaklærdu løntakarunum starvast innan fyrstalagsvinnurnar (fiski-, ali- og ráevnisvinnurnar). Tøl frá Hagstovuni yvir løntakarar í høvuðsvinnugreinunum vísa, at talið av løntakarum í fyrstalagsvinnuni er nógv minkað síðan seinasta hákonjunktur í 2008, hóast vøkstur hevur verið í framleidni. Samstundis er stórur vøkstur í almennari fyrisiting og øðrum almennum tænastum, sum eisini hongur saman við, at føroyska búfjøldin gerst eldri.[8]

**Løntakarar í mai 2008 og 2017 eftir høvuðsvinnugreinum** **Talva II 11**

| | 2008 | 2017 | í tali | í % |
|---|---|---|---|---|
| Fiski-, ali- o.o. ráevnisvinna | 4.578 | 4.160 | -418 | -9,1 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 3.909 | 3.822 | -87 | -2,2 |
| Privatar tænastuvinnur | 8.752 | 8.644 | -108 | -1,2 |
| Almenn fyrisiting o.a. tænastur | 8.682 | 9.412 | 730 | 8,4 |
| **Løntakarar tilsamans** | **25.921** | **26.038** | **117** | **0,5** |

Kelda: Hagstovan

Munur er á økjunum í Føroyum, tá tað snýr seg um útbúgvingarstøði. Tøl frá fólkateljingini í 2011 (Manntal[9]) vísa, at munurin er stórur millum útjaðara og

7 Fyrivarni verður tikið fyri, at tølini eru frá 2011, og kunnu tí síggja øðrvísi út í dag.

8 Búskaparfrágreiðing, Búskaparráðið, á heysti 2017

9 Fyrilit skulu takast fyri, at tølini eru frá 2011, og mest sannlíkt síggja øðrvísi út í dag. Nógv er broytt

miðstaðarøkið. Í Suðuroy og Sandoy eru tey lutfalsliga nógv fleiri, sum onga útbúgving hava eftir fólkaskúla, í mun til aðrastaðni í landinum, heili 46-49%. Í Norðuroyggjum, Eysturoy, Norðurstreymoy og Vágum hava 38-39% onga útbúgving eftir loknan fólkaskúla, og í Suðurstreymoy er talið 29%.

**Føroyar býttar í økir eftir útbúgvingarstigi - (Manntal, 2011)**




Tølini endurspegla eisini avmarkaða útboðið av arbeiðsplássum í økjum í Føroyum. Borgarar við útbúgving eru fluttir úr økjum, har útbúgvingarstigið er lágt, at nema sær útbúgving, og flyta ikki aftur, serliga tí at starvsmøguleikarnir eru so lítlir. Ein onnur orsøk til hesi lutfalsliga høgu tøl av óútbúnum í útjaðaraøkjunum í Føroyum, er óivað tann, at møguleikarnir fyri eftirútbúgving og førleikamenning hjá vaksnum eru so avmarkaðir. At eggja óútbúnum at útbúgva seg, verður ikki av røttum ein almenn samfelagsuppgáva, fyrr enn karmarnir hjá vaksnum at útbúgva seg verða umskipaðir, so at tað verður lættari hjá vaksnum við fíggjarligum skyldum og bindingum at fáa sær útbúgving.




*Føroyskir løntakarar (arbeiðsvirknir og arbeiðsleysir, sum fyrr hava havt arbeiði), sum hava fólkaskúla sum hægstu útbúgving. Gev gætur, at bert arbeiðsvirkin og arbeiðsleys, sum fyrr hava havt arbeiði, og sum eru eldri enn 25 ár, eru tald við. Kelda: Manntal 2011.*

síðani 2011, tá fíggjarkreppan framvegis var í hæddini, og fólkafráflytingin síðani er vend til fólkatilflyting. Tó er sannlíkt, at talið av teimum, sum ikki høvdu útbúgving í 2011, líkist tí í dag,



Tølini vísa, at tey eru munandi fleiri í arbeiðsstyrkini, uttan fyri miðstaðarøkið, Norðurstreymoy og Vágar, sum bert hava fólkaskúla ella onga útbúgving, ella ikki hava framhaldsútbúgving aftan á fólkaskúla. Í Suðuroy eru munandi fleiri í arbeiðsstyrkini, sum einans hava fólkaskúla ella lægri útbúgving, enn í restini av landinum.

## Førleikamenning økir um tilvitskuna hjá arbeiðsfólki

Ein partur av ófaklærdu arbeiðsmegini starvast umborð á skipum og á fiskavirkjum og er umboðaður av fiskimannafeløgum og arbeiðarafeløgunum. Sum skilst á samrøðunum, sum arbeiðsbólkurin hevur havt við Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, so síggja tey førleikamenning innan teirra egna starvsøki sum ein máta at fáa t.d. betraðar arbeiðsumstøður, mannagongdir og reinføri, og at hetta fer at geva teimum størri likamligt medvit um tað ofta tunga arbeiðið, umframt betraðar møguleikar at fáa økt um trygdina í arbeiðinum. Arbeiðsfólkið fær eisini eitt tryggari tilknýti til sjálvt starvið, tá arbeiðsgevarin ger eina íløgu í tey sum starvsfólk, og samstundis kann hetta vera við til at styrkja teirra støðu á arbeiðsmarknaðinum.

Sostatt hava tey, sum eru umboðaði av hesum fakfeløgunum, ikki neyðturviliga eitt ynski um eina formliga útbúgving, men heldur ynskja tey at styrkja og tryggja sína støðu í størvunum, tey eru í. Hetta eru tilkomin fólk, sum stóran part av lívinum hava arbeitt innan fyrstalagsvinnurnar. Førleikamenning innan hesar vinnugreinar eigur eisini at leggja seg eftir at fyribyrgja, at hesi starvsfólk verða kropsliga niðurslitin á lutfalsliga ungum árum, og ikki fáa arbeitt meira.

Talið á løntakarum innan hesar vinnur í Føroyum er í stórari minking, og sannlíkt er, at ein stórur partur av størvunum, sum verða mannað við hesum fólkunum, ikki er til um nøkur ár. Fyri betur at tryggja hes á arbeiðsmarknaðinum, er umráðandi at bøta um møguleikarnar at førleikamennast og eftirútbúgvast, so at tey eisini kunnu røkja annað virksemi innan hesar vinnur. Harumframt er tørvur á at skapa møguleikar fyri at umskúla hesar løntakarar til vinnur, ið spyrja eftir nevndu førleikum og arbeiðsmegi. Eisini við atliti til, at hesi tá kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum í longri tíð.

### Gjald fyri skeið

Tá talan er um førleikamenning og útbúgving av ófaklærdum starvsfólki, er nógv, sum enn liggur á láni. Eitt nú er ringt at fáa eyga á ein meira miðvísan og skipaðan útbúgvingarpolitikk á økinum, har tey ófaklærdu arbeiða. Í teimum førum, har kravt verður av starvsfólki, at tey skulu hava eitt ávíst prógv fyri at kunna átaka sær eitt arbeiði, fer ein ávís førleikamenning ella eftirútbúgving fram. Men í hesum førum er tað aloftast starvsfólkini, sum sjálv rinda fyri skeiðini, áðrenn tey verða sett í starv.

Eitt ynski millum ófaklærd er at kunna taka støk skeið, sum eru av týdningi fyri tey sjálv og eisini arbeiðsmarknaðin, uttan sjálv at skula rinda í dýrum dómi, umframt at sleppa undan inntøkumissi, meðan tey útbúgva seg ella eru á skeiði.

Onkur skeið hava verið hildin innan fiskavirkisarbeiði, har starvsfólk og arbeiðsgevarar rindaðu helvt um helvt av skeiðinum. Sum heild halda ófaklærd starvsfólk, at tey ikki eiga at rinda allan kostnaðin fyri førleikamenningina sjálv, tí førleikamenningin kemur øllum pørtum til góðar, teimum sjálvum, virkinum og samfelagnum. Talan kann vera bæði um fakliga og yrkisliga tengd skeið, umframt skeið av meira almennum slag, so sum skeið í lesing og skriving og máli annars, umframt skeið innan arbeiðsumhvørvi í breiðari merking. Tó leggja tey dent á, at førleikamenningin skal vera viðkomandi, bæði fyri arbeiðsplássið og tey sjálv.

Nógvir tilflytarar starvast sum ófaklærd á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hesi hava stóran tørv á førleikamenning, serliga viðvíkjandi tí málsliga og tí mentanarliga, men eisini tá talan er um tað fakliga. Hesi hava tørv á at verða førleikamett, so tey kunnu fáa greitt at vita, hvar tey eru stødd í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum sum heild í mun til teir førleikar, tey hava.









Ein grunnur, ætlaður til at førleikamenna arbeiðsstyrkina og tilfeingið í fólkinum, kann vera við til at flyta nakrar av teimum grundleggjandi forðingunum, sum eru, tá skeið og útbúgving verða boðin, og eingin er at rinda fyri luttøku ella mista inntøku í útbúgvingartíðini. Ein skipan við einum útbúgvingargrunni kundi byrjað í tí smáa og verið ment so hvørt, tørvurin ger seg galdandi.

## Tilflytarar og virkin luttøka

Okkum nýtist ikki bara at hugsa um tilflytarar, tá ið vit tosa um inklusjón ella integratión. Tó mugu vit ásanna, at tilflytarar við aðrari og ymiskari sosialari og mentanarligari bakgrund, hava aðrar avbjóðingar enn tey, ið eru fødd og uppvaksin í landinum. Serliga er hetta galdandi, tá tað snýr seg um at hava ein






virknan leiklut í samfelagsmenningini, og at hava møguleikar at gera nýtslu av øllum teimum ágóðum og vælferðartænastum, samfelagið hevur at bjóða. Tí eru tilflytarar í serstøðu og skulu hava serlig tilboð um neyðuga førleikamenning og kunning ella vegleiðing, tá ið tey koma til landið, har serligur dentur í fyrstu atløgu eigur at verða lagdur á at læra føroyskt mál og mentan.

Við skipaðari vaksnamannalæru kann samfelagið ganga á odda við at bjóða tilflytarum og øðrum bólkum í serstøðu tilboð um førleikamenning og lívlanga vegleiðing, og soleiðis geva teimum betri umstøður at gerast virknir samfelags-borgarar. Samstundis er skipað vaksnamannalæra við til at tryggja fíggjarliga grundarlagið hjá hesum fólkum, umframt at tey fáa bøtt um støðu sína á arbeiðs-marknaðinum sum heild.

Virkin luttøka í samfelagsmenningini er ein fortreyt hjá tí einstaka at kenna teir møguleikar og tær avbjóðingar, ið samfelagsmenningin gevur okkum sum borgarum og samfelag.

Við at bjóða hesum bólkum førleikamenning og útbúgving við førleikameting, kann samfelagið skjótari og betur lofta teimum, ið á onkran hátt standa á gáttini at detta út av arbeiðsmarkninum, ella hava ilt við at gerast natúrligur partur av hon-um.

## Tilflytarar

Í tilmæli um integratiónspolitikk (Tórshavnar kommuna, 2015)[10] verður tað nevnt sum ein bági fyri integratiónina, at tilflytarar ikki fáa fullnýtt sítt førleikapotentiali á arbeiðsmarknaðinum. Í samrøðu, sum arbeiðsbólkurin hevur havt við Útlendinga-stovuna, hevur hetta verið nevnt sum ein trupulleiki fyri tilflytarar, og soleiðis er hetta eisini ein bági fyri vælferðina og nøgdsemið hjá tilflytarum í Føroyum.

Ein orsøk til hetta er, at tilflytarar í stóran mun ikki fáa formliga viðurkent teir útbúgvingarligu førleikar, tey hava nomið sær, áðrenn tey eru flutt til Føroya.

Í sambandi við sama tilmælið, varð ein spurnarkanning gjørd í juni-juli 2015 millum tilflytarar í Tórshavn (ikki-norðurlendingar, fluttir til kommununa eftir 2003), í mun til útbúgvingarstøðuna hjá hesum og tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

### Ikki nóg væl fyri í føroyskum

Tølini vísa, at hóast ein stórur partur av tilflytarunum arbeiða fulla tíð, so eru fleiri teirra, sum ikki fáa brúkt førleikarnar, tey hava ognað sær í útbúgving ella við royndum úr øðrum londum. Ein spurnarkanning, sum Útlendingastovan hevur skipað fyri, vísir, at tilflytarar meta, at tann føroyski arbeiðsmarknaðurin er avmark-aður, og javnan fáa tilflytarar noktandi svar um størv, sum teir annars hava fakligar førleikar til at røkja. Sum orsøk til sýtanina hava tilflytarar fingið at vita, at teir ikki duga nóg væl føroyskt, hóast málið ikki er ein beinleiðis treyt fyri at kunna røkja starvið.

Hetta samsvarar væl við kanningar úr grannalondunum. Eitt nú hevur Dansk Flygtningehjælp nýliga gjørt kanning sum vísir, at arbeiðsgevarar meta, at góður

[10] Tilmæli um integratiónspolitikk, Runa Preeti Høgnesen, Tórshavnar kommuna 2015



danskur málkunnleiki, saman við persónligum eginleikum, hevur størsta týdning, tá tað snýr seg um at seta flóttafólk í starv. Fakligir førleikar koma her í triðju røð.[11]

## Vantandi førleikar at meta um útbúgvingar

Útlendingastovan, NVL, New Speakers Network og Yrkisdepilin skipaðu í august 2017 fyri ráðstevnu um tilflytarar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Á ráðstevnuni varð ljós varpað á størstu avbjóðingarnar sum tilflytarar møta, tá teir søkja størv í Føroyum.

Størstu avbjóðingarnar eru tær málsligu forðingarnar, sum tilflytarar merkja, vantandi førleikar í Føroyum at meta um útlendskar útbúgvingar, umframt eitt ávíst fyrivarni hjá arbeiðsgevarum, at seta tilflytarar í starv.

Umframt hesar avbjóðingar vóru treytirnar fyri sjálvum uppihaldsloyvinum nevndar sum forðing fyri integratión á arbeiðsmarknaðinum. Sambært galdandi ásetingum viðvíkjandi arbeiðsuppihaldsloyvi, skal tann, sum hevur fingið uppi-haldsloyvi, starvast í somu vinnugrein í 7 ár, áðrenn eitt ikki-tíðarbundið uppihalds-loyvi kann verða givið. Tað ber sostatt ikki til at skifta vinnugrein hesi 7 árini, uttan so, at 7-ára tíðarskeiðið verður talt upp av nýggjum. Í mun til menningarmøguleik-ar á arbeiðsmarknaðinum, sum hava stóran týdning, um integratiónin skal vera væleydnað, og um so er, at viðkomandi verður uppsagdur ella fyritøkan heldur uppat við sínum virksemi, er hendan ásetingin rættiliga óheppin fyri tilflytarar, sum skulu finna seg til rættis í Føroyum.

## Málskeið

Hóast tilflytarar fáa tilboð um ókeypis málskeið í føroyskum í kvøldskúlanum, er tað ymiskt í ymisku kommununum, hvussu væl verður tikið ímóti hesum tilboði. Nakr-ar av størru kommununum bjóða tilflytarum skeið í føroyskum. Í nøkrum komm-unum finst tilboðið ikki, og tá mugu skeiðsluttakarnir ferðast til aðrar kommunur, at taka skeiðini. Hjá summum er tað óhøgligt at røkja starv og luttaka í undirvís-ingini, tí tað liggur óhøgligar tíðir frá 9-12.30 tríggjar dagar um vikuna, umframt at talan er um intensiv skeið í 20 vikur. Tilboðið at læra føroyskt er sera týðandi og neyðugt. Tó kundi undirvísingin í nøkrum førum verið skipað øðrvísi, eitt nú við fjarundirvísing. Tórshavnar kvøldskúli bjóðar víðkað skeið í føroyskum og føroysk-ari mentan.

Ásannandi tann stóra týdning, sum málsligur førleiki hevur í integratiónstil-gongdini hjá tí einstaka og sum fortreyt fyri luttøku í samfelagnum sum heild viðvíkjandi arbeiði og útbúgving og í sosialum, samfelagsligum og privatum viðurskiftum, hevur Mentamálaráðið seinastu árini í samstarvi við kommunurnar skipað fyri skeiði í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum.

Sum liður í arbeiðinum at bjóða útlendingum nøkulunda somu undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum, hevur Mentamálaráðið tikið stig til at gera námsætlan fyri føroyskt sum fremmandamál. Námsætlanin hevur

[11] Undersøgelse af danskkundskabers betydning for flygtninges beskæftigelse, Dansk Flygtningehjælp 2017

verið í gildi síðani skúlaársbyrjan í 2016, og er grundarlag undir undirvísingini, men atlit verða sjálvsagt tikin til førleikan hjá tí einstaka.

Námsætlanin føroyskt fyri fremmandamælt er skipað í 3 stig, FFM1, FFM2 og FFM3 og er at finna á heimasíðuni *www.namsaetlanir.net*, har allar aðrar námsætlanir eru. Hesi drúgvaru skeiðini við 200 til 350 tímum eru skipað í økjum, Klaksvík, Tórshavn, Tvøroyri og Runavík. Harumframt eru styttri skeið við 40 til 80 tímum í fleiri kvøldskúlum, m.a. í Fuglafirði, Sørvági, Vági, við Streymin, Meginskúlanum á Sandi og í Vestmanna.

Hetta skuldi virkað fyri einari eins undirvísing til allar tilflytarar, men samstundis mugu vit hava í huga, at støðið má takast í tí einstaka, tí teirra førleiki er ymiskur, summi hava lítla skúlagongd, meðan uppaftur onnur hava akademiska útbúgving. Við atlit at hesum er námsætlanin skipað í stigum.

Mentamálaráðið hevur ábyrgd av at tryggja útbúgving og útbúgvingartilboð, at tey verða sett í verk, eftirmett og dagførd. Mentamálaráðið er ikki integrationsmyndugleiki, og ásetur tí ikki reglur um, hvørji málslig krøv og førleiki í føroyskum verður settur útlendingum fyri at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Tað er Uttanríkis- og vinnumálaráðið, uvmr.fo, sum umsitur útlendingamál sum eitt av sínum arbeiðsøkjum.

Fróðskaparsetur Føroya hevur harumframt skipað fyri tveimum ymiskum fjarlestrarskeiðum í føroyskum fyri útlendingar.

*Faroese for foreigners I*, har fortreytin er, at tey lesandi skulu hava miðnámsskúlaprógv ella tað, sum svara til eitt slíkt.

· *Faroese for foreigners II*, har fortreytin er, at tey lesandi skulu hava tikið fyrra skeiðið *Faroese for foreigners I* ella hava havt summarskeið í føroyskum. Endamálið er at geva teimum lesandi innlit í føroyska málløru og málnýtslu. Serliga verður dentur lagdur á málførleikarnar at tosa, at fata, at lesa og partvís eisini at skriva. Dentur verður lagdur á formsíðu málsins, eins væl og at tey lesandi læra at nýta hesa í praksis.

Skeiðini eru eina lestrarhálvu, og verða hildin á Føroyamálsdeildini. Undirvísingin er í høvuðsheitum fjarundirvísing, men tey lesandi hittast eisini nakrar ferðir. Hetta er í byrjanini, tá skeiðið er hálvrunnið og móti endanum av skeiðnum. Hvørja viku skulu tey lesandi lata inn uppgávur.

Fróðskaparsetrið bjóðar eisini summarskeið í føroyskum máli og mentan fyri útlendingum annað hvørt ár. Skeiðið telur 10 ECTS. Lesandi skulu hava kunnleika til eitt germanskt mál, ella kunnleika til málfrøði/málvísindi. Viðv. innflytarum til FO so hava tey oftani kunnleika til føroyskt, og tilflytarar hava verið á skeiðunum. Summarskeiðini eru tó ikki ætlað fólki, sum ongan kunnleika hava um mál frammanundan, og tað er galdandi fyri allar umsóknir.

Danska málið hevur ein størri leiklut í føroyska gerandisdegnum enn vit geva okkum far um, og hetta kann vera ein bági fyri tilflytarar, ið ynskja at læra seg føroyskt ella taka eina útbúgving í Føroyum, nú teir óvæntað eisini skulu læra seg danskt. Sum heild eru tilflytarar ov lítið kunnaðir um støðuna hjá donskum í Føroyum.

Tilflytarar, ið hava tikið lut á verandi málskeiði í føroyskum fyri útlendingar, hava víst á ynski um málskeið fyri tilflytarar á hægri stigi enn fólkaskúla, t.d. miðnámsskúlastigi, sum er førleikagevandi til framhaldsútbúgvingar.

Kvøldskúlin í Tórshavn bjóðar út skeið í donskum fyri tilflytarar, men undirtøkan hevur ikki verið stór fyri hesum skeiðinum seinastu tvey árini. Yvirhøvur er áhugin fyri víðkaðu skeiðunum, nógv minni enn byrjanarskeiðini í føroyskum. Ein av orsøkunum til hetta er, óivað vantandi orka hjá tilflytarunum at seta tíð av til hetta í gerandisdegnum.

## National Qualification Framework (NQF)

Eitt, sum hevur stóran týdning í mun til tilflytarar á arbeiðsmarknaðinum, er, at Føroyar fáa gjørt og sett í verk sonevnda *National Qualification Framework* (NQF), sum er ein rammuskipan at meta um útbúgvingar og førleikar. Tá hetta er sett í verk, verða greiðari mannagongdir at meta um og góðkenna tær útbúgvingar, sum tilflytarar hava ognað sær, áðrenn teir eru komnir til landið. Í mun til integratión fer hetta at hava stóran týdning, tí flestu tilflytarar hava annaðhvørt útbúgving ella royndir, sum tey í nógv størri mun enn áður høvdu kunnað gagnnýtt, til frama fyri alt tað føroyska samfelagið.

Í dag eru eingi skipaði viðurskifti viðvíkjandi góðskriving av førleikum hjá tilflytarum. Summi venda sær til Yrkisdepilin við prógvum uppá yrkisútbúgvingar. Yrkisdepilin sendir síðan pappírini víðari til danska myndugleikan, sum ger eina meting av útbúgvingini í mun til samsvarandi donsku útbúgvingina. Viðgerðartíðin er í flestu førum umleið 2-3 mánaðir. Onnur venda sær til Mentamálaráðið um at góðkenna útbúgvingar, sum eru tiknar í teirra heimlandi ella øðrum landi. Mentamálaráðið viðger Námsfrøðiligu útbúgvingarnar í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Ein stórur bólkur av tilflytarunum hevur útbúgving, og tískil átti tað ikki at verið neyðugt hjá teimum at nýta fleiri ár á skúlabonki, um tey fáa nýtt førleikar og útbúgving, ið tey hava frammanundan.

Harumframt er ein partur av tilflytarum sera illa fyri útbúgvingarliga og hava avmarkaða skúlagongd, áðrenn teir eru fluttir til Føroya. Hesir tilflytarar hava bráðfeingis tørv á at fáa tilboð um útbúgving, eisini fyri ikki at vera lítilsgjørdir í føroyska samfelagnum.



# Vaksnamannaútbúgvingar í Norðurlondum

Í hesum parti verður greitt frá, hvørjar skipanir finnast í øðrum Norðurlondum, sum serliga eru ætlaðar vaksnum, og hvørjar framtíðarætlanir byggja støði undir lívlangari læring og vaksnamannaútbúgving í londunum rundan um okkum.

Norðurlond hava yvirskipaðar ætlanir viðvíkjandi lívlangari læring og vaksnamannaútbúgving, sum eru í samsvari við Lissabon-sáttmálan[12] hjá ES, hóast bara trý av Norðurlondunum eru limir í ES.[13] Felags fyri hesi Norðurlond er eisini, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava verið við, bæði at tilevna politikkin, umframt at teir hava tikið lut í sjálvari verksetanini.

Í Norðurlondum hevur *lívlong læring fyri øll* verið sædd sum ein politisk meginregla síðan 1995, tá ein frágreiðing hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum viðvíkjandi lívlangari læring varð almannakunngjørd. ES tekur hugtakið "lívlang læring" til sín við Lissabon-ætlanini í 2000. Ætlanin við skipaðari lívlangari læring var at økja um búskaparliga vøksturin og kappingarførið, økja um arbeiðsfjøldina, stuðla undir sosiala integratión o.s.fr. ES heitti í 2004 á limalondini um at gera tjóðarætlanir fyri lívlanga læring.[14]

Í 2010 samtykti ES eina nýggja langtíðarætlan viðvíkjandi útbúgving, kallað ET 2020[15]. ET 2020 hevur fýra langtíðarmál: 1) verksetan at lívlangari læring, 2) meira dygd og størri effektivitet í útbúgvingunum, 3) líka rættindi fyri øll, sosial samhoyring og virkin borgaraskapur, 4) umframt mál um at kveikja íverksetaramentalitet, kreativitet og innovatión á øllum útbúgvingarstigum. Til ætlanina hevur ES sett upp nakrar grundleggjandi fortreytir, sonevnd benchmarks, sum skulu vera rokkin áðrenn 2020. Á vaksnamannaútbúgvingarøkinum er eitt mál, at í minsta lagi 15 % av øllum vaksnum skulu luttaka í lívlangari læring.

Londini í ES hava drúgvar royndir við vaksnamannaútbúgving og lívlangari læring. Í Norðurlondum hava øll londini eisini serligar skipanir til vaksin, sum fara undir útbúgving. Londini hava havt yvirskipaðar politiskar ætlanir í mun til vaksnamannaútbúgving og lívlanga læring, sum greitt boða frá tí týdningi, vaksnamannaútbúgving og lívlang læring hava fyri samfelagið sum heild og tann einstaka borgaran.

## Danmark

Í Danmark eru serligar skipanir, ætlaðar persónum 25 ár og eldri, ið fara undir útbúgving. Øll 25 ár og eldri kunnu verða førleikamett, áðrenn tey fara undir eina arbeiðsmarknaðarútbúgving, yrkisútbúgving ella miðnámsútbúgving.

---

12 Lissabon-sáttmálin er sáttmálin um Evropasamveldið, sum varð undirskrivað í Lissabon 13. desember 2007 og kom í gildi 1. desember 2009: https://en.wikipedia.org/wiki/Treaty_of_Lisbon

13 Norðurlond eru í hesum samanhanginum Danmark, Norra, Svøríki, Ísland og Finnland.

14 Effektive strategier for livslang læring i de nordiske lande, Nordisk Ministerråd, 2011.

15 ET 2020 stendur fyri Education & Training: http://ec.europa.eu/education/policy/strategic-framework_en. Sí videobrot her: http://ec.europa.eu/assets/eac/education/gallery/videos/et2020_en.mp4

Persónar 25 ár og eldri, kunnu fara í "vaksnamannalæru" við løn, sum er hægri enn vanlig lærlingaløn. Til ber at taka útbúgvingar á fólkaskúlastigi, miðnámsskúlastigi, akademiútbúgvingar, arbeiðsmarknaðarútbúgvingar (AMU) og nakrar framhaldsútbúgvingar við stuðuli frá STUV (Statens Voksenuddannelsesstøtte) og VEU (Voksen- og Efteruddannelse). Fíggingin til skipanirnar kemur úr ríkiskassanum, úr førleikagrunnum (kompetencefonde), úr AUB, og í nøkrum førum við brúkaragjaldi.

Fíggingin til lærlingar við "vaksnamannaløn", og fyri allar yrkisútbúgvingar annars, kemur við AUB-íkasti, sum er eitt lógarásett gjald, sum allir almennir og privatir arbeiðsgevarar í Danmark rinda. AUB krevur inn 2.837 krónur árliga frá øllum arbeiðsgevarum í Danmark fyri hvørt fulltíðarsett starvsfólk. Endamálið við gjaldinum er at fremja útboðið av læruplássum á yrkisútbúgvingarøkinum við fíggjarligari stimbran og við at javna útbúgvingarkostnaðin millum allar arbeiðsgevarar. Ein partur av gjaldinum, umleið 455 kr. fyri hvørt fulltíðarsett starvsfólk, fer til VEU-íkast (Voksen- og efteruddannelsesbidrag). Íkastið fatar um útreiðslurnar til VEU-endurgjald, umframt møguligan flutning, kost og innivist, um undirvísingin fer fram langt frá bústaðnum. VEU-endurgjaldið verður antin útgoldið til starvsfólkið fyri mista arbeiðsinntøku, ella útgoldið til arbeiðsgevaran, um arbeiðsgevarin rindar løn til starvsfólkið í skúlatíðini.[16]




Yvirlitið omanfyri er ein samanbering millum bygnaðirnar í teirri vanligu útbúgvingarskipanini og teirri serstøku vaksnamannaútbúgvingaskipanini í Danmark.[17] Fíggjarliga grundarlagið undir yrkisútbúgvingum og vaksnamanna- og eftirútbúgvingum (VEU) í Danmark, er *Arbejdsmarkedets Uddannelsesbidrag* (AUB).

[16] Frá 1. januar 2018 er er ætlanin at gera broytingar í AUB-gjaldinum samsvarandi trípartaavtaluni frá 2016. Ætlanin er at gera AUB-gjaldið tengt at læruplássinum.

[17] https://www.uvm.dk/uddannelsessystemet/overblik-over-det-danske-uddannelsessystem/voksen-og-efteruddannelsessystemet



AUB er ein samhaldsføst skipan millum allar privatar og almennar arbeiðsgevarar, sum skal fremja útboðið av læruplássum á yrkisútbúgvingarøkinum, við at stuðla fíggjarliga og við at umfordeila kostnaðin av útbúgvingunum. Søguliga er AUB-gjaldið komið, tí ráðharrin í arbeiðsmarknaðarmálum í størri mun ynskti, at arbeiðsgevararnar á privata arbeiðsmarknaðinum skuldu vera við til at gjalda fyri at útbúgva arbeiðsmegina.

AUB-íkastið verður brúkt til endurgjald fyri lønarútreiðslur (80 %) meðan lærlingurin er í skúla, stuðul til ferðing meðan lærlingurin er í skúla, veiting til lærlingar, sum fara í skúlapraktik, íkast til lærutíð uttanlands og tílíkt. Í AUB-íkastinum liggur eisini VEU-gjaldið frá arbeiðsgevarunum (Voksen- og efteruddannelse), sum er endurgjald til arbeiðsgevara, tá starvsfólk fara undir eina arbeiðsmarknaðarútbúgving.

Ein skipan í Danmark, sum eisini føroyingar hava brúkt, er stakgreinalestur í lærugreinum á miðnámsskúlastigi í skipanini GSK. Skeiðini eru heilárs-, hálvárs- ella summarskeið, og til ber at taka upp til tríggjar lærugreinar á hálvárs- ella heilársskeiðunum. Undirvísing í 16 tímar um vikuna gevur rætt til lestrarstuðul (SU), og lestrarstuðulin, sum verður brúktur til hesi skeiðini, telur ikki við í samlaðu SU-klippunum, sum hvør einstakur hevur rætt til.

Ein onnur skipan í Danmark er GIF (Gymnasiale Indslusningsforløb for flygtninge og indvandrere). Við hesari skipanini hava tilflytarar og flóttafólk møguleika at taka lærugreinar á gymnasialum miðnámi. Skeiðini taka eitt ár, eru ókeypis, og til ber at fáa SVU ella SU í skúlatíðini.

Danska vaksnamanna- og eftirútbúgvingarskipanin er væl útbygd, og talið av dønum, sum luttaka, er í hægra endanum, samanborið við hini OECD-londini[18].

Í seinastu tríparta-samstarvsavtaluni – "Trepartsaftale om styrket og mere fleksibel voksen-, efter- og videreuddannelse (2018-2021)" – eru partarnir, sum varða av arbeiðsmarknaðinum, komnir ásamt um at gera atgongdina til vaksnamanna- og eftirútbúgvingar einfaldari, við at hava ein felags pall, har tilmeldingar til bæði vaksnamannaútbúgving og eftirútbúgving fer fram. Eisini verður við nýggju avtaluni meira miðvíst roynt at miða úrvalið av eftirútbúgvingarmøguleikum eftir førleikatørvinum á arbeiðsmarknaðinum.

## Noreg

Hugsanin við góðum útbúgvingarmøguleikum og lívlangari læring stendur ovarlaga í norska eftirútbúgvingarpolitikkinum. Vaksin 25 ár og eldri, sum hava lokið eina útbúgving á ISCED 2-stigi, hava rætt til at verða førleikamett í sambandi við at tey søkja um upptøku á einari útbúgving á *ISCED 3-stigi*[19]. Mett verður um førleikar í mun til ásettu førleikamálini fyri útbúgvingina. Førleikametingin kann geva atgongd til útbúgvingina og stytting av lærutíð/útbúgvingartíð. Meginreglan er, at vaksin eldri enn 25 verða tikin upp til serstakar útbúgvingar, ið eru ætlaðar vaksnum.

[18] OECD, Felagsskapur fyri samstarv og menning (Organization for Economic Cooperation and Development).

[19] ISCED-3 svarar til miðnámsstøði – gymnasialt miðnám og yrkisnám – umframt okkara heilsurøktaraútbúgving.

Øll vaksin 25 ár og eldri, sum eru liðug við grundskúlan, men sum ikki hava tikið eina miðnámsútbúgving á ISCED 3-stigi, hava rætt til at taka eina slíka útbúgving. Vaksin skulu í fyrsta umfari fylgja útbúgvingargongdum, sum eru serliga ætlaðar vaksnum. Tey, sum eru yngri enn 25 ár, hava eisini rætt til at taka útbúgving á ISCED 3-stigi, og hava tískil øll rætt til at taka útbúgving á ISCED 3-stigi. Skilt verður ímillum, um persónur hevur *ungdómsrætt* ella *vaksnamannarætt* undir útbúgvingini. Hetta hevur ávirkan á, hvør stuðul verður latin, og hvørjum reglum søkt verður um upptøku eftir, umframt um ein hevur rætt til at vera førleikamettur, sum bert er møguligt, um ein hevur *vaksnamannarætt*.

Lestrarstuðul í norsku skipanini verður útgoldin sum lán, og verður ein partur av láninum umlagdur til stuðul, um útbúgvingin verður lokin sambært ætlan.

Lærlingar fáa lærlingaløn undir útbúgvingini, men kunnu harumframt søkja um lestrarstuðul/-lán. Tó verður stuðulin mótroknaður um lærlingalønin kemur upp um eitt ávíst.

## Finnland

Í Finnlandi kunnu tey, sum ikki lúka krøv til upptøku á einari útbúgving verða førleikamett, ella um viðkomandi metir seg hava førleikar í mun til útbúgvingina, ber eisini til at verða førleikamettur. Finnland hevur "vaksnamannamiðnám" sum vendir sær til vaksin í arbeiði, sum ynskja at gera eina fólkaskúla- ella miðnámsskúlaútbúgving lidna. Luttakarnir skulu helst vera fyltir 18 ár. Næmingurin kann sjálvur velja, um hann vil taka allar lærugreinarnar á útbúgvingini, ella staklærugreinar. Tekur næmingurin eina fulla miðnámsskúlaútbúgving verður ein undirvísingarætlan løgd fyri tann einstaka, eftir eina førleikameting. Hetta merkir eitt nú, at ein næmingur við góðum førleikum í enskum, kann fáa góðskrivaðan ein part av undirvísingini í enskum. Í nøkrum førum ber til hjá vaksnum at fara upp til miðnámsroynd, uttan at hava fylgt undirvísingini í øllum fakunum, sum annars eru kravd fyri útbúgvingina.

Í vinnurættaðu útbúgvingunum verður áherðsla løgd á, at útbúgvingin byggir víðari á verandi førleikar, og í grundini kunnu øll fara upp til próvtøku í einari vinnurættaðari grein. Hetta verður kallað "fristående examina". At verða førleikamettur er ein sjálvsagdur partur av tilgongdini, tá ið vaksin í Finnlandi fara undir eina útbúgving. Eftir førleikametingina verður ein undirvísingarætlan gjørd. Vaksin, sum lesa fulla tíð á ISCED 3-stigi í Finnlandi fáa lestrarstuðul, sum er 1.835,- kr um mánaðin fyri vaksin 20 ár og eldri. Umframt hetta ber til at fáa fíggjarligan stuðul frá ríkinum til ymiskt, ið viðvíkur skúlapartinum av útbúgvingini. Lærlingar fáa løn frá arbeiðsgevara undir útbúgving, og arbeiðsgevarin kann fáa endurgjald frá ríkinum. Vaksin, sum í minsta lagi hava verið í arbeiði í 8 ár, harav 1 ár á núverandi arbeiðsplássi, og sum ynskja at taka eina yrkisrættaða útbúgving, hava møguleika at søkja um ein serstakan útbúgvingarstuðul til vaksin úr einum útbúgvingargrunni. Hesin stuðulin kann vera latin vaksnum í upp til 18 mánaðir, sum ikki fáa løn ella annan stuðul undir útbúgvingini. Upphæddin svarar til arbeiðsloysisstuðulin í Finnlandi, og verður roknað við støði í lønini.



## Svøríki

Í Svøríki hava tey skipanina *komvux*, sum serliga er ætlað vaksnum. Skipanin er býtt í trý økir: kommunal vaksnamannaútbúgving (komvux-gy), serlig vaksnamannaútbúgving (särvux), ið er ætlað fólki við serligum tørvi, harumframt undirvísing í svenskum fyri tilflytarar – SFI.

Í Svøríki hava kommunurnar ábyrgd av vaksnamannaútbúgvingum, og tí er ymiskt, frá einari kommunu til aðra, hvør møguleikin er fyri at taka vaksnamannaútbúgving, og hvussu nógvir pengar verða settir av til hetta. Vaksin við stuttari útbúgving og tískil størsta tørvinum, verða raðfest fyrst. Vaksnamannaútbúgvingarnar verða bodnar út við skeiðum, og ein undirvísingarætlan verður gjørd til tann einstaka. Endamálið kann bæði vera at taka eina heila miðnámsútbúgving ella nakrar einstakar lærugreinar, soleiðis at viðkomandi kann fara víðari í útbúgvingarskipanini.

Í Svøríki kunnu tey, sum fara undir eina vaksnamannaútbúgving verða førleikamett. Eisini her kann tað vera ymiskt frá einari kommunu til aðra, í hvønn mun førleikameting verður brúkt, hvørt førleikamett verður innan yrkisútbúgvingarnar og miðnámsútbúgvingarnar á ISCED 3-stigi o.s.fr. Førleikametingin hevur sum oftast við sær, at útbúgvingartíðin verður stytt. Ongar treytir verða settar til aldur og arbeiðsroyndir hjá teimum sum verða førleikamett, men ein skal vera fyltur 20 ár fyri at koma undir vaksnamannaútbúgvingarskipanina.

Lestrarstuðulin til vaksnamannaútbúgvingarnar er býttur sundur í stuðul og lán. Í 2013 var tann samlaða mánaðarliga lestrarstuðulsupphæddin 7.759 dkk, harav vóru kr. 2.432 dkk stuðli. Fyri vaksin, 25 ár og eldri, er samlaða upphæddin tann sama, men stuðulin er lutfalsliga størri í mun til lánið.

Eisini ber til at taka eina yrkisútbúgving sum vaksnamannaútbúgving í Svøríki, við skipanini *yrkesvux* sum eru yrkisrættaðar vaksnamannaútbúgvingar, ið er ætlaðar teimum, sum ikki hava eina miðnámsútbúgving og teimum, sum vantar lærugreinar á miðnámsstigi. Kommunurnar kunnu fáa stuðul at útbúgva vaksin innan eina yrkisrættaða vaksnamannaútbúgving. Størsta undirvísingarvirksemið innan *yrkesvux* hevur verið innan heilsurøktar- og umsorganarøkið.

Serlig lærlingaskipan fyri vaksin finst eisini í Svøríki. Aldurskravið er somuleiðis 20 ár, og tað er ein fyrimunur fyri upptøku um umsøkjarin hevur starvsroyndir, men er ikki eitt krav.

## Ísland

Síðan fíggjarkreppuna 2008-2011 og tað arbeiðsloysið, sum stóðst av kreppuni, hevur stórur dentur verið lagdur á at útbúgva, førleikamenna og umskúla arbeiðsstyrkina í Íslandi. Serligur dentur hevur verið lagdur á útbúgvingar til vaksin, sum ikki hava útbúgving frammanundan.

Í Íslandi er eitt serligt vaksnamannamiðnám fyri lesandi, sum eru fylt 20 ár. Tey lesandi fylgja tí sama undirvísingarinnihaldinum, sum tey, ið ganga í vanligum miðnámi. Tað serliga við hesum miðnámi er, at undirvísingin fer fram seinnapartar og um kvøldarnar, og tey vaksnu skulu bara fylgja undirvísingini helvtina av tíðini, í

mun til vanligt miðnám. Ístaðin verður dentur lagdur á, at tey vaksnu skulu arbeiða sjálvstøðugt.

Sum heild er undirvísingarskipanin í Íslandi liðilig. Útbúgvingar kunnu takast fulla tíð ella parttíð, og góðir møguleikar eru fyri fjarundirvísing. Próvtøka kann eisini takast umvegis netið, í nógvum førum. Vaksnamannamiðnám er ætlað sum parttíðarlesnaður, men vaksin kunnu eisini velja vanligt miðnám og lesa fulla tíð. Ein onnur skipan í Íslandi, sum serliga er ætlað vaksnum, er fyrireiking til upptøku til hægri lestur (frumgreinadeild). Skipanin virkar sum millumliður millum yrkisútbúgvingar og verkfrøði og aðrar útbúgvingar á hægri háskúlastigi, og sum millumliður til útbúgvingar sum jura og samfelagsfrøði, umframt náttúruvísindaligar og hugvísindaligar útbúgvingar fyri ófaklærd og faklærd. Skipanin er serliga ætlað vaksnum, sum eru fylt 25 ár.

Harumframt er ein skipan, sum virkar sum ískoytisútbúgving til miðnám, ið skal gera tað lættari hjá vaksnum við yrkisútbúgving at verða tikin upp til hægri útbúgving. Útbúgvingin tekur frá 1,5 til 2 ára lestur fulla tíð.

Sosial- og heilsuútbúgvingar eru væl umtóktar í Íslandi, og ein serlig skipan fyri vaksin er eisini innan hesar útbúgvingar. Aldurskravið er 22-25 ár og trý til fimm ára viðkomandi starvsroyndir eru kravdar. Tey, sum taka hesar útbúgvingar sum vaksnamannaútbúgving fáa ein part av undirvísingini góðskrivaðan. Luttakararnir skulu taka 83 í staðin fyri 120 *lestrarstig*[20]. Endaliga prógvið er á sama stigi sum hjá teimum við vanligum prógvi.

Annars verður dentur lagdur á góðskriving av førleikum innan nærum allar útbúgvingargreinar í Íslandi. Lógargrundarlagið undir førleikameting kom í 2008 viðvíkjandi umgdómsútbúgvingum og í lóg um vaksnamannaútbúgvingar í 2010, har ið eisini dentur varð lagdur á týdningin av vegleiðingini. Øll vaksin, uttan mun til um talan er um lestrarfyrireikandi ella yrkisrættaða útbúgving, hava rætt til at verða førleikamett ella at fáa ein part av undirvísingini góðskrivaðan.

Í 2011 gjørdist tað møguligt hjá arbeiðsleysum at taka eitt semestur á ISCED 3-stigi ella á hægri háskúlastigi og samstundis varðveita arbeiðsloysidagpeningin. Annars eru stuðulsmøguleikarnir avmarkaðir hjá vaksnum, sum taka eina útbúgving á ISCED 3-stigi. Luttakarar á lestrarfyrireikandi útbúgving fáa ikki stuðul undir útbúgvingini og hava heldur ikki møguleika at taka lán, tó eru nøkur undantøk.[21]

Innan yrkisútbúgvingar verður løn latin í verkligu lærutíðini. Luttakarar á góðkendum yrkisrættaðum útbúgvingum kunnu søkja um lán frá íslendska ríkinum, eftir at hava tikið tvey semestur av útbúgvingini. Í 2012 var satsurin 29.882 dkk fyri hvørt semestur, umframt eina upphædd til at keypa undirvísingartilfar fyri.

Harumframt hava fyritøkur og stovnar møguleika at fáa samsýning fyri at taka ímóti lærlingum og starvslesandi gjøgnum ein útbúgvingargrunn – *Vinnustaðanámssjóður.*

Í 2010 varð lóg um vaksnamannaútbúgvingar sett í gildi í Íslandi. Høvuðsendamálið við hesi lóg er at útbúgva fólk við lítlari útbúgving. Ísland hevur ein málsetning um at minka um talið av fólki, sum ikki hava útbúgving á ISCED 3-stigi, frá 30 %, sum talið var í 2013, niður í 10 % í 2020.

20 Ísland hevur eina serstaka skilmarking av ECTS- stigum.

21 Uddannelse for voksne, Nordisk ministerråd, 2013.



Eitt stórt stig á leiðini at skipa førleikameting í Íslandi varð tikið, tá ið útbúgvingarmiðdepilin (Fræðslumiðstøð Atvinnulífsins) varð settur á stovn í 2012. Fakfeløg, tað almenna og arbeiðsgevarar eiga í felag stovnin, sum er ein arbeiðsmarknaðarútbúgvingarstovnur, ið hevur til endamáls at samskipa førleikameting, førleikamenning og vegleiðing. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava tískil ein leiklut, tá støða skal takast til, hvørjum útbúgvingum, førleikamett verður í.

## Grønland

Í 2010 høvdu bert 20,9 % av fólkinum eldri enn 16 ár eina útbúgving á ISCED 3-stigi. Tí hevur stórur tørvur verið á at útbúgva vaksin í Grønlandi. Tað er tó trupult at hava útbúgvingar í Grønlandi, sum beinleiðis eru ætlaðar vaksnum, tí trupult er at fáa nóg nógv at taka lut.

Í 2005 varð ein serlig miðnámsútbúgving fyri vaksin stovnað. Útbúgvingin tók eitt ár ístaðin fyri trý ár, sum útbúgvingin annars tekur. 3 ára viðkomandi starvsroyndir vóru kravdar fyri at kunna luttaka, umframt at tey lesandi skuldu vera fylt 23 ár. Vanligur lestrarstuðul varð latin. Tó varð hetta tilboð tikið av skrá í 2016 aftan á eina eftirmeting, har staðfest varð, at útbúgvingin ikki gav teimum lesandi teir neyðugu førleikarnar, sum kravdust, fyri at fara undir víðari útbúgving. Í august 2017 byrjaði ein nýggj royndarætlan við einari miðnámsútbúgving til vaksin, sum eftir ætlan skal avloysa gomlu skipanina. Nýggja útbúgvingin tekur 2 ár, og kunnu tey lesandi tískil fáa meira undirvísing og fara ígjøgnum eitt størri pensum. Málbólkurin er lesandi, eldri enn 23 ár, við royndum frá útbúgving ella arbeiði.

Harumframt verður eisini arbeitt við møguleikanum at seta e-/fjarundirvísing á stovn fyri sama málbólk, umframt fyri ung. Vaksin eru ofta bundin at familju umframt fíggjarligum skyldum. Møguliga hava tey bústað aðrastaðni enn í teimum býunum, har ið undirvísingartilboðini eru.

Møguligt er eisini at gerast vaksnamannalærlingur í Grønlandi. Aldurskravið at fara í vaksnamannalæru í Grønlandi er 30 ár, og 3 ára arbeiðsroyndir eru kravdar. Endaliga prógvið hjá einum vaksnamannalærlingi er tað sama, sum hjá øðrum lærlingum.

Ein trupulleiki í Grønlandi hevur verið, at lutfalsliga nógv eru, sum starvast ófaklærd/óútbúgvin, eitt nú í fólkaskúlum, serliga úti á bygdunum. Síðan 2010 hevur ein málsetningur verið at førleikamenna tey, sum starvast sum lærarar og ikki hava útbúgving. Í 2012 var talið av lærarum, sum undirvístu í fólkaskúlum á bygd, og sum ikki høvdu útbúgving, 50 %, og í restini av landinum var talið 12 %[22]. Í Grønlandi byrjaði førleikameting í 2010, og endamálið við førleikametingini hevur í fyrsta umfari verið at førleikameta ófaklærd, við tí fyri eygað, at tey skulu kunna fara undir eina yrkisútbúgving.

Ein verkætlan í Grønlandi, sum vendir sær til ófaklærdu arbeiðsstyrkina og tey, sum starvast innan "hóttar" starvsgreinar, er PKU (Projekt Kompetenceudvikling for Ufaglærte). Verkætlanin, sum verður stýrd av *Departement for Erhverv og*

22 Uddannelsesplan II, 2016, Departementet for Uddannelse, Kultur, Forskning og Kirke – Grønlands regering

*Arbejdsmarked,* vendir sær til ófaklærd yvir 25 ár. Málbólkurin er í fyrsta umfari arbeiðsleys og ófaklærd, sum eru hótt av arbeiðsloysi. Miðað verður ímóti at útbúgva hesi innan starvsgreinar, sum eru í vøkstri, har arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á arbeiðsmegi, eitt nú í byggivinnuni, ráevnisídnaðinum og ferðavinnuni. Skeiðini eru í trimum ella fýra modulum, sum vara í 5 dagar. Luttakarnir fáa goldið uppihalds- og ferðakostnað, og arbeiðsgevarin kann søkja um lønarendurgjald.



# Vaksnamannaútbúgving í Føroyum í dag

Vit hava sum er ikki skipaða vaksnamannaútbúgving í Føroyum, so sum vit annars kenna frá grannalondum okkara. Kortini hava vaksin og tilkomin møguleika at taka útbúgving á jøvnum føti við aðrar borgarar í landinum. Tó kann tað vera tungt og óhøgligt hjá einum vaksnum forsyrgjara at fara undir eina útbúgving ella førleikamenning yvirhøvur, um hann ella hon samstundis skal svara allar sínar fíggjarligu skyldur, uttan at fáa umstøður ella náðir til hetta. Her er tað, at ein skipan við vaksnamannalæru og førleikamenning í roynd og veru kann gera mun.

Í hesum sambandi er vert at vísa á, hvørji tilboð um vaksnamannalæring og førleikamenning, vit hava í Føroyum í dag.

## Fyrireikingarbreyt

*Fyrireikingarbreytin* er ein almennandi og lestrarfyrireikandi útbúgving, ið fevnir breitt um fleiri evni. Fyrireikingarbreyt er tað, sum fyrr kallaðist HF (Hægri Fyrireiking) og vendir sær serliga til tilkomin, sum taka eina miðnámsútbúgving eftir at hava havt ein steðg frá skúlanum. HF byrjaði í Danmark 1966, tí ynski vóru um eitt útbúgvingartilboð til tey mongu vaksnu, sum ongantíð høvdu tikið miðnámsútbúgving, og er sostatt eitt av fyrstu tilboðunum, sum hevur havt til endamáls, at fáa vaksin at taka útbúgving.

Fyrirekingarbreytin er serliga ætlað teimum sum vilja lesa víðari ella taka eina styttri ella miðallanga útbúgving.

## Fríðtíðarundirvísingarskipanin og fólkaupplýsing

Mentamálaráðið hevur skipaða undirvísing fyri vaksnum innan frítíðarundirvísingina. Eisini innan vinnu- og miðnámsskúlar, t.d á heilsuskúlanum, kokkaskúlanum og tekniska skúla luttaka vaksin.

Endamálið við vaksnamannalæring innan frítíðarundirvísingina er í høvuðsheitum at virka fyri at veita borgarum í øllum aldri tilboð um læring og eisini eitt fjølbroytt virksemi í frítíðini, so borgarin hevur møguleika at skapa sær eitt innihaldsríkt lív og møguleika at styrkja sín kunnleika og førleika á ymiskum økjum. Hetta er tað, sum vit ofta undir einum kalla fólkaupplýsing.

Dentur verður lagdur á at geva teimum, sum hava lítla ella onga útbúgving, eitt undirvísingartilboð, og møguleikan hjá ungdómi og vaksnum at taka eina miðnámsútbúgving ella hægri útbúgving.

Eisini verður arbeitt við at menna og skipa útbúgving í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum fyri útlendingar í Føroyum. Skipað verður bæði fyri styttri innleiðsluskeiðum og drúgvari skeiðum, grundskeiðum og framhaldsskeiðum.

Ítøkilig átøk innan fólkaupplýsing eru m.a.:

Skeið í lesing og skriving fyri teimum, ið vantar førleika á hesum øki
Orðblindaundirvísing, sum er skipað í 7 økjum kring landið

- 10. flokssprógv fyri vaksnum, ið ikki hava samsvarandi førleika
- HF-stakgreinalestur fyri vaksin, ið ikki hava eina miðnámsútbúgving
- Grundskeið í landbúnaði, sum er treyt fyri at kunna átaka sær eitt festi
- Dugnaskapsroynd í sigling, sum gevur rættindi at føra skip upp til 100 tons og út á 200 fjórðingar, dugnaskaparroynd í motorlæru, skeið í lívbjarging og S.R.C./VHF skeið. Eisini verður skipað fyri serligari dugnaskaparroynd fyri frítíðarsiglarum.

Av tí at royndir vísa, at lesiførleikin ikki er nøktandi, eru fleiri eftirútbúgvingar settar í verk fyri at geva lærarum førleika at menna lesiførleikan hjá børnum, ungdómi og vaksnum í frítíðarundirvísingini, fólkaskúlanum og vinnu- og miðnámsskúlum. Bæði í arbeiðinum at menna lesiførleikan hjá vaksnum og í undirvísing fólkaskúlans hevur tað víst seg at vera eitt ávíst tal av børnum/vaksnum, sum eru orðblind/hava dysleksi. Tí er orðblindaundirvísing skipað, bæði í fólka-, vinnu- og miðnámsskúlum og í frítíðarundirvísingini.

Harumframt eru nógv tilboð innan kreativar/musiskar lærugreinar, bæði fyri vaksin, børn og ungdóm, sum, hóast tær ikki eru førleikagevandi, eru grundleggjandi fyri at geva fólki eitt innihaldsríkari lív, og fakligan íblástur til víðari læring og heimaídnað, serliga innan tónleik og handaligar lærugreinar, umframt lívsstílslærugreinar innan kost og rørslu.

## Stakgreinarlestur í kvøldskúlunum

Kvøldskúlarnir í Føroyum bjóða stakgreinarlestur í nøkrum lærugreinum. Hesi skeið eru tó skipað sum vanlig kvøldskúlaskeið við luttakaragjaldi, og skeiðini vara ein vetur. Kvøldskúlin í Tórshavn hevur eftirlýst møguleikanum at bjóða skeiðini út sum hálvárs- ella summarskeið, við møguleika fyri at fáa lestrarstuðul.

Til ber at taka stakgreinar á miðnámsstigi á nøkrum kvøldskúlum í Føroyum. Nakrar treytir í mun til lokið útbúgvingarstig í fólkaskúlanum verða settar. Lýkur umsøkjari ikki hesar treytir, kann hann tó, um hann er nóg gamal og verður mettur at hava fakligan førleika, ið svarar til fólkaskúlaprógv, verða upptikin til fakið. Eisini bjóðar kvøldskúlin royndarfyrireikandi undirvísing í 10. flokki, sum endar við próvtøku.

Møguleiki er at taka HF-stakgreinalestur í kvøldskúlaskipanini. Lærugreinarnar, sum verða bjóðaðar á kvøldskúlunum eru støddfrøði á A- og B-stigi, evnafrøði á C-stigi og sálarfrøði á C-stigi. Málbólkurin til stakgreinalestur eru vaksin, sum ikki hava tikið hesar greinar á miðnámi, ella vilja betra próvtølini í ávísum lærugreinum. Luttøkugjald er eitt krav, og tey, sum luttaka, fáa ikki lestrarstuðul. Leiðslan á Tórshavnar kvøld-, ungdóms- og listaskúla metir, at hendan skipanin kundi verið gjørd meira smidlig, eitt nú við at hesi skeið vórðu kroyst meira saman, so at tey kundu verið tikin yvir eitt styttri tíðarskeið. Sum nú er, fara føroyingar til Danmarkar at taka hesar lærugreinar, og fáa lestrastuðul ímeðan. Grundarlag átti tískil at verið fyri at havt líknandi skeið í Føroyum, og tá kundu fólk sloppið undan at skula flyta til Danmarkar at taka hesar kravdu ella vantandi lærugreinar.



Kvøldskúlarnir kunnu bjóða skeið í føroyskum fyri tilflytarar. Skeiðini koma undir skipanina serstøk frítíðarundirvísing og eru ókeypis. Hesi skeiðini eru væl vitjað, og mælt verður tilflytarum til at taka hesi skeiðini, tá teir flyta til Føroyar. Eisini eru serlig skeið í enskum fyri norðurlendskar tilflytarar, sum eisini eru ókeypis.

Sum áður nevnt, er ein trupulleiki hjá tilflytarum í Føroyum, at teir duga ikki danskt. Danskt verður brúkt í ymiskum týðandi viðurskiftum í Føroyum, og er tað tí ein bági ikki at duga danskt. Tórshavnar kvøld-, ungdóms- og listaskúli bjóðar skeið í donskum fyri tilflytarar. Hesi skeið eru tó ikki ókeypis, og ein treyt fyri at luttaka er, at viðkomandi dugir føroyskt. Tey bæði seinastu árini hava skeiðini verið boðin fram á kvøldskúlanum, men skeiðini hava tó ikki verið vegna vantandi undirtøku. Tó hevur hetta skeið fyrr verið sera væl umtókt, og eftirmetingin av skeiðinum hevur verið jalig.

## Lóg um yrkisskeið ella arbeiðsmarknaðarútbúgvingar

Í 2004 fingu vit løgtingslóg um yrkisskeið. Við hesi lóg var ætlanin at hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni, at viðlíkahalda og menna verandi vinnuførleika, og at menna og viðlíkahalda ástøðiliga førleikan. Skeiðini sambært lóg um yrkisskeið fevna um skeið, sum skulu menna vinnuførleikarnar hjá tí einstaka luttakaranum, og skeið, sum bøta um møguleikarnar hjá tí einstaka at fáa útbúgving ella arbeiði. Skeiðini venda sær serliga til verkafólk, serarbeiðarar, starvsfólk við yrkisútbúgving, fólk við tøkningaútbúgving og onnur, ið kunnu javnsetast við hesi.

Tað er ymist, hvussu tað hevur hilnast at skipa fyri yrkisskeiðum sambært lógini um yrkisskeið. Undirtøkan hevur sum heild verið lítil, eina mest tí skipanin hevur kenst umsitingarliga tung, luttøkugjald hevur verið kravt, skeiðini hava kostað í meira lagi, og einki endurgjald hevur verið latið fyri mista inntøku í skeiðstíðini. Yrkisskeið innan landbúnað, sum verður fyriskipað sambært lóg um frítíðarundirvísing, hevur havt stóran áhuga hjá mongum. Hesi skeið vórðu upprunaliga ætlað sum uppstigan til bøndur, sum høvdu festi, men sum ikki høvdu kravdu útbúgvingina, ið nýggja lógin um festijørð álegði. Yrkisskeið innan landbúnað verða fyriskipað á Búnaðarstovuni, sum tekur serstakt gjald fyri skeiðsluttøku.

## Dugni

18 ára gomul og eldri, sum ikki hava fólkaskúlaprógv ella ynskja at betra próvtølini, hava møguleika at taka 9. flokssprógv á skúlanum við Áir, sum hoyrir undir sjálvsognarstovnin Dugna. Stovnurin arbeiðir í høvuðsheitum við endurbúgving, har endamálið, sambært viðtøkum stovnsins, er at vera arbeiðstarnaðum til hjálpar við framleiðslu, og annars at hjálpa avlamnum til arbeiðis. M.a. verður hetta gjørt við at royna arbeiðsevnini hjá borgarum, ið eru starvstarnaðir, og við at skipa fyri arbeiðsvenjing og útbúgving.

Málbólkurin hjá skúlanum við Áir eru fólk við rørslutarni og lættari sinnisligum ella heilsuligum avbjóðingum. Tó stendur øllum í boði at søkja inn á skúlan. Endamálið er at menna fakligu og persónligu førleikarnar, so at tey lesandi kunnu

taka 9. floksprógv og soleiðis fáa møguleikar at fara undir eina førleikagevandi útbúgving.

Ert tú vinnutarnaður, hevur tú møguleika at søkja um stuðul sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk, ið Almannaverkið umsitur, og samstundis ganga í skúlan við Áir og taka fólkaskúlaprógv. Tey, sum lesa á skúlanum við Áir, og ikki eru ávíst gjøgnum Almannaverkið, hava rætt til stuðul gjøgnum Studna.

Tey, sum taka 9. flokk á skúlanum við Áir, eru bæði lesi- og skriviveik, orðblind, tilflytarar, og nøkur hava av ymiskum ávum ongantíð gjørt seg lidnan við fólkaskúlan, og ynskja at betra um fólkaskúlaprógvið. Felags fyri tey flestu er, at tey hava ikki tað yvirskot, sum skal til, fyri at taka 9. floksprógv í kvøldskúlanum ella einum vanligum fólkaskúla.

Næmingarnir á skúlanum við Áir taka allar kravdu lærugreinarnar og verða ikki førleikamettir í sambandi við útbúgvingina.

## Heilsuskúlin

Ein føroysk útbúgving, sum nógvir tilkomnir føroyingar – serliga kvinnur – hava valt sær, er útbúgving innan heilsu, sum Heilsuskúli Føroya bjóðar. Heilsuskúlin heldur til á Skúladeplinum í Suðuroy. Í kunningartilfarinum frá Heilsuskúlanum stendur, at útbúgvingarnar – sum fevna um heilsuhjálpara og um heilsurøktara – eru eitt tilboð, bæði til heilt ung og meira tilkomin.

Treytin fyri at verða upptikin til heilsuhjálpara er 9. floksprógv umframt eitt árs arbeiðsroyndir, ella 10. floksprógv. Fyri at verða upptikin til heilsurøktara krevst útbúgving sum heilsuhjálpari ella onnur skúlagongd við í minstalagi trimum mánaðum viðkomandi starvsroyndum innan umsorgan og røkt.

Tey, ið lesa til heilsuhjálpara ella heilsurøktara fáa stuðul frá Studna.

Á útbúgvingini til heilsuhjálpara ber til at søkja um at fáa part av útbúgvingini góðskrivaðan, um ein hevur í minsta lagi 3 ára viðkomandi starvsroyndir sum ófaklærdur innan heilsurøktarøkið. Styttingin av útbúgvingini er 3 mánaðir, ið svarar til tað eina starvsvenjingartíðarskeiðið, sum so fellur burtur.

## ALS

Arbeiðsleys í ALS-skipanini hava møguleika at taka skeið í upp til tríggjar mánaðir meðan tey fáa stuðul úr ALS-skipanini. ALS hevur bert møguleika at víkja frá skylduni at vera tøk/ur á arbeiðsmarknaðinum í tríggjar mánaðir, og setir hetta avmarkingar á útboðið av skeiðum, sum kunnu veitast, og skeiðini verða av somu orsøk heldur ikki førleikagevandi.

ALS hevur sóknast eftir einari útbúgvingarskipan, ið er ætlað arbeiðsleysum við ongari útbúgving, soleiðis at tey fáa brúkt tíðina, tey eru arbeiðsleys, til at førleikamennast og at styrkja sína útbúgvingarligu støðu, eisini fyri at standa seg betur á arbeiðsmarknaðinum í framtíðini. ALS hevur havt samstarv við kvøldskúlaskipanina, har arbeiðsleys hava tikið 10. flokk. Eisini hevur verið møguligt at taka styttri førleikagevandi skeið gjøgnum ALS, um mett verður, at viðkomandi kann fáa eitt starv, tá hesir førleikar verða lagdir afturat.



Tá talan er um at útbúgva ófaklærd í samstarvi við ALS, hevur ALS nevnt sum ein møguleika, at tá tey ófaklærdu, ið eru í starvi á einum virki, fara úr sínum starvi at taka eina útbúgving, kundu tey arbeiðsleysu í ALS-skipanini komið í hesi størv ímeðan.

Sum er, er ikki møguleiki hjá einum sum er í ALS at nema sær førleikagevandi útbúgving við stuðli úr ALS-skipanini.

# Lóg um førleikameting

Í hinum Norðurlondunum verður stórur dentur lagdur á at laga útbúgvingartilgongdina hjá einum vaksnum eftir teimum umstøðum, tann vaksni er í. Hini Norðurlondini gera hetta við støði í tí grundsjónarmiði, at tað skal ikki vera neyðugt at útbúgva seg í tí, ein longu hevur lært, uttan mun til, hvar ein hevur lært ella ognað sær førleikarnar. Tí er tað so umráðandi at hava eina vælvirkandi skipan við førleikameting, sum kann tryggja dygdina í teimum førleikum, sum tann vaksni einstaklingurin kann fáa góðskrivaðar. Og her eru vit í Føroyum komin væl áleiðis, bæði við lóg um førleikameting og tilhoyrandi kunngerð á økinum.

Lóg um førleikameting fer at gera tað møguligt at verða førleikamettur innan allar útbúgvingar. Tó krevst nógv fyrireiking, áðrenn allar føroyskar útbúgvingar kunnu sigast at vera til reiðar at fara undir at førleikameta.

# Fíggjarligu fortreytirnar hjá vaksnum at fara undir útbúgving

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt spurningin um, hvørt vaksin skulu fáa lønarendurgjald ella ein hægri stuðul, tá ið tey fara undir eina útbúgving ella tá ið tey førleikamenna seg. Eingin niðurstøða er gjørd hesum viðvíkjandi. Sum er, hava vit ongar aðrar fíggjarligar skipanir enn tær vanligu, sum Studni í mestan mun umsitir.

Í Føroyum eru ongar skipanirnar, sum burturav venda sær til vaksin, og sum eggja vaksnum at fara undir útbúgving. Í mun til hini Norðurlondini skal ein vaksin føroyingur í flestu førum undir eina vanliga útbúgvingartilgongd, har hann verður javnsettur við tey ungu, sum fara úr fólkaskúlanum í læru ella undir aðra útbúving. Tann vaksni fær tá lestrarstuðul á jøvnum føti við tey ungu.

Í grannalondum okkara eru fíggjarligir karmar lagdir fyri hetta slag av útbúgvingum, sum virka fyri at gera tað lættari hjá tilkomnum, ið ynskja at fara undir útbúgving. Harumframt fáa vaksin í hinum Norðurlondunum í nógvum førum serligan lestrarstuðul, sum er hægri einn vanligi lestrarstuðulin. Tó skal havast í huga, at vanligi lestrarstuðulin, sum vit hava í Føroyum og Danmark, er munandi hægri enn í hinum norðurlondunum, har lesandi í størri mun mugu taka lán. Serligi lestrarstuðulin, sum í hinum norðurlondunum verður veittur vaksnum, er við onkrum undantøkum ikki hægri enn føroyski lestrarstuðulin.

Ein vaksnamannaútbúgvingarskipan skal vera áhugaverd hjá teimum vaksnu, sum onga útbúgving hava, og sum kundu hugsa sær útbúgving ella førleikamenning. Eisini skal hon vera áhugaverd hjá virkjum og stovnum, sum hava brúk fyri at førleikamenna síni starvsfólk.

Tann grundleggjandi faktorurin, at gera vaksnamannaútbúgvingarskipanina áhugaverda hjá avvarðandi pørtum, er at at fáa loyst tær fíggjarligu forðingarnar, ið vaksin ofta merkja, serliga í sambandi við útbúgving.

Í Føroyum hevur verið kjak í mong ár um, hvørt Føroyar skulu hava skipaða vaksnamannaútbúgving. Vaksnamannaútbúgving í Føroyum varð av álvara sett á dagsskrá tá ið NVL, sum er norðurlendska vaksnamannaútbúgvingarsamstarvið undir norðurlendska ráðharraráðnum, varð skipað[23]. Í 2007 var fyrsta tiltakið í NVL-høpi í Føroyum, við ráðstevnu um lívlanga læring. Síðani tá hava fleiri tiltøk verið í Føroyum, eins og føroysk NVL-umboð javnan eru til tiltøk í NVL-høpi uttanlands. Arbeiðsøkini hjá NVL eru m.a.:

- at menna og seta í verk skipanir fyri lívlanga læring og førleikamenning innan ymisk øki við atliti at vaksnamannalæring í Norðurlondum
- at hjálpa til persónliga menning og demokratiska luttøku gjøgnum ymiskar skipanir við vaksnamannalæring
- at menna samskipan við Nordplus við atliti til at menna norðurlendsku útbúgvingarskipanirnar, og
- strategiskt at kunna um royndir og úrslit frá norðurlendskum samstarvi um vaksnamannalæring í Norðurlondum og Evropa.

[23] Aðalmálið hjá NVL er at menna vaksnamannaútbúgvingarøkið í Norðurlondum, við denti á áhaldandi menning av førleikum hjá øllum vaksnum. Meira um NVL: www.nvl.org



Við lógini um førleikameting frá 2014 var eitt týdningarmikið stig tikið til at betra umstøðurnar hjá vaksnum í Føroyum at nema sær útbúgving, við tað at lóg um førleikameting varð sett í gildi.

Ein annar liður í tilgongdini, er at skapa karmar fyri einari vaksnamannaútbúgvingarskipan í Føroyum.

## Uppihaldsgrundarlag hjá teimum, sum eru í útbúgving

Tey, sum eru lesandi, hava rætt til lestrarstuðul frá Studna. Øll tey, sum ikki hava børn, hava einans rætt til upphæddirnar, sum eru ásettar í løgtingslógini um lestrarstuðul, meðan hjá teimum, sum hava børn, kemur uppihaldsgrundarlagið eisini frá øðrum skipanum, sum ikki eru tengdar at útbúgving.

Lestrarstuðulin til miðnám er 3.815 kr. um mánaðin, meðan stuðulin til hægri lestur og styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingar er 4.315 kr. um mánaðin. Tey, sum hava børn, fáa umframt hægri lestrarstuðul, sum nevnt eisini stuðul frá øðrum skipanum. Barnastuðul er hesin (allar upphæddirnar eru ikki skattskyldugar):

***Barnastuðul frá Studna***, sum er 1.000 kr. fyri hvørt barni. Eitt par við børnum, har bæði eru lesandi, hava tó ikki bæði rætt til barnastuðul.
***Stuðul frá Studna til einsamallar uppihaldarar***, sum er 1.532 kr. um mánaðin (ikki pr. barn).
***Barnafrádráttur*** - Lesandi við børnum, sum ikki hava skattskylduga inntøku, fáa barnafrádráttin útgoldnan (einaferð um árið). Í 2017 er barnafrádrátturin í miðal 13.182 kr. um árið fyri hvørt barnið, ið svarar til uml. 1.100 kr. um mánaðin. Er barnið yngri enn 7 ár, er barnafrádrátturin tó uml. 1.325 kr. um mánaðin.
***Barnaískoyti til stakar uppihaldarar*** (sbrt. løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar), sum er 10.000 kr. um árið fyri hvørt barnið, svarandi til 833 kr. um mánaðin. Treytin fyri at móttaka ískoytið er, at persónurin er einsamallur at uppihalda barninum. Ein stakur uppihaldari, sum t.d. býr heima hjá foreldrunum, hevur eisini rætt til ískoytið – tað er parlagsstøðan, sum er avgerandi. Barnaískoyti er ikki tengt at inntøku.
***Familjuískoyti*** (sbrt. løgtingslóg um familjuískoyti) verður veitt barnafamiljum við lágum inntøkum. Familjuískoyti til støk er 18.000 kr. um árið fyri fyrsta barnið og hækkar við 5.000 kr. fyri hvørt barnið, sum er afturat tí fyrsta barninum. Familjuískoyti til pør er 22.000 kr. fyri fyrsta barnið og hækkar við 5.000 kr. fyri hvørt barnið, ið er afturat tí fyrsta barninum.

Ein stakur uppihaldari fær vanliga eisini barnagjald (ásett sbrt. lóggávu um rættarstøðu barnanna), og er vanliga barnagjaldið 1.083 kr. fyri hvørt barnið. Barnagjaldið er eitt gjald frá einum foreldri til hitt, og er sostatt ikki talan um almennan stuðul.

*Talva 1 – Dømi um einsamallan uppihaldara undir hægri lestri*

| **Talva 1** | **1 barn** | **2 børn** | **3 børn** |
|---|---|---|---|
| *Studningur* | 4.315 | 4.315 | 4.315 |
| *Barnastuðul frá Studna* | 1.000 | 2.000 | 3.000 |
| *Stuðul til einsamallar uppih. frá Studna* | 1.532 | 1.532 | 1.532 |
| *Barnaískoyti til støk* | 833 | 1.666 | 2.499 |
| *Familjuískoyti* | 1.500 | 1.917 | 2.333 |
| *Barnafrádrátttur* | 1.325 | 2.425 | 3.525 |
| *Barnagjald* | 1.083 | 2.166 | 3.249 |
| ***Inntøka til samans*** | **11.588** | **16.021** | **20.453** |

Viðm.: Viðv. barnafrádráttinum veðrur gingið út frá, at eitt barn er yngri enn 7 ár

*Talva 2 – Dømi um par, har bæði eru undir hægri lestri (inntøka bæði tilsamans)*

| **Talva 2** | **1 barn** | **2 børn** | **3 børn** |
|---|---|---|---|
| *Studningur* | 8.630 | 8.630 | 8.630 |
| *Barnastuðul frá Studna* | 1.000 | 2.000 | 3.000 |
| *Stuðul til einsamallar uppih. frá Studna* | - | - | - |
| *Barnaískoyti til støk* | - | - | - |
| *Familjuískoyti* | 1.833 | 2.250 | 2.667 |
| *Barnafrádrátttur* | 1.325 | 2.425 | 3.525 |
| *Barnagjald* | - | - | - |
| ***Inntøka til samans*** | **12.788** | **15.305** | **17.822** |

Viðm.: Viðv. barnafrádráttinum veðrur gingið út frá, at eitt barn er yngri enn 7 ár

Einastu upphæddirnar omanfyri, sum er tengdar at inntøku, er lestrarstuðulin og familjuískoyti. Markið fyri, at lestrarstuðulin lækkar, er við a-inntøku á 20.000 kr. um mánaðin (ongin av stuðlunum omanfyri er a-inntøka). Markið fyri, at familjuískoyti lækkar, er við ársinntøku á 200.000 kr. hjá støkum og 280.000 kr. hjá pørum tilsamans.

### Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

Einasta skipanin, sum finst í Føroyum í dag, har ið serligur fíggjarligur styrkur verður latin vaksnum undir útbúgving, er arbeiðsbúgving sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum Almannaverkið umsitur. Hendan skipanin er tó málrættað teimum, sum hava skerdan arbeiðsførleika og hava avbjóðingar av sosialum ella heilsuligum slag. Tó er eingin forðing fyri, at fólk, sum eru fevnd av skipanini, samstundis kunnu taka eina útbúgving. *§ 1. Lógin fevnir um tiltøk, ið stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar við at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin – stk. 2. Lógin fevnir eisini um tiltøk, ið fyribyrgja avleiðingar av langtíðarfráveru frá arbeiði vegna arbeiðsloysi, sjúku ella annað.*

Tey, sum fara undir hesa skipanina hava eitt nú møguleika at taka miðnáms-útbúgving, yrkisútbúgving ella hægri útbúgving undir serligum treytum og møguliga yvir eitt longri tíðarskeið. Í tíðarskeiðinum fáa tey veiting eftir § 12 í lógini, sum er hægri enn vanligur studningur frá Studna og hægri enn forsorgarveiting annars.

### Smidligari útbúgvingarmøguleikar skulu byrgja fyri mismuni

Vandi er fyri, at tey, sum hava avmarkaða skúlagongd og skerdar førleikar, umframt tilflytarar við aðrari og øðrvísi mentanarligari og útbúgvingarligari bakgrund, ikki kunnu gerast partur av menningini á framtíðar arbeiðsmarknaðinum. Ein gongd leið at byrgja fyri slíkum mismuni, er at menna eina skipan, sum kann gera tað møguligt hjá hesum borgarum, at ogna sær viðkomandi førleikar. Meira smidligir útbúgvingarmøguleikar stuðla undir sosiala inklusión og byrgja fyri sosialari útihýsing. Økt verður um menningarmøguleikarnar hjá tí einstaka gjøgnum alt lívið, og møguleikarnir eru ikki í sama mun tengdir at, hvussu tann einstaki klárar seg í formligu útbúgvingarskipanini.

Eisini er týdningarmikið at geva eldri, eitt nú við kropsliga tungum og strævnum arbeiði, møguleika at velja nýggja starvsleið, eisini við tí atliti, at varðveita eldru arbeiðsstyrkina longri á arbeiðsmarknaðinum.

## Norðurlendskt samstarv um vaksnamannalæring

Vaksnamannundirvísing fer fram á ymiskum stigum í útbúgvingarskipanini, og tí er umráðandi at styrkja samskipanina av teimum tilboðum, ið eru. Mentamálaráðið hevur síðan 2005 havt ein kontaktpersón við tilknýti til norðurlendsku skipanaina, NVL, sum er eitt netverk fyri vaksnamannalæru innan Norðurlendska Ráðharraráðið. Føroyski kontaktpersónurin luttekur í norðurlendska arbeiðinum, har arbeiðsøkini m.a. eru at menna og seta í verk skipanir fyri lívlanga læring og førleikamenning innan ymisk øki við atliti at vaksnamannalæring í Norðurlondum, at virka fyri at tryggja persónliga menning og demokratiska luttøku gjøgnum ymiskar skipanir við vaksnamannalæring, menna samskipan við Nordplus við atliti at menna norðurlendsku útbúgvingarskipanirnar og at kunna um royndir og úrslit frá norðurlendskum samstarvi um vaksnamannlæring í Norðurlondum og Evropa.

Føroyar luttaka gjøgnum NVL í fleiri norðurlendsum samstarvsbólkum, sum gevur økjunum, haðani luttakararnir eru, góðan íblástur, men enn vantar ein ein tílík samskipan í Føroyum.

Mælt verður til, at umboð fyri Mentamálaráðið og føroyski NVL samskiparin gera eina ætlan fyri at samskipa alla vaksnamannlæru í Føroyum, og at taka umboð fyri arbeiðsbólkin, ið arbeiðir við at skipa útbúgving fyri útlendingar, við í samskipanararbeiðið.



# Vaksnamannaútbúgving og lívlong vegleiðing

Síggja vit vaksnamannaútbúgving sum førleikamenning í breiðastu merking, kann hon verða lýst úr trimum meginsjónarhornum: tí hjá arbeiðsgevaranum, tí hjá einstaka borgaranum og tí hjá samfelagnum.

Fyri arbeiðsgevaran snýr førleikamenning seg um at útvega arbeiðsmegi við røttu førleikunum, at førleikamenna starvsfólk og at skipa arbeiðið soleiðis, at førleikarnir á arbeiðsplássinum verða nýttir á besta hátt.

Fyri tann einstaka snýr førleikamenning seg um at nema sær útbúgving, sum síðan gevur atgongd til arbeiðsmarknaðin. Harumframt verður hin einstaki førur fyri at menna sínar førleikar alla tíðina og framhaldandi útbúgva seg. Hetta er við til at styrkja støðu hins einstaka á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum sum heild, og gevur hægri løn og betri persónliga vælferð.

Úr samfelagsliga sjónarhorninum snýr førleikamenning seg um at skúla arbeiðsmegina til teir førleikar, sum arbeiðsmarknaðurin og samfelagið sum heild hevur tørv á, m.a. við at hava eina nøktandi útbúgvingarskipan, sum er smidlig og sum veitir røttu útbúgvingarnar. Fyri samfelagið er tað eisini ein búskaparligur spurningur at hava eitt høgt útbúgvingar- og førleikastøði, eisini tá talan er um kappingarførið í samfelagnum.

## Berandi liðirnir í skipanini, sum skal útvega førleikar

Umráðandi er, at skipanin, sum krevst fyri at tann einstaki kann fáa teir røttu førleikarnar til eitt verandi ella komandi starv, virkar eftir ætlan. Ein skipan kann vera allýst sum liðir, ið samvirka við hvønn annan, so at skipanin kann virka sum ein heild og harumframt veita tey ætlaðu úrslitini. Hvør liður eigur at hava samlaða úrslitið í eygsjón og at vera skipaður og lagaður við hesum í huga. Liðirnir, sum útvega arbeiðsmarknaðinum førleikar, kunnu við øðrum orðum lýsast sum:

- *Formliga útbúgvingarskipanin*, sum veitir teimum útbúgving, sum skulu út í arbeiðslívið
- *Læring, sum fer fram á arbeiðsplássinum*, og sum ger tað møguligt at røkka settu málunum
- *Almennar og viðurkendar skipanir fyri førleikameting*, har førleikar verða gjørdir sjónligir í mun til staðfest krøv, soleiðis at útbúgving til arbeiðslívið er viðkomandi og styðjar uppundir eitt væleydnað samsvar millum førleikarnar hjá tí einstaka og tørvin á førleikum í samfelagnum.

Fyri at liðirnir skulu halda og samvirka við hvønn annan, er umráðandi at hava eitt støðugt samskifti, økt gjøgnumskygni og flytføri, sum skulu geva opinleika millum teir ymisku liðirnar. Hetta krevur eitt breitt samstarv millum partarnar sum varða av á teimum ymisku økjunum.

Søguliga hevur formliga útbúgvingarskipanin verið tann, sum hevur syrgt fyri, at veita arbeiðslívinum neyðugu førleikarnar. Í einum tíðarskeiði, við alsamt títtari umskiftum og broytingum, verða lívlang læring og teir ítøkiligu førleikarnir alsamt meira virðismiklir at hava afturat førleikunum, sum vera ognaðir í formligu útbúgvingarskipanini.

| Teir 8 lyklaførleikarnir í sambandi við lívlanga læring | |
|---|---|
| ES hevur allýst 8 lyklaførleikar sum grundleggjandi førleikar í einum framkomnum vitanarsamfelag, og sum helst skulu vera partur av langtíðarætlan limalandanna um lívlangari læring. | |
| 1 | **Samskifti á móðurmálinum**, ið merkir evnini til at bera fram og tulka hugtøk, tankar, kenslur, ítøkilig viðurskifti og áskoðanir, bæði munnliga og skrivliga. |
| 2 | **Samskifti á fremmandamáli**, sum fevnir um tað sama sum oman fyri, umframt um førleikar í miðling, so sum samanumtøku, umorðingar, tulking ella umseting) umframt at skilja aðrar mentanir. |
| 3 | **Støddfrøðiførleiki og grundførleikar í náttúruvísindum og tøkni**, ið fevna um góðar rokniførleikar, fatan av náttúrunnar grundreglum, umframt evni til at nýta vitan og førleikar, fyri at finna svar uppá tørvin hjá menniskjum, eitt nú í sambandi við heilsu, flutning ella samskifti. |
| 4 | **Talgildar førleikar**, sum snúgva seg um trygga og kritiska nýtslu av kunningar- og samskiftistøkni í arbeiði, frítíð og samskifti sum heild. |
| 5 | **Førleikar at læra**, t.e. evnini til leggja egna læring til rættis, antin einsæris ella í bólkum. |
| 6 | **Sosialir førleikar og førleikar í virknari luttøku**, fevnir m.a. um evnini til at luttaka á virknan og skilvísan hátt í samfelagslívinum og arbeiðslívinum. |
| 7 | **Framtakssemi og íverksetanarvirki** eru evnini til at gera hugskot til veruleika gjøgnum skapanarevni, innovatión og váðafýsni, umframt evnini at leggja til rættis og standa fyri verkætlanum. |
| 8 | **Mentanarlig tilvitska og framsetanarevni** fevnir um evnini at vera førur fyri at ásanna skapanarliga týdningin av hugskotum, royndum og kenslum innan ymiskar greinar, eitt nú tónleiki, bókmentum, visuellari list og øðrum listagreinum. |

Teir 8 lyklaførleikarnir, sum ES hevur allýst og sum eru ætlaðir limalondunum at hava við í sínum ætlanum viðvíkjandi lívlangari læring.[24]

Tørvurin á førleikum verður sostatt ikki longur einans fingin til vega í formligu útbúgvingarskipanini. Hóast ein vælvirkandi útbúgvingarskipan framhaldandi er avgerandi fyri, at arbeiðsmarknaðurin fær teir neyðugu førleikarnar, kemur tann útbúgvingin, ein hevði, tá ein fyrstu ferð fór á arbeiðsmarknaðin, neyvan at vera nóg fullfíggjað alt arbeiðslívið. Hetta setir eisini nýggj krøv til umstøðurnar til ta framhaldandi læringina, sum ikki er knýtt at útbúgvingarstovnunum.

[24] http://eur-lex.europa.eu/legal-content/DA/TXT/?uri=LEGISSUM%3Ac11090

## Fólkaupplýsing

Í samfelagnum eru ymiskir formar fyri læring. *Fólkaupplýsingin* hevur havt ein avgerandi og týðandi leiklut, tá tað snýr seg um læring í Norðurlondum síðani 18. øld. Fólkaupplýsing er eitt felags heiti fyri fleiri ymisk sløg av vaksnamannalæru, og verður bólkað sum læra, ið er ikki-formlig læra (non-formal). Fólkaupplýsing er við til at stimbra førleikar og evni at taka virknan lut í menningini av samfelagnum og er grundfest í tí sum ofta verður kallað *triði geirin.*

Førleikar, sum ein hevur ognað sær við at vera partur av felagsskapum, sum taka sær av *fólkaupplýsing,* telja eisini við, tá ið ein førleikameting verður gjørd. Hesir førleikar eru ikki altíð so lættir at allýsa, men verða í størri mun enn tann formliga læran sæddir í mun til heildina av førleikunum hjá tí einstaka. Tann einstaki fær sostatt møguleika at vera mettur út frá allari breiddini av førleikum, hann hevur ognað sær, og ikki bert teimum, hann hevur ognað sær í formligu útbúgvingarskipanini.

Í Føroyum verður ein stórur partur av virkseminum í triðja geiranum bólkaður undir "frítíðarvirksemi" (smb. skipan við frítíðarundirvísing, ið er umrødd á s. 30-31), sum Mentamálaráðið fíggjar. Eisini aðrir aktørar enn Mentamálaráðið varða av virkseminum í triðja geiranum. Her er talan um ítróttarfeløg, skótarørslur og annað frítíðarvirksemi.

### Formlig og ikki-formlig læring
### (sera stutt orðað)

**Formlig læring**
- Læringin leggur dent á evnið og tilognan av vitan
- Læring í flokshølum
- Fastsett ásett námsætlan við innihaldslýsing og førleikamálum
- Læraraleiklutir – serfrøðingur undirvísir einum, sum ikki er serfrøðingur
- Roynd – øll skulu læra tað sama
- Eftirmeting – onnur vita hvat tú hevur lært og fingið burturúr
- Læran er knýtt at onkrum stovni
- Læran er ikki so eyðsýnd í samfelagnum annars
- Læring er endamálið
- Ikki ávirkað av bakgrundini, søguni og vitanini hjá luttakarunum

**Ikki-formlig læring**
- Leggur dent á lívs-førleikar, evnini at byggja sambond, netverkan, sosialan kapital o.s.fr.
- Læring kann fara fram allastaðni
- Fjølbroytt innihald í læruni
- Ein og hvør lærir / stuðlað læring
- Einstaklingalæring
- Eingin eftirmeting – egin uppfatan av læruni
- Samstarv við lokalar felagsskapir og samfelagið
- Sjónlig í samfelagnum
- Læran er verkliga grundað og framd gjøgnum endamálið (læran er ein positiv avleiðing, men ikki endamálið í sær sjálvum)
- Ávirkað av bakgrundini, søguni og vitanini hjá tí einstaka.

Soleiðis lýsir Inaluk Brandt í stuttum munin millum formliga og ikki-formliga læring[25].

[25] Úr frágreiðingini "Inclusion of refugees through non-formal education – Nordic best practice", TemaNord 2017:552, http://norden.diva-portal.org/smash/get/diva2:1155216/FULLTEXT01.pdf



# Lívlong læring og lívlong vegleiðing

Ein aðaltáttur í einari vælvirkandi førleikamenningarskipan er lívlong vegleiðing. Lívlong vegleiðing hevur sum mál at stuðla fólki í øllum aldri og á øllum karrierustigum at menna seg starvsliga. Vegleiðarar taka sær av at upplýsa borgaran um starvsleið, at ráðgeva og vegleiða í persónligum og sosialum viðurskiftum, at meta um evni og hegni teirra og leiðbeina teimum innan útbúgving og yrki.

Dygdargóð vegleiðing eigur at vera atkomilig hjá øllum borgarum í føroyska samfelagnum, uttan mun til arbeiðsstøðu, sosialan status, uppruna, kyn og hvar í landinum, ein býr. Vegleiðingin stuðlar sosialari inklusión, tí hon tekur eisini upp spurningar, sum snúgva seg um tørv hjá fólki í serstøðu, t.d. teimum í sonevndum vandabólkum, m.a. hjá ungum borgarum, sum fara úr fólkaskúlanum, og sum hvørki hava fingið arbeiði, lærupláss ella eru farin undir eina førleikagevandi útbúgving, umframt hjá tilflytarum, sum ynskja at vera partur av arbeiðsmarknaði og taka lut í samfelagmenningini sum heild.

Vegleiðing stuðlar lívsvirðisvøkstri[26], búskaparligum vøkstri í samfelagnum og menning av arbeiðsmarknaðinum, við at sameina tørvin hjá tí einstaka borgaranum við tørvin hjá arbeiðsmarknaðinum og fyritøkum[27]. Dygdargóð vegleiðing hevur vælútbúnar vegleiðarar, sum hava felags etiskar leiðreglur og tagnarskyldu.

............

Seinastu umleið 20 árini er alsamt størri dentur lagdur á tann týdning, sum lívlong vegleiðing (stytt LLV) hevur í menningini av einum framkomnum og rættvísari samfelag. Ein høgur yrkisdugnaskapur hevur verið aðaltátturin í arbeiðinum at menna hetta slag av vegleiðing til allar borgarar (CEDEFOP, 2015). Uppskot til samtyktir og ætlanir um lívlanga vegleiðing eru gjørd við støði í mentan og umstøðum í teimum ymisku londunum, og vegleiðingartænastur eru settar í verk sambært tørvi og fíggjarligari orku, og eru so hvørt vorðnar atkomiligar hjá øllum borgarum (Vuorinen & Watts, 2012) og (Sultana & Watts, 2004).

## Skilvís grundgeving og mál fyri lívlanga vegleiðing

Í kanning frá 2006 viðvíkjandi vaksnamannaútbúgving í limalondunum í ES, har hugt varð eftir, hví fólk ikki í størri mun taka av tilboði um vaksnamannaútbúgving, varð komið fram til, at londini í størri mun eiga at kunna, stuðla og eggja íbúgvunum til at luttaka í vaksnamannaútbúgving og eftirútbúgving. Serliga var tørvur á, at gera málrættað átøk fyri at røkka teimum, sum hava havt ringar royndir og vánaligar upplivingar í skúlanum og í sambandi við útbúgving, og tískil eru endað

[26] Dalskov (2009).
[27] CEDEFOP, 2015

á einum sera lágum útbúgvingarstigi. Hetta kann t.d. gerast við at gera kunningina um útbúgvingarmøguleikar lætt atkomiliga í støðum, har nógv fólk savnast.[28] Í Føroyum merkist tørvurin á lívlangari vegleiðing eisini, og tørvur er á, at vegleiðing verður boðin út allastaðni í samfelagnum (Álit, 2007). Í seinmodernaðu tíðini, vit liva í, er rættiliga vanligt at skifta starv eina ella tvær ferðir á lívsleiðini. Útbúgvingar, arbeiðsviðurskifti og yrkismøguleikar broytast støðugt í mun til alheimsgerðina, serliga innan tøkni og búskaparlig viðurskifti. Flytfør arbeiðsmegi, umbroytiligur arbeiðsmarknaður, arbeiðsloysi, fráflyting og immigratión seta nýggj krøv til politikk innan vegleiðing, og tørvur er á at skipa professionella vegleiðing, sum kann veita borgarum haldgóða vegleiðing. Umstøður, so sum karrieruskifti, arbeiðsloysi, fólka til- og fráflyting, sjúka, skilnaður, einsemi og sorg, kunnu tykjast møtimiklar forðingar, har familjan ikki longur er før fyri at veita munagóða vegleiðing (Vuorinen & Watts, 2012). Grannalond okkara hava tí øll sett í verk ein skipaðan útbúgvingarpolitikk og LLV, og stundin er komin at skipa tilboð um LLV fyri allar borgarar í Føroyum eisini, sum kann virka fyri búskaparligum vøkstri, sosialari inklusión og minka um fráflyting (Bólkauppgáva, 2016).

## Støðan hjá vegleiðing í Føroyum

Innan útbúgvingarøkið er tørvur á at skipa vegleiðingina betur, eitt nú tá næmingar fara úr fólkaskúlanum og skulu velja yrkis- ella útbúgvingarleið. Her er tørvur á at styrkja vegleiðaraøkið, og miðað eigur at vera eftir størri gjøgnumskygni til teir møguleikar, sum tann ungi hevur fyri vali av yrkis- ella útbúgvingarleið. Innan skúlaskipanina er vegleiðingin rímiliga væl skipað og dagførd. Innan yrkisøkið eigur vegleiðingin at styrkjast, og tørvur er á betri samskipan av teimum yrkismøguleikum, sum eru í Føroyum.

Tørvur er á fleiri vegleiðarum uttan fyri skipaðu vegleiðingina á skúlunum. Borgarar, sum ikki eru í skúlaskipanini, hava ikki atgongd til vegleiðing í nevniverdan mun. Í ALS-skipanini er møguleiki hjá arbeiðsleysum at fáa vegleiðing frá “kveikjararum”, sum vegleiða og eggja tí arbeiðsleysa til ymisk sløg av førleikamenning, onkuntíð við styttri skeiðum. Hetta merkir, at borgarar, sum ætla at broyta yrkisleið, hava ikki nóg góða atgongd til holla og professionella vegleiðing.

Í einum framkomnum samfelag sum okkara kann økt gjøgnumskygni um starvs- og útbúgvingarmøguleikar og eitt styrkt vegleiðaranetverk vera við til at minka um vandan fyri, at borgarar leita burtur í onnur lond, tí teir ikki fáa eyga á teir lestrar- og starvsmøguleikar, sum eru í okkara samfelag. Kunning og vegleiðing um hesi viðurskifti kunnu vera við til at minka um vandan fyri “brain drain” og skeiklingina í lutfallinum millum kynini. Styrkt vegleiðing kann eisini virka fyri, at borgarar finna starv eftir lokna útbúgving, bæði fyri tey, sum búgva í Føroyum, og fyri tey, ið ynskja at flyta heim eftir lokna útbúgving.

Í løtuni er tað soleiðis, at skipaða vegleiðingin innan skúlaøkið verður umsitin í Mentamálaráðnum. Almannamálaráðið veitir ávísa vegleiðing til brúkarar í sosialu skipanini, og ALS veitir teimum arbeiðsleysu vegleiðing. Umráðandi er tó, at

[28] Meddelelse fra kommisionen, Voksenuddannelse: Det er aldrig for sent at lære, Kommissionen for de Europæiske Fællesskaber, 2006



politiska skipanin raðfestir lívlanga vegleiðing, so hon kann gagna samfelagnum á besta hátt í sambandi við útbúgving og førleikamenning. Lívlong vegleiðing, við kunningarátøkum, hagtalstilfari og í framtíðini eisini við gransking innan økið, skal vera við til at menna og tryggja vælferðina í okkara samfelag.

Staðfestast kann, at okkum tørvar eina yvirskipaða ætlan fyri vegleiðingarøkið í Føroyum. Ein tílík ætlan eigur at taka støði í, at borgarin er áhugaður í møguleikum fyri lívlangari læring og harvið hevur møguleika fyri lívlangari vegleiðing. Við tílíkari ætlan ber til at menna og seta í verk eina skipan við lívlangari læring, sum fevnir um borgarar í øllum aldri og á ymiskum stigum í lívinum. Ein ávegis ætlan fyri lívlanga vegleiðing í Føroyum er handað avvarðandi myndugleikum í juni 2017. Henda ætlan er gjørd sambært fyrisettum málum í Europa (Bólkauppgáva, 2016).

## Karrieruførleiki og lívlong vegleiðing í Føroyum – ein stutt lýsing

Endamálið við lívlangari vegleiðing er at hjálpa einstaklingum í øllum aldursbólkum at menna karrieruførleikar sínar. Sambært Ronald G. Sultana (2011) vísir hugtakið *karrieruførleiki* til eina rúgvu av førleikum, sum geva einstaklingum og bólkum skipaðar hættir at savna, greina, sameina og skipa seg sjálvi, og at útvega sær kunning og vitan um útbúgvingar og starv. Harumframt fevnir hugtakið um førleikar til at taka avgerðir og at seta tær í verk, umframt at evna at taka ímóti broytingum í gerandisdegnum. Hetta sama stendur eisini í allýsingini frá EU um lívlanga vegleiðing (ELGPN, 2015).

Í hesum sambandi eigur vegleiðingin í Føroyum at hjálpa hvørjum einstøkum borgara, so hann ella hon gerast før fyri:

- at varnast egin evni, førleikar og áhugamál
- at taka avgerðir viðvíkjandi útbúgving og starvsleið
- at skipa egna lívsleið, við atliti at læring, arbeiði og øðrum viðurskiftum, har vit tilogna okkum og brúka hesi evni og førleikar
- at skilja og menna seg sjálv
- at rannsaka og eftirmeta lív, læring og arbeiði
- at handfara lív, læring og arbeiði í sambandi við broytingar og umskifti á lívsleiðini.

Vegleiðingin eigur at verða skipað í 4 høvuðsøki (Sharf, 2013):

- Børn og ung, t.e. fólkaskúli, miðnám og yrkisnám, ið eru millum 7 og 18 ár
- Vaksin ung, t.e. ungdómur millum 18 og 25 ár
- Tilkomin, t.e. vaksin millum 25 og 67 ár
- Pensjónistar, t.e. tey, ið eru eldri enn 67 ár.

Grundhugsjónin í lívlangari vegleiðing er, at innan øll øki skal vegleiðingin miðsavna seg um tørv og áhugamál hjá einstaklinginum sjálvum.

Sum er, fáa næmingar í fólkaskúlanum vegleiðing, tá tey fara í 6. flokk. Sambært Super (Sharf, s. 130), er tað í aldrinum 7 til 18 ár, at vit menna okkara samleika.

Samleiki vísir í hesum sambandi til greidleika og støðufesti í sambandi við núverandi og framtíðar mál, og til støðufesti í arbeiðsumhvørvinum. At kenna sín samleika, er ein sera týdningamikil partur av tilgongdini at velja lívsleið (Andreassen, Hovdenak, & Swahn, 2008), sum hóskar til evni, førleikar og áhugamál hjá einstaklinginum. Tað er tá vit ganga í fólkaskúla, miðnámsskúla og yrkisnámi, at vit ogna okkum førleikar at velja framtíðar útbúgvingar- og starvsleið. Tí eigur útbúgvingar- og yrkisvegleiðing at verða partur av skúlagongdini longu frá 1. flokki.

Við karrieruførleikunum í huga, eigur vegleiðingin í fólkaskúlanum, í miðnámsskúlunum og í yrkisnámi at verða skipað sum karrierulæring, har næmingarnir m.a. menna kunnleika og vitan um útbúgvingarskipanir, yrkismøguleikar og arbeiðsmarknað. Endamálið er at vegleiða børnunum og teimum ungu, so at tey gerast før fyri at ávirka og vera við til at leggja sína egnu lívsleið, so at hon verður tann, tey ynskja og vilja. Vegleiðingin í fólkaskúlanum, í miðnámsskúlunum og í yrkisnámi eigur tí at fylgja hesum leisti:

- vegleiðingin er ein óheft skipan, sum skipar fyri virksemi og tilgongdum, sum læra børn og ung um útbúgvingarskipanir, arbeiðsmarknað og um tey sjálv í hesum sambandi
- vegleiðingin er uppsøkjandi, og hon veit m.a., hvussu børn og ung kunnu fyrireika seg at velja framhaldandi útbúgving, og hvussu útbúgvingarskipanir kunnu samstarva um karrierulæring
- vegleiðingin lærir børn og ung at velja og at taka avgerðir í ymiskum viðurskiftum á lívsleiðini, eitt nú tá talan er um útbúgving, starvsleið og lestrarmenning
- vegleiðingin samstarvar við foreldur, so at tey kunnu stuðla og hjálpa barninum í tilgongdini at velja og skifta frá t.d. fólkaskúla til miðnámsskúla ella yrkisnám, ella frá skúla til arbeiði ella til hægri útbúgving
- vegleiðingin verður skipað sum floksundirvísing í smærri bólkum og sum einstaklingsvegleiðing
- vegleiðingin tekur altíð støði í fortreytum og áhugamálum hjá næminginum og miðsavnar seg m.a. um at menna kunningina um møguleikar innan útbúgving og yrki, og um at eggja til nýhugsan
- vegleiðingin byggir á námsætlan, sum eigur at verða gjørd fyri fólkaskúlan, miðnámsskúlan og yrkisnám, eftir sama leisti, sum námsætlanir eru gjørdar fyri aðrar lærugreinar
- vegleiðingin brúkar hóskandi undirvísingartilfar, sum eigur at verða gjørt til hvørt floksstig
- vegleiðing fylgir etiskum leiðreglum fyri vegleiðing í Føroyum
- kunning um arbeiðsmarknað og útbúgvingarmøgleikar eigur at vera partur av vanligu undirvísingini hjá næmingnunum. Vegleiðing eigur tí eisini at skipa fyri skeiðum og øðrum tiltøkum fyri undirvísarum og øðrum starvsfólki í fólkaskúlanum, miðnámsskúlanum og í yrkisnámi.

Ein vanlig avbjóðing í krepputíðum er ungdómsarbeiðsloysi. Ungdómsarbeiðsloysi fevnir um tey 15 til 24 ára gomlu, sum velja ikki at fara beinleiðis í útbúgvin eftir



lokna fólkaskúlaútbúgving. Sambært ELGPN (2015) kann hesin bólkur gerast kostnaðarmikil fyri samfelagið, tá kreppa rakar samfelagið, tí hesi eru tey fyrstu, sum gerast arbeiðsleys, fyrst av øllum tí tey hava avmarkaðar verkligar royndir, eru sera leyst knýtt at arbeiðsmarknaðinum og hava onga útbúgving. Harumframt kann sosiali kostnaðurin eisini gerast dýrur, tí tey verða avskorin frá einum týdningamiklum parti av sosiala lívinum, tá tey ikki arbeiða, sum aftur kann ávirka sosiala trivnaðin hjá teimum tann skeiva vegin.

Vegleiðingin til hesi ungu eigur tí at vera ábyrgdarøkið hjá einum komandi arbeiðsmarknaðardepli, tí hesi fólkini eru ikki beinleiðis partur av útbúgvingarskipanini. Vegleiðingin eigur at fylgja hesum leisti:

- vegleiðingin er uppsøkjandi og virkar sum ein uppílegging og ígongdsetari, tá einstaklingar í hesum aldursbólki steðga við útbúgving ella gerast arbeiðsleysir
- vegleiðingin er ein tænasta, sum tryggjar, at einstaklingurin verður hjálptur at koma í arbeiði aftur skjótast gjørligt, ella at útbúgva seg
- vegleiðingin eigur at arbeiða fyri at skapa sambond við stovnar, sum kunnu fáa einstaklingin aftur í arbeiði ella í útbúgving. Talan er um sambond við t.d. útbúgvingarstovnar, Studna og arbeiðsmarknaðin annars
- vegleiðingin skipar fyri tiltøkum og skeiðum, sum hóska til tørvin og førleikarnar hjá einstaklinginum
- vegleiðingin veitir karrierulæring, tá tað er neyðugt (sí leistin fyri fólkaskúla, miðnámsskúla og yrkisnám).

Sum nevnt á s. 51, er samfelagið nógv broytt seinastu 20 árini. Vísandi til broytingarnar meta vit, at vegleiðingin av vaksnum og eldri borgarum eigur at fylgja hesum leisti:

- vegleiðing tekur altíð støði í førleikum og áhugamálum hjá hvørjum einstøkum borgara, sum søkir sær vegleiðing
- vegleiðingin er ikki uppsøkjandi, men hon eigur at vera ein sjónligur partur av arbeiðsmarknaðardeplinum
- vegleiðingin eigur at vera lætt atkomulig hjá øllum borgarum runt um í landinum
- vegleiðingin eigur at vera tøk skeivar tíðir á samdøgrinum, og ikki bara í vanligari arbeiðstíð. Hetta er fyri at tryggja, at allir borgarar hava eins møguleika at søkja sær vegleiðing
- vegleiðing veitir kunning um útbúgvingarmøguleikar. Kunningin fevnir um allar útbúgvingar, heilt frá grundútbúgving til eftirútbúgving
- vegleiðingin bjóðar vegleiðing í øllum viðurskiftum, sum hava við útbúgving og starvsleið at gera. Hetta kann t.d. vera í samband við broyting í starvsleiðini, broytt krøv til starvsheiti, arbeiðsloysi, trivnað á starvsstaðnum ella í útbúgvingini, og ynski um førleikamenning
- vegleiðingin bjóðar og skipar fyri uppsøkjandi bráðfeingisvegleiðing, t.d. um fyritøka fer á húsagang og starvsfólkini hava tørv á at kunna seg um

nýggjar møguleikar innan starv og útbúgving, og eisini um tey hava tørv á hjálp í skiftinum.

Tørvurin er ymiskur hjá teimum einstøku aldursbólkunum (Sharf, 2013). Sum áður nevnt, er týdningmikið, at tørvurin hjá hvørjum einstøkum borgara verður nøktaður. Fakliga vitanin og førleikarnir hjá útbúgvingar- og yrkisvegleiðarum, sum virka í Føroyum, skulu tí hóska til krøvini í vegleiðingini[29]. Við hesum í huga, eiga vegleiðarar at hava hægri útbúgving innan útbúgvingar- og yrkisvegleiðing, sum svarar til diplom- ella kandidatstig. Vegleiðarar, sum virka í Føroyum, eiga at:

- hava eina breiða og djúpa vitan um útbúgvingarskipanir, arbeiðsmarknað, førleikakrøv og møguleikar, bæði her heima og í øðrum londum
- hava yvirlit yvir upptøkukrøv, góðskrivingar og stuðulsmøguleikar
- megna at brúka ymisk ástøði, háttaløg og virknismøguleikar í vegleiðingini
- hava eina umfatandi vitan um og duga at nýta spyrji- og lurtihættir, sum hjálpa einstaklinginum at ogna sær karrieruførleikar, sum føra til, at einstaklingurin fylgir teirri lívsleið, sum hann ynskir
- hava førleika til at verja áhugamál hjá viðkvomum bólkum í samfelagnum, og virka sum kontaktpersónur og samskipari í tvørfakligum samstarvi
- skipa fyri og hava einstaklinga-, bólka- og felags-vegleiðing, og í hesum sambandi duga at skifta og kenna skiftini millum leiklutin sum serfrøðingur og hjálpari.

[29] NVL (2017), the adult educator's competences and compentence defelopment og http://uudanmark.dk/2017/10/den-professionelle-vejledning/



# Øktir møguleikar við fjarundirvísing, vegleiðing og nýtslu av t-amboðum

Kunningartøknin og tøkniliga menningin lata upp fyri nýggjum møguleikum og avbjóðingum, eisini tá talan er um útbúgving og førleikamenning, umframt tá tað snýr seg um at skipa og stýra hesum somu møguleikum.

Internetsambandið í Føroyum er ment so nógv seinastu árini, at so at siga allir føroyingar hava møguleika at heinta sær vitan og kunnleika um nær sagt allar útbúgvingar, og harvið eisini at eftirútbúgva seg á netinum. Við einari vanligari heimateldu og internetsambandi kann ein og hvør, sum vil tað, seta sína egnu útbúgving saman, uttan at verða noyddur at flyta seg úr sínum egna heimi. Bert hugflogi setur mørkini.

Sjálvandi er hetta ikki tann besta loysnin hjá øllum, ið ynskja sær eina útbúgving. Fyri at tryggja neyðugu dygdina og virðingina fyri útbúgvingini og teimum førleikum, ið hon gevur, og fyri at tryggja øllum góðar møguleikar at eftirútbúgva og førleikamenna seg, eigur okkara útbúgvingarmyndugleiki at hjálpa til, tí sum er, er tað hann, ið hevur evstu ábyrgd og eftirlit við, at útbúgvingarnar lúka tær ásettu treytirnar.

Við fjarundirvísing verður lættari hjá teimum, ið búgva í útjaðaranum ella langt frá útbúgvingarstaðnum at taka eina útbúgving, so tey ikki noyðist at flyta frá heimstaðnum. Tá tosað verður um arbeiðsmarknað og størv verður ofta tosað um at hava ein familjurættaðan arbeiðsmarknaðarpolitikk. Tískil er nærlagt, at tá tosað verður um vaksin og útbúgving, at hugsað verður um at hava ein familjurættaðan útbúgvingarpolitikk. Hesum kann fjarundirvísing gerast ein liður í, við tað at útbúgvingarmátin gerst meira liðiligur.

Ætlanin við talgildingini av undirvísingini er eisini at ganga ymisku tørvunum hjá fyritøkum og luttakarum á møti, soleiðis at vaksnamannaútbúgvingartilboð gerast óheft av tíð og stað. Men, hóast ein stórur partur av útbúgvingar- og skeiðstilboðum kunnu gerast lættari atkomilig fyri allar føroyingar á henda hátt, so er kortini greitt, at ikki øll útbúgvingar- og skeiðstilboð kunnu fremjast heilt ella partvíst talgilt.

## Fjarlestrarmøguleikar í Føroyum

Ymiskir møguleikar eru royndir við fjarlestri í Føroyum. Onkrir skúlar hava sett útgerð upp, sum gevur møguleika fyri fjarlestri. Tó hevur eingin enn bjóða henda lestrarmøguleika sum eina varandi loysn hjá teimum, ið skulu ferðast víða fyri taka eina útbúgving. Fróðskaparsetur Føroya hevur gjørt royndir við fjarlestri á m.a. Søgu- og samfelagsdeildini og á Námsvísindadeildini.

Fjarnám er ein lestrardepil hjá Klaksvíkar kommunu, sum gevur borgarunum møguleika fyri útbúgving og førleikamenning í nærumhvørvinum í Norðoyggjum.[30] Á heimasíðuni hjá Íverksetarahúsinum, sum hýsir Fjarnámi, verður m.a. sagt, at kommunan ynskir at raðfesta lesandi og bjóðar tí øllum lesandi innivist,

[30] Sí http://www.iverksetan.fo/um-iverksetarahusid/fjarnam/

umframt lestrar- og yrkisvegleiðing. Har verður sagt víðari, at hølini og útgerðin hjá Fjarnámi verða nógv brúkt á Fróðskaparsetrinum av læraralesandi, námsfrøðilesandi, umframt av fólki, sum lesa uttanlands og sum hava verið heima í styttri tíðarskeið. Frá februar 2015 er samstarvið við Fróðskaparsetrið víðkað til eisini at fevna um undirvísing í løgfrøði.

Eisini í Suðuroy er stig tikið til at skipa møguleikar fyri fjarlestri.[31] Hetta varð gjørt fyri nøkrum árum síðan, tá Vágs kommuna setti útgerð og høli til taks hjá borgarum í kommununi. Fjarlestrardepilin er ein útbúgvingardepil, sum knýtir sambond millum fjarlesandi í Suðuroynni og lestrarstað. Ein depil, sum hjálpir teimum, ið ætla undir útbúgving sum fjarlesandi, at finna útbúgvingarstað.

Fjarlestrardepilin er eitt tilboð til t.d. tey, sum ætla undir hægri útbúgving, undir hægri ískoytisútbúgving ella undir endurútbúgving og uppskúling.

## T-amboð í vegleiðingini, førleikametingini og førleikamenningini

Norðurlond hava drúgvar royndir við at menna leiðreglur og talgildar loysnir, ið stuðla undir tað útbúgvingarpolitiska arbeiðið, ið londini raðfesta. Tá talan er um vaksnamannalæring og førleikamenning hava Norðurlond gingið á odda við nýhugsan og nýmenning av loysnum, sum talgilda tøknin hevur stuðlað uppundir. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur í fleiri umførum stuðlað verkætlanum, sum hava granskað og ment uppskot til loysnir í sambandi við at nýta teldutøknina og internetið at tilrættisleggja og skipa undirvísing, læring og førleikamenning.

Dømi um slík amboð:

- www.vigo.no
- www.vilbli.no
- www.jagkan.fi
- www.ug.dk
- www.ug.dk/evejledning/
- www.minkompetencemappe.dk
- www.les.fo

Ein avbjóðing við teimum fjølbroyttu møguleikunum, sum í dag eru eyðkenni fyri talgildu tøknina, er tað stóra úrvalið av ymiskum loysnum, sum brúkarin alla tíðina skal velja ímillum. Hetta ger tað torført og møtimikið hjá avvarðandi stovnum og fyriskiparum at taka røttu avgerðina um, hvør skipan er best egnað til endamálið og best at gera íløgu í.
Tó er at siga, at hesin trupulleikin er kanska ikki so stórur í dag, tí hóast loysnirnar kunnu síggja ymiskar út, so verða flestallar talgildar skipanir og talgild amboð ment soleiðis, at tey kunnu samkoyra og samskifta sínámillum og verða ment og útbygd eftir tørvi.

[31] Sí http://www.fjarlestur.fo/



Hóast kunningar- og samskiftistøknin kann vera ein stór hjálp í arbeiðinum at seta á stovn skipaða vaksnamannalæring og at menna og styrkja lívlanga læring og vegleiðing í Føroyum, so loysir hon ikki allar trupulleikarnar. Vit hava við menniskju at gera, og tí er alneyðugt, at tað eru menniskju, við teimum røttu førleikunum, sum eru drívmegin í skipanini. Talgildu skipanirnar kunnu ikki loysa allar uppgávurnar einsamallar. Tað verður altíð neyðugt at hava vegleiðarar, ráðgevarar og onnur fakfólk knýtt at skipanunum, um tær skulu virka eftir ætlan.

# Trípartasamstarv og arbeiðsmarknaðardepil

Ein partur av ætlanini um at fara undir skipaða vaksnamannaútbúgving í Føroyum, er eisini ætlanin um, at skipa vaksnamannaútbúgvingarøkið í eitt samstarv millum avvarðandi partar á arbeiðsmarknaðinum, eitt sokallað trípartasamstarv millum tað almenna, vinnulívið og fakfeløgini.

Til hetta krevst sum eitt tað fyrsta ein væl skipað vegleiðing, sum hevur orku og førleikar at vegleiða øllum vaksnum borgarum, á øllum lívsleiðarstigum, ið ynskja og hava tørv á førleikamenning í breiðastu merking.

Í Norðurlondum er siðvenja at hava trípartasamstarv á arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum. Trípartasamstarv snýr seg samanumtikið um, at luttakarnir í størri mun kunnu virka fyri einum felags máli og soleiðis fáa størri ognarlut og ávirkan á økjum, sum viðkoma teimum. Partarnir sita inni við týdningarmiklari vitan um arbeiðsmarknaðin, og politiska valdið kann fáa stuðul til at gera tiltrongdar nýskipanir. Tá nýskipanir skulu setast í verk á arbeiðsmarknaðinum, er nógv, ið talar fyri, at teir partar, sum vera beinleiðis ávirkaðir av broytingunum, luttaka á jøvnum føti í tilgongdini, tá ið avgerðir skulu takast. Fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum snýr trípartasamstarv seg millum annað um at fáa ávirkan á politikkin og at fáa fíggjað ymisk tiltøk, samstundis sum trípartasamstarv eisini kann byrgja fyri ósemjum og eftirfylgjandi tiltøkum. Harumframt gevur tað pørtunum eina ávísa tign, um teir kunnu vísa, at teir eru sinnaðir at átaka sær ábyrgd við at lyfta samfelagsuppgávur saman.

Trípartasamstørv finnast í Føroyum í dag, hóast einki yvirskipað trípartasamstarv er á arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum. Trípartasamstørv eru eitt nú í stýrinum fyri ALS og í Yrkisútbúgvingarráðnum. Tíðin er komin at fáa ment hetta samstarv, so at allar tær tænastur, sum eru beinleiðis knýttar at arbeiðsmarknaðinum, verða skipaðar og samskipaðar meira skynsamt og effektivt.

Ein arbeiðsmarknaðardepil kann fáast at virka sum eitt stað, har arbeiðsgevarafeløg, løntakarafeløg og politisku myndugleikarnir savnast í eitt skipað og konstruktivt samstarv, og arbeiðsmarknaðurin verður av tí sama betur førur fyri at skipa nútíðar tørvin á broytingum og tillagingum. Samstarvið kann sostatt gerast drívkraftin fyri nýskipanum á arbeiðsmarknaðinum. Eitt samskipað trípartasamstarv sum hetta eigur ikki at verða miðsavnað í einum stað í landinum, men hava deildir á støðum kring alt landið, eitt nú í tøttum samstarvi við kommunurnar í økjunum.

Ein arbeiðsmarknaðardepil kann samskipa verandi og komandi skipanir á arbeiðsmarknaðinum, so sum ALS, barsilsskipan, Fasta Gerðarrættin, Samhaldsfasta, Frítíðargrunnin og Trygdargrunnin fyri lønir og avreiðingar. Harumframt kann ein førleikamenningargrunnur verið umsitin í einum arbeiðsmarknaðardepli sum hesum, samstundis sum ein vælvirkandi karrieruvegleiðaratænasta átti at verið skipað í deplinum. Hvørjar skipanir annars eiga at verða samskipaðar í arbeiðsmarknaðardepilinum, eiga partarnir á arbeiðsmarknaðinum at koma ásamt um saman við avvarðandi myndugleika.



Eitt trípartasamstarv um at skipa og menna allar tær týdningarmestu tænasturnar á arbeiðsmarknaðinum kundi eisini fevnt um eitt arbeiðsmarknaðarráð, ið stóð fyri evstu ábyrgdini av samstarvinum, og hevði umfatandi innlit í øll arbeiðsmarknaðarviðurskifti.

Samferðslumálaráðið, sum varðar av arbeiðsmarknaðarmálum, og í tí sambandi eisini arbeiðsloysisskipanini, hevur orðað uppskot um, hvussu ein arbeiðsmarknaðardepil hóskandi kundi verið skipaður í samstarvi við ALS, við lívlangari læring og vaksnamannaútbúgving í huga. Uppskotið hevur verið umrøtt í stýrinum fyri ALS, sum framvegis heldur, at tørvur er á at skipa ein arbeiðsmarknaðardepil, sum verður kjølfestur sum eitt amboð hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at samskipa tær ymisku uppgávurnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum, sum partarnir og politiska skipanin hava sett á stovn. Stýrið fyri ALS setur seg ikki ímóti, at lívlong læra verður ein uppgáva, sum ein arbeiðsmarknaðardepil skal taka sær av. Hinvegin tekur stýrið ikki undir við, at lívlanga læran skal fíggjast við parti av ALS-gjaldinum, soleiðis sum skotið verður upp, sum ein av fleiri møguleikum.

Í Føroyum hava vit tann fyrimun, í mun til onnur lond, at vit hava ikki fleiri ymiskar A-kassar og arbeiðsávísingar, tí her koma øll, ið gerast arbeiðsleys og harvið tøk á arbeiðmarknaðinum, í ta einu og somu skipanina, nevniliga ALS. Hetta eigur at gera tað munandi lættari at leiðbeina arbeiðstøkum víðari at førleikamenna seg ella fáa sær útbúgving, um lítil ella eingi útlit eru fyri einum arbeiði ella starvi í bræði.

Mælt verður til, at politiski myndugleikin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ein arbeiðsmarknaðardepil. Støða eigur m.a. at takast til endamálið við einum arbeiðsmarknaðardepli, hvat innihaldið í virkseminum skal vera, hvussu bygnaðurin skal síggja út, og hvussu karmarnir annars skulu skipast. Harumframt skal arbeiðsbólkurin gera uppskot um, hvussu virksemið, eitt nú í sambandi við lívlanga vegleiðing og arbeiðsmarknaðarútbúgvingar, kann verða fíggjað, umframt at koma við einum uppskoti um, hvussu fíggjarligu umstøðurnar hjá vaksnum at fara í útbúgving ella læru kunnu verða skipaðar við støði í arbeiðinum og uppgávuni hjá einum møguligum arbeiðsmarknaðardepli og einum møguligum førleikamenningargrunni.



# Tilmæli 1 • Lógarkarmar um vaksnamannaútbúgvingar

**Vaksnamannaútbúgving og førleikamenning verður raðfest politiskt og skipað við lóg**

Týdningarmikið er at skipa vaksnamannaútbúgvingarøkið í trygga og støðuga legu. Hetta verður best gjørt við at skipa økið við lóg. Lógin skal nágreina, hvat vaksnamannaútbúgving er og fevnir um

- lýsa, hvat endamálið við vaksnamannaútbúgving og førleikamenning er
- fevna um viðurskifti, sum hava við hetta slag av útbúgvingum at gera, eitt nú lívlong vegleiðing, yrkisvegleiðing og førleikameting
- lýsa eina samskipan av teimum ymisku tilboðunum, ið kunnu standa vaksnum í boði í sambandi við útbúgving, eftirútbúgving og førleikamenning
- yvirskipað nágreina og allýsa tey ymisku útbúgvingartilboðini, ið ein vaksnamannaútbúgvingarskipan eigur at fevna um
- yvirskipað nágreina og allýsa málbólkin, ið skal vera fevndur av skipanini
- tryggja tað fíggjarliga grundarlagið undir einari vælvirkandi vaksnamanna- og arbeiðsmarknaðarútbúgvingarskipan, t.d. við einum førleikamenningargrunni, ið eitt nú kundi verið fíggjaður eftir sama leisti, ið vit kenna frá øðrum stuðuls- og trygdarskipanum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, har tað almenna, einstaki borgarin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum lyfta í felag.

**Frágreiðing**

Í grannalondum okkara eru skipanir, sum eru ætlaðar at lætta um hjá tilkomnum at fáa sær útbúgving. Saman við serstøkum skipanum fyri tey við skerdum førleikum, hava hesar skipanir virkað fyri einum støðufastari arbeiðsmarknaði og tryggari arbeiðskorum hjá landsins borgarum.

Í Føroyum eru ongar serstakar skipanir, ið lætta um og gera tað høgligari hjá vaksnum fólki at fáa sær útbúgving. Av hesum ávum eru nógv vaksin, sum aftra seg við at fara undir eina útbúgving. Serliga er tað fíggjarligi spurningurin, sum er avgerandi, tá tilkomnir persónar umhugsa møguleikan at fáa sær útbúgving. Tí skal ein lóg um vaksnamannaútbúgving nágreina, hvørjar fíggjarligar serskipanir skulu galda fyri vaksin, sum fara í útbúgving.

Endamálið við einari lóg um vaksnamannaútbúgvingar er at skipa vaksnamannaútbúgvingar, eftirútbúgving, arbeiðsmarknaðarútbúgvingar og førleikamenning í tryggar og støðugar karmar, ið skulu gera tað høgligari hjá vaksnum at taka eina útbúgving, umframt at økja um áhugan hjá teimum at útbúgva seg og hjá vinnuni at førleikamenna síni starvsfólk, samsvarandi tørvinum hjá vinnuni.

Vaksnamannaútbúgvingar og eftirútbúgving snúgva seg í stóran mun um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar. Umráðandi er at geva øllum vaksnum møguleika at menna sínar førleikar, so tey kunnu taka virknan lut í samfelagsmenningini.

Endamálið við lógini er tí eisini at betra møguleikarnar hjá vinnuni at útvega sær økta vitan og dagførdar førleikar hjá starvsfólki.

Lógin skal harumframt veita einstaklingum, sum hava skerdar møguleikar at læra ella arbeiða, eftirútbúgving ella førleikamenning, har atlit verður tikið til teirra førleikar og umstøður annars.

Førleikameting er ein eyðsæddur liður í útbúgvingartilgongdini hjá vaksnum og er við til at gera tað høgligari hjá vaksnum at taka eina útbúgving. Lógin um førleikameting er tískil eitt stig á leiðini at geva vaksnum betri umstøður at førleikamenna seg. Endamálið við førleikametingini er, at persónar, ið eru fyltir 25 ár, fáa viðurkendar teir førleikar og tær royndir, sum teir hava útvegað sær á síni lívsleið, í skúla, í arbeiði og í frítíðini, so at tað gerst lættari hjá teimum at fara undir útbúgving og fullfíggja hana. Næsta stig á leiðini er at tryggja teimum vaksnu, sum ynskja at fara í útbúgving, og virkjum, ið skulu førleikamenna síni starvsfólk, eitt skipað útbúgvingartilboð og fíggjarligt grundarlag, sum skal gera tað áhugavert og møguligt hjá vaksnum at fáa sær útbúgving.



# Tilmæli 2 • Eitt samskipað førleikamenningarsamstarv

**Ein førleikasamskipan ella eitt førleikasamstarv, sum skal samskipa vegleiðing, førleikameting og førleikamenning, umframt at ráðgeva í málum, sum hava týdning fyri alt vaksnamannaútbúgvingarøkið og lívlanga læring sum heild, verður skipað**

- Samskipanin/samstarvið skal samskipa førleikameting, førleikamenning, vegleiðingina, umframt fjarundirvísingina.
- Samskipanin skal vera samskipandi liður millum yrki og fak á arbeiðsmarknaðinum, útbúgvingarstovnar og aðrar viðkomandi stovnar og virkir, umframt kommunurnar, ið veita sínum borgarum tænastur á staðnum, so sum bókasøvn, fjarlestrardeplar, ráðgeving og kunning til tilflytarar og aðrar kunningarstovnar. Samskipanin skal veita hesum stovnum kunning, ráð og vegleiðing, tá talan er um at førleikamenna einstaka borgaran.
- Harumframt skal skipanin fevna um kunning, ráðgeving og innsavning av útbúgvingarhagtølum, sum kunnu stuðla undir gransking og menning á útbúgvingarøkinum.
- Samskipanin skal fyriskipa førleikamennandi útbúgvingar.
- Samskipanin skal savna vitan og hava yvirlit yvir førleikarnar á arbeiðsmarknaðinum, millum annað skipa fyri kortlegging av førleikum. Ein kortlegging av førleikum og vantandi førleikum á arbeiðsmarknaðinum skal gera tað lættari at skipa viðkomandi útbúgvingar- og skeiðstilboð. Samskipanin skal harumframt útvega førleikar og vitan at seta saman og greina førleikatørvin í samfelagnum og hjá vinnuni.
- Ein møguleiki er at skipa eina slíka "samskipan" saman við ALS og øðrum viðkomandi tænastum og stovnum í ein arbeiðsmarknaðarútbúgvingardepil, har tann íslendski stovnurin Fræðslumiðstøð Atvinnulífsins kundi verið brúktur sum fyrimynd.

**Frágreiðing**

Ein samskipan av førleikamenningini fer at verða gagnlig á øllum økjum í samfelagnum. Við at samskipa møguleikarnar fyri vaksnamannaútbúgving og lívlangari læru og vegleiðing, verða tey førleikamenningartilboð og –møguleikar, sum vit longu hava, nógv sjónligari. Ein samskipan av slíkum tilboðum til borgaran fer eisini at vera ein hjálp hjá teimum, ið leita eftir nýggjum starvsmøguleikum, eitt nú í sambandi við arbeiðsloysi ella aðrar broytingar í lívsviðurskiftunum, so sum av skaða, sjúku ella øðrum.

Førleikamenningin sjálv verður framd á útbúgvingarstovnunum. Tað samskipandi arbeiðið viðvíkjandi førleikamenning fer fram í "samskipanini". Avvarðandi útbúgvingarstovnar, skeiðsdeplar og stovnar, ið bjóða førleikamenning, eftirútbúgving, arbeiðsmarknaðarskeð o.s.fr., standa fyri at gera skeiðslýsingar og hava ábyrgdina av teirri fakligu metingini. Mannagongdir viðvíkjandi sjálvari førleika-

metingini verða gjørdar í samskipanini. Við at savna tað samskipandi virksemið við vegleiðing og førleikameting á einum stað, og at lata avvarðandi útbúgvingarstovnar standa fyri sjálvari førleikamenningini, fer at hava við sær, at verandi førleikar og vitan úti á útbúgvingarstovnunum verða gagnnýtt betur.

Fyri at kenna framtíðar tørvin á førleikum á arbeiðsmarknaðinum, gerst neyðugt at halda vakið eyga við førleikagongdini á arbeiðsmarknaðinum. Hetta eigur at verða gjørt fyri at bøta um møguleikarnar at fáa sett røttu førleikarnar rættstundis á røttum stað, og fyri at sleppa undan fløskuhálsum.

Eitt miðsavnandi samstarv um arbeiðsmarknaðaútbúgvingar og –viðurskifti sum heild letur upp møguleikar fyri dygdargóðum lýsingum og greiningum av einum møguligum framtíðar tørvi á førleikum, ið arbeiðsmarknaðurin spyr eftir. Savnaðar dátur um arbeiðmarknaðarviðurskifti eru við til at skapa nýggja vitan á hesum øki, sum síðan kann verða nýtt í strembanini eftir at førleikamenna tey við ongari ella lítlari útbúgving, umframt arbeiðsleys og tey, ið eru hótt av arbeiðsloysi. Tørvur er á nýtiligum hagtølum viðvíkjandi føroyskum arbeiðsmarknaðar- og útbúgvingarviðurskiftum. At savna týdningarmiklar dátur og upplýsingar um arbeiðsmarknaðarviðurskifti og førleikamenning fer at geva okkum betri møguleikar at granska innan hetta øki. Eisini fer hetta við tíðini at gera okkum betur før fyri at taka røttu avgerðirnar í sambandi við val av útbúgvingum og skipan av førleikamenning sum heild.

Somuleiðis verður lívlong vegleiðing skipað og ment í samskipanini, sum eisini tekur sær av at skamskipa og menna fjarundirvísingina innan vaksnamanna-útbúgvingarøkið.

Ein tílík eftirútbúgvingarmiðstøð við allari viðkomandi vitan, virksemi og tilfeingi, kundi virkað í tøttum samstarvi við ein møguligan arbeiðsmarknaðardepil ella ALS, sum liggur inni við nógvari servitan innan hetta øki.



# Tilmæli 3 • Trípartasamstarv um arbeiðsmarknaðardepil

**Samstarvið um vaksnamannaútbúgving og førleikamenning millum tað almenna og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, verður styrkt og ment við einari heildarætlan um førleikar í samfelagnum**

- Trípartasamstarv um møguligan arbeiðsmarknaðardepil
- Yvirskipaðar ætlanir verða gjørdar fyri vaksnamannaútbúgvingarøkið
- Førleikamenning innan vinnur í vøkstri og økir í landinum
- Almennur førleikapolitikkur verður orðaður
- Lívlong vegleiðing verður skipað

**Frágreiðing**

Tørvur er á at gera yvirskipaðar ætlanir fyri útbúgvingarøkið og at orða ein almennan førleikapolitikk, sum er eyðkendur av heildarhugsan og samskapan millum tey avvarðandi økini í samfelagnum. Skal hetta eydnast, er umráðandi, at hetta verður gjørt í einum væl grundfestum samstarvi millum teir avvarðandi partarnar, sum eru tað almenna, vinnan og fakfeløgini. Samstarv millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum gevur teimum størri tilvit um egna ábyrgd og ávirkan á viðurskifti, sum allir partarnir hava ognarlut í, t.e. vitan um arbeiðsmarknaðin og tørvin á førleikum á arbeiðsmarknaðinum. Við einum slíkum samstarvi verður møguligt at orða visiónir og gera langtíðaravtalur um viðurskifti, ið viðvíkja arbeiðsmarknaðinum. Fyri at allir partarnar á arbeiðsmarknaðinum skulu hava avgerðarrætt í arbeiðsmarknaðarspurningum, hevur tað týdning, at eitt javnsett og gjøgnumskygt samstarv verður skipað, har partarnir við millumbilum kunnu seta fram ynski um ymiskt, sum krevur at verða gjørt á teimum ymsu geirunum í samfelagnum, og at allir partarnir hava javnbjóðis støðu og tign í samstarvinum. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu m.a. í felag orða visiónir og yvirskipaðar ætlanir fyri vaksnamannaútbúgvingarøkið, sum eisini fevnir um lívlanga læring og lívlanga vegleiðing.

Fyri at samantvinna tørvin á førleikum við visiónina um at so nógv vaksin sum gjørligt kunnu fáa prógv uppá sínar førleikar, skal í mest møguligan mun verða førleikamett og førleikament innan økir, har trot er á arbeiðsmegi, ella har tað kann væntast fara at verða trot á arbeiðsmegi, umframt innan vinnur og tænastur, sum eru í vøkstri, eitt nú innan heilsurøktina, umsorganina og ferðavinnuna.

Somuleiðis er ynskiligt, at lívlong læring verður skipað, so at hon gerst ein natúrligur partur av arbeiðslívinum. Hetta krevur, at læring, førleikar og útbúgving verður hugsað øðrvísi enn áður. Førleikar er ikki nakað, ein er liðugur við at tilogna sær, eftir at tann formliga útbúgvingin er lokin, men er nakað, ein áhaldandi skal tilogna sær í arbeiðslívinum, við ymiskum formum fyri eftirútbúgving og skeiðum. Hetta er ein tilgongd, sum krevur tætt samstarv og samráðingar millum partarnar á arbeiðsmarkaðinum.

Trípartasamstarv um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar eigur at verða skipað í einari heildarætlan fyri hetta slag av útbúgvingum, eitt nú við einum møguligum førleikamenningargrunni, sum skal fíggja tey neyðugu átøkini. Trípartasamstarvið kundi eitt nú verið skipað í einum arbeiðsmarknaðarráði, sum eisini kann varða av øðrum tænastum og skipanum, sum eru knýttar at arbeiðsmarknaðinum, so sum ALS, Samhaldsfasta, Barsilsskipanini, Fasta Gerðarrætti, Frítíðargrunninum, Trygdargrunninum, Semingstovninum, Javnstøðunevndini o.s.fr.

Á útbúgvingarliga økinum er uppgávan hjá arbeiðsmarknaðarráðnum m.a. at orða uppskot til ein almennan førleikapolitikk, og at leggja framtíðarætlan fyri førleikamenningargrunnin, harímillum at raðfesta útbúgvingar og førleikar samsvarandi tørvinum á førleikum í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum.

Mælt verður til, at ein førleikamenningargrunnur verður settur á stovn, hvørs aðalmál skal vera at fíggja kostnaðin av einari heildarskipaðari vaksnamannaútbúgvingarskipan, sum eisini fevnir um eftirútbúgving og førleikamenning av arbeiðsfjøldini. Við støði í einum heildarsjónarmiði um langtíðarætlan fyri alt yrkis- og arbeiðsmarknaðarútbúgvingarøkið, verður harumframt mælt til, at endurgjaldið, sum læruplássini fáa fyri lønarútgjald til lærlingar, meðan teir eru í skúla, verður veitt úr førleikamenningargrunninum og umsitið av arbeiðsmarknaðarráðnum.

Mælt verður til, at politiski myndugleikin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum seta arbeiðsbólk at gera uppskot til ein arbeiðsmarknaðardepil, ið skal vera kjølfestur sum eitt amboð hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum at samskipa tær ymisku uppgávurnar á arbeiðsmarknaðinum, sum partarnir og politiska skipanin seta á stovn. Støða eigur at takast til, hvat endamálið við einum arbeiðsmarknaðardepli skal vera, hvat innihaldið í virkseminum skal vera, hvussu bygnaðurin skal síggja út, og hvussu karmarnir annars skulu skipast. Harumframt skal arbeiðsbólkurin gera uppskot um, hvussu virksemið, eitt nú í sambandi við lívlanga vegleiðing og arbeiðsmarknaðarútbúgvingar, kann verða fíggjað, umframt at koma við einum uppskoti um, hvussu fíggjarligu umstøðurnar hjá vaksnum at fara í útbúgving ella læru kunnu verða skipaðar.



# Tilmæli 4 • Útbúgving og førleikamenning til øll

**Fjølbroyttir og høgligir útbúgvingarmøguleikar skulu standa øllum vaksnum í boði**

- Førleikameting
- Fjølbroyttir og lagaligir útbúgvingarmøguleikar til vaksin
- Styrktir møguleikar við fjarundirvísing
- Fullfíggjaðar útbúgvingar
- Tillagaðar og dagførdar útbúgvingar
- Málrættað skeiðstilboð
- Førleikamenning og lívlong læring
- Lívsleiðarvegleiðing ella karrieruvegleiðing alt lívið
- Fíggjarligar umstøður at taka útbúgving

**Frágreiðing**

Førleikameting er ein týðandi táttur í allari førleikamenning. Førleikametingin skal gera tað høgligari hjá einum vaksnum persóni at fara undir eina útbúgving ella at verða førleikamentur eftir ynski og tørvi. Við førleikameting og hollari vegleiðing fer at bera til at leggja eina útbúgvingarætlan til rættis, sum er málrættað og ætlað tí førleikametta. Eisini fer at bera til at stytta útbúgvingartíðina munandi. Ein vaksin persónur við drúgvum arbeiðsroyndum og øðrum viðkomandi royndum skal kunna søkja um at verða førleikamettur við ávísari førleikamenning ella útbúgving fyri eygað.

Málbólkurin sum er fevndur av vaksnamannaútbúgvingarskipanini, eigur at verða førleikamettur, tá farið verður undir eina útbúgvingartilgongd, um viðkomandi lýkur treytirnar fyri hesum.

Endamálið við førleikametingini er at staðfesta og skjalfesta førleikar hjá vaksnum persónum, ið eru fingnir til vega í skúlaskipanini, uttan fyri skúlagátt, í arbeiði og í frítíðarvirksemi annars. Her er talan um formliga, óformliga og ikki-formliga læring[32]. Síðan verða hesir førleikar mettir og viðurkendir av fakfólki, og eru teir viðkomandi fyri ávísu útbúgvingina, so kann útbúgvingartíðin verða stytt hareftir.

Ein skipað vaksnamannaútbúgving hevur sum aðalmál at geva vaksnum og tilkomnum fólki betri møguleikar at førleikamenna seg. Somuleiðis skal skipanin duga at taka atlit til tørvin á førleikum, sum vinnulív og arbeiðsmarknaður spyrja eftir. Tað merkir, at skipanin skal røkja áhugamálini hjá øllum pørtum á arbeiðsmarknaðinum og samfelagnum sum heild.

Møguleikin at skipa vaksnamannautbúgvingarnar á fjølbroyttan og lagaligan hátt, loysir nógvar av trupulleikunum hjá vaksnum, sum skulu í útbúgving, trupulleikar, sum eisini eru av samskipanarligum slag. At skipa undirvísingina

[32] Formal learning sipar til tað, ið verður lært innan skúlagátt (útbúgvingar), non-formal learning er tað, ein lærir í gerandisdegnum av viðkomandi royndum, og informal learning er tað, ið verður lært t.d. á skeiðum, ið ikki eru beinleiðis førleikagevandi.

fjølbroytt og lagaliga, merkir bæði at kunna "kroysta" undirvísingina, so at hon varir eitt styttri tíðarskeið, so at longdin á útbúgvingini ávirkar gerandisdagin hjá viðkomandi minst møguligt, umframt at gera tað møguligt hjá hesum málbólkum at kunna taka útbúgvingina, skeiðið ella partar av útbúgvingini sum t.d. fjarlestur, í tann mun hetta er gjørligt.

Stig mugu takast til at laga vaksnamannaútbúgvingarnar so, at tær hóska til umstøður og viðurskifti hjá vaksnum í nógv størri mun. Vaksin eiga at hava møguleika at arbeiða niðursetta tíð, meðan tey taka eina útbúgving ella førleikamenna seg. Harumframt eigur tað at vera møguligt at taka eina útbúgving í stigum, tá tað fíggjarliga táttar í. Vaksin, sum fara í útbúgving, mugu hava fíggjarligar umstøður at fara burtur frá arbeiði ella hava munandi niðursetta arbeiðstíð, meðan útbúgvingin verður tikin. Tá verður tað eisini lættari at sannføra tey vaksnu um at taka eina útbúgving ella at førleikamenna seg. Hetta fer at seta nýggj og fleiri krøv til útbúgvingarstovnarnar, tá útbúgvingarnar skulu skipast og leggjast til rættis.

Ein vaksnamannaútbúgvingarskipan verður í mest møguligan mun knýtt at verandi útbúgvingarskipan, t.e. verandi útbúgvingarstovnum, skúlum, læruplássum, frítíðarundirvísingini o.s.fr., umframt at víðkaðir møguleikar fyri førleikamenning verða lagdir afturat. Eitt nú kann talan vera um, at skipanin letur upp fyri meira málrættaðum skeiðs- og førleikamenningarmøguleikum, sum avvarðandi stovnar, skúlar og góðkendir skeiðshaldarar kunnu bjóða einstaklingum, arbeiðsplássum og bólkum annars.

Vaksnamannaútbúgving og lívlong læring eru nær skyldir tættir í útbúgvingarskipanini. Almenna og formliga útbúgvingarskipanin fer í framtíðini í nógv størri mun at viðurkenna læring, sum fer fram uttan fyri skúlans øki, bæði læring á arbeiðsplássinum, læring í frítíðini og læring av óformligum slag yvirhøvur.

Alt hetta setir nýggj krøv til teirra, sum skulu skipa fyri og bjóða útbúgvingar og førleikamennandi skeið í framtíðini, samstundis sum hetta setir krøv til teirra við drúgvum lívsroyndum, ið ætla sær at fara undir eina útbúgving.

Ein máti at lætta um og fáa greiði á, hvussu hesir mongu og fjølbroyttu útbúgvingarmøguleikar skulu skipast í framtíðini, er at fáa dugnaligar vegleiðarar, sum kenna bæði útbúgvingarskipan og arbeiðsmarknað væl og virðiliga, at leggja lag á og greiða frá møguleikunum, tá ynski og tørvir gera vart við seg. Tí skal lívlong vegleiðing skipast, ið tekur sær av at vegleiða einstaka borgaran alla lívsleið hansara.



# Tilmæli 5 • Málbólkurin

**Øll vaksin 25 ár og eldri, sum hava tørv á útbúgving, eftirútbúgving ella førleikamenning, skulu vera fevnd av skipanini**

Ein vaksnamannaútbúgvingarskipan er fyrst og fremst ætlað teimum, sum ikki at hava útbúgving ella nøktandi førleikar, og sum tí ikki hava eitt nóg trygt tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Harumframt eigur skipanin at fevna um eftirútbúgving og førleikamenning.

- Fyrst og fremst fevnir vaksnamannaútbúgving um tey, sum ikki hava grundleggjandi útbúgving og førleikar, so sum fólkaskúla, miðnám ella eina yrkisútbúgving.
- Skipanin skal eisini fevna um tey, sum hava eitt ótrygt tilknýti til arbeiðsmarknaðin og eru hótt av arbeiðsloysi og starvast innan hóttar starvsgreinar.
- Harumframt fevnir vaksnamannaútbúgving um eftir- og framhaldsútbúgving, soleiðis at tey, sum starvast á føroyska arbeiðsmarknaðinum kunnu verða eftirútbúgvin og førleikament eftir ynski og tørvi.

**Frágreiðing**

Fyri at svara spurninginum, hevur arbeiðsbólkurin hugt eftir, hvør er í hesum málbólkinum í grannalondum okkara. Eisini hevur arbeiðsbólkurin tikið við í sínar metingar tað, sum stendur í lógini um førleikameting frá 2014, har aldursmarkið fyri at verða førleikamett er 25 ár.

Eitt av endamálunum við vaksnamannaútbúgving er at fyribyrgja troti á viðkomandi arbeiðsmegi, umframt at stuðla uppundir, at arbeiðsstyrkin hevur teir røttu førleikarnar. Ein vaksnamannaútbúgvingarskipan eigur eisini at fevna um tey, sum á einhvønn hátt hava torført við at fáa nýtt sínar førleikar á arbeiðsmarknaðinum, eitt nú orsakað av at førleikarnir hjá viðkomandi ikki longur eru eftirspurdir, ella at samsvar ikki er ímillum tørvin á ávísum førleikum og talið á teimum, sum hava hesar útbúgvingarligu førleikarnar. Uppskotið við at seta á stovn eitt førleikamenningarsamstarv við arbeiðsmarknaðargransking, og eittt arbeiðsmarknaðarráð er eisini við tí fyri eyga, at fáa mett um hvørjar førleikar arbeiðsmarknaðurin hevur tørv á, og soleiðis vera við til at tryggja, at persónar, sum møguliga hava tørv á stuðli úr einum førleikamenningargrunni til at umskúla seg, fáa tilognað sær relevantar førleikar sum gevur teimum størri møguleika at fáa eitt starv eftir førleikamenningina.

Mett verður, at førleikamenningarsamstarvið í samstarvi við avvarðandi stovnar sum eitt nú ALS, skal gera eina meting av, hvørjir førleikar eru viðkomandi fyri tann sum skal undir eina førleikamenning við stuðuli úr einum førleikamenningargrunni. Av tí at arbeiðsmarknaðurin broytist allatíðina, er tað altíð ein meting út frá tí aktuellu støðuni á arbeiðsmarknaðinum, hvussu peningur verður játtaður til umskúling og førleikamenning.

Ein annar málbólkur, sum skipanin skal fevna um, eru tilflytarar, sum í serligan mun kenna forðingar í mun til at kunna brúka sína útbúgving og sínar førleikar.



# Tilmæli 6 • Tilflytarar og bólkar í serstøðu

**Tiltøk at tryggja tilflytarum og bólkum í serstøðu javnbjóðis og betri møguleikar at vera virknir borgarar á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum sum heild, verða sett í verk**

- Virkað verður framhaldandi fyri, at tilflytar fáa betri møguleikar og umstøður at læra seg føroyska málið, og tað føroyska samfelagið sum heild betur at kenna
- Seta í verk menning og gerð av undirvísingartilfari, ætlað tilflytarum
- Farið verður undir at fyrireika ein føroyskan NQF.[33]
- Stuðla førleikamennandi átøkum fyri tey, sum hava avmarkaðar førleikar í føroyskum, og gera undirvísingartilfar, ið serliga vendir sær til hesar málbólkar
- Talgilt undirvísingartilfar og –miðlar verða útvegaðir til teirra, sum við fyrimuni kundu gjørt nýtslu av fjarundirvísing.
- Mælt verður til framhaldandi at menna átøk fyri lesi/skriviveik.
- Skipa serliga karrieruvegleiðing fyri tilflytarar og tey, sum ikki hava nóg gott og tilvitað tilknýti til grundleggjandi samfelagstilboð, so sum útbúgvingar, heilsutænastur, stuðulsveitingar o.s.fr.

**Frágreiðing**

Tað er av stórum týdningi, at útbúgvingarlig átøk verða gjørd í mun til tilflytarar, sum koma til Føroya at búgva. Serliga viðkomandi er hetta, tá ið vit hyggja eftir gongdini seinastu árini, har alt fleiri tilflytarar koma til landi og festa búgv her. Hóast ein stórur partur av tilflytarunum í Føroyum eru væl fyri, hevur tað týdning at menna tey átøk sum krevjast, fyri at tilflytarar fáa tilognað sær føroyskt mál og mentan so høgliga sum gjørligt, og við atliti til teirra lívsumstøður, arbeiði, familju o.s.fr.

Í mun til integratión á arbeiðsmarknaðinum, er tað ein forðing, at Føroyar hava onga sokallaða tjóðardygdarskipan, hvat útbúgvingum viðvíkur – stytt NQF (National Qualification Framework). Um vit ynskja at verða partur av millumlanda viðurkenning av útbúgvingum krevst, at vit hava gjørt okkara NQF.

Integratión av tilflytarum á arbeiðsmarknaðinum er ein samansett avbjóðing, sum m.a. krevur ítøkilig átøk á útbúgvingarliga økinum, eitt nú tá mál og mentan skulu lærast.

Fróðskaparsetrið hevur t.d. skipað fyri skeiði fyri lærarar, sum undirvísa í føroyskum sum fremmandamáli. Skeiðið lærir m.a. undirvísarar at taka atlit til tey, hvørs móðurmál er sera ólíkt tí føroyska, og sum hava eina heilt øðrvísi mentanarliga bakgrund. Tí er sera umráðandi at dentur verður lagdur á sjálva góðskuna í undirvísingini, sum boðin verður tilflytarum, og at undirvísingin verður lagað eftir tørvinum hjá teimum, sum undirvísing er ætlað til.

[33] NQF stendur fyri National Qualification Framework, ið byggir á evropeiska standardin av sama heiti: EQF.

Tørvur er á føroyskum undirvísingartilfari til nevnda málbólk, serliga tá talan er um føroyskt mál og mentan. Sum støðan er í dag, er 85% (kelda) av undirvísingartilfarinum á miðnámi á donskum. Eisini í mun til hóskandi undirvísingarmøguleikar hjá tilflytarum, er vert at umhugsa møguleikan at gera talgilt undirvísingartilfar.



# Tilmæli 7 • Lívlong vegleiðing verður skipað

**Lívlong vegleiðing verður sett í verk sum eitt yvirskipað tilboð til allar borgarar**

- Yrkis- og útbúgvingarvegleiðingin verður samskipað í Yrkisdeplinum
- Vegleiðingin verður skipað sum andlit-til andlits-vegleiðing, umframt fjarvegleiðing
- Vegleiðingarstovur verða skipaðar kring landið við tøttum tilknýti til borgaran
- Vegleiðarafunktiónin verður allýst við etiskum leiðreglum um vegleiðing, menning av skipan og áseting fyri, hvussu samstarv við áhugapartar kann verða skipað
- Hildið verður fram við MA-útbúgving innan vegleiðing á Setrinum.
- Vegleiðingin í fólkaskúlanum er sera týdningarmikil, og eigur at vera styrkt kring landið.
- Styrkta vegleiðingin er eitt amboð í mun til at fyribyrgja "fløskuhálsum" á arbeiðsmarknaðinum.

**Frágreiðing**

Lívlong karrieruvegleiðing tekur støði í teimum umbroytiligu viðurskiftunum, sum serliga tann tøkniliga menningin og alheimsgerðin hava við sær.

Av alstórum týdningi er tað, at vegleiðingin er dygdargóð og viðkomandi fyri einstaka borgaran, og tí er umráðandi, at vegleiðingin í Føroyum verður sett í verk sum eitt yvirskipað tilboð til allar borgarar.

Í londunum kring okkum verður stórt arbeiði lagt í at menna vegleiðaraøkið, við m.ø. fyriskipan av regluverki og gransking. Vegleiðingin verður mett sum eitt amboð, sum kann vera við til at fremja ávís politisk ynski um at fremja lívsvirði fyri einstaka borgaran.

Vantandi útbúgving á økinum hevur sermerkt vegleiðingarfakið í Føroyum. Í 2013 vórðu stig tikin til at fara undir MA lesnað í vegleiðing á Fróðskaparsetrinum. Útlit eru tískil fyri, at vegleiðaratænastan í Føroyum kann verða góðskutryggjað og ment í framtíðini.

LLV (lív-long-vegleiðing) er neyðugur partur av hugtakinum lívlong læring, og skal raðfestast frammarlaga. Tørvur er á at fáa skipaða vegleiðing, sum eisini fevnir um økið uttan fyri skúlans gátt.

Á útbúgvingarøkinum er tørvur á at skipa vegleiðingina betur, eitt nú í sambandi við, at næmingar fara úr fólkaskúlanum og skulu velja yrkis- ella útbúgvingarleið. Eitt úrslit við styrktari vegleiðing í fólkaskúlanum eigur at vera, at øll sum verða liðug við fólkaskúlan, fara undir víðari útbúgving. Neyðugt er at styrkja vegleiðingina, og miðast skal ímóti enn meira gjøgnumskygni, tá tað snýr seg um teir nógvu valmøguleikar, ið standa ungdóminum í boði. Serstakliga á yrkisøkinum er tørvur á at samskipa bæði kunning, útbúgvingar og yrkismøguleikar betur.

Fýra øki eru neyðug at byggja professionella lívlanga vegleiðing á[34]:

1. Skipan/mannagongd og menning av at førleikameta yrkisførleikar
2. Atkomulig vegleiðing
3. Trygd fyri góðskumeting og próvtilfari, sum kann stuðla undir politik og skipan av vegleiðingini
4. Samskipan av vegleiðaratænastum

Vegleiðingin skal vera samskipað í eini vaksnamannaútbúgvingareind ella einum depli, har ið eisini vaksnamannaútbúgving, førleikameting og øll formlig viðurskifti kring vaksnamannaútbúgving eru samskipað. Í hesum liði liggur eisini ein samskipan av mannagongdum og leiðreglum, sum fevna um alt vaksnamannaútbúgvingarøkið, eitt nú førleikameting, lívlanga vegleiðing, NQF[35] o.s.fr. (National Qualification Framework og Bologna avtalan).

Mett verður, at sjálv vegleiðingin eigur at vera samskipað út frá "samskipanini/samstarvinum" við andlit- til andlits-vegleiðing umframt vegleiðing á netinum, soleiðis at vegleiðingin gerst enn meira atkomilig. Tað er harumframt neyðugt at byggja vegleiðarafunktiónina út við vegleiðingar-eindum í kommununum kring landið, sum verða samskipaðar á samskipanini/samstarvinum.

Yrkisdepilin samskipar sum nú er vaksnamannaútbúgvingarøkið í Føroyum, umframt NVL-samstarvið, sum er netverkið fyri vaksnamannalæru í Norðurlondum. Virkisøkið hjá einari samskipan av vaksnamannaútbúgiving og vegleiðing verður tí mett at liggja høgliga í Yrkisdeplinum.

Vegleiðarafunktiónin skal allýsast við etiskum leiðreglum, eitt nú tagnarskyldu. Leiðreglur skulu gerast fyri hvat vegleiðarar kunnu vegleiða um, og eisini hvat ið teir ikki kunnu vegleiða um. Eitt nú skal vegleiðarin ikki vegleiða í viðurskiftum, har ið annar serkunnleiki hevur røttu førleikarnar, eitt nú sosialráðgevar.

Vegleiðing innan yrkisútbúgvingarøkið eigur at verða styrkt, við tí fyri eyga, at fáa fleiri at fara undir eina yrkisútbúgving í Føroyum. Vegleiðingin í skúlunum skal í størri mun leggja dent á yrkisútbúgvingar.

Mælt verður til at ein nýggjur flokkur verður tikin inn til útbúgvingina MA í vegleiðing. Skal røkkast endamálinum við styrktari og meira umfatandi vegleiðing, er tørvur er á at taka fleiri inn á útbúgvingina. Tey, sum byrjaðu uppá vegleiðaraútbúgvingina í 2013 og nú eru liðug, ella eru um at vera liðug við útbúgvingina, starvast longu øll sum vegleiðarar á skúlum og á onkrum stovni.

[34] (Vuorinen & Watts, 2012, s. 9)
[35] National Qualification Framework, sum er eitt rammuverk, ætlað einstøku londunum, so tað gerst lættari og gjøgnumskygdari at samanbera og viðurkenna útbúgvingar millum lond og økir beinleiðis.



# Tilmæli 8 • Førleikamenningargrunnur

**Grunnur at fíggja arbeiðsmarknaðar-, vaksnamanna- og eftirútbúgvingar verður settur á stovn**

- Førleikamenningargrunnur at fíggja vaksnamannaútbúgvingar, arbeiðsmarknaðarútbúgvingar og førleikamenning av starvsfólki og arbeiðsfjøldini sum heild verður settur á stovn
- Ymiskir møguleikar eru at finna fígging til ein førleikamenningargrunn. T.d. við at ávísur prosentpartur av øllum lønarútgjaldingum verður settur í grunnin, at allur grunnurin verður fíggjaður á løgtingsfíggjarlógini, at fíggjarmálaráðið hevur málsøkið um hendur, at fígging kemur úr búskapargrunninum o.s.fr.
- Avgerandi er, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru samdir um týdningin og tørvin á einum førleikamenningargrunni
- Miðað verður ímóti, at grunnurin fær 35 mió. kr. at ráða yvir um árið frá byrjan, og at henda upphædd kann verða tillagað eftir tørvi
- Mælt verður til, at arbeiðsmarknaðarráðið, sum áður nevnt, skal varða av grunninum og gera yvirskipaðar reglur um, hvussu peningurin í grunninum verður brúktur. Landsstýrismaðurin góðkennir reglurnar.

**Frágreiðing**

Ein førleikamenningargrunnur eigur í útgangsstøðinum at fevna um øll, ið eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, og hava tørv á ella ynskja at verða útbúgvin ella førleikament.

Útgjaldið úr grunninum er ætlað til endurgjald til skeiðsluttakarar, lønarendurgjald til arbeiðsgevarar, gjald, samsýning ella løn til skeiðsfyriskiparar, t.d. útbúgvingarstovnar og -støð, útreiðslur, ið standast av førleikameting, lívslangari vegleiðing og at umsita sjálva vaksnamanna- og eftirútbúgvingarskipanina. Harumframt skal grunnurin stuðla nýmenningarvirksemi (innovatión) í sambandi við førleikamenning.

Endamálið við grunninum er at hann skal fíggja kostnaðin av einari heildarskipaðari vaksnamannaútbúgvingarskipan, sum eisini fevnir um eftirútbúgving og førleikamenning av arbeiðsfjøldini. Við grunninum skal tað eisini gerast møguligt at seta á stovn og menna hóskandi náms- og eftirútbúgvingartilboð til teirra, sum hava lítla ella onga formliga skúlagongd ella útbúgving, ella hava tørv á eftirútbúgving og at verða førleikament. Grunnurin skal í hesum sambandi tryggja fortreytirnar fyri, at tann einstaki fær brúkt teir námsmøguleikar, ið ein skipan við vaksnamannaútbúgving gevur. Við hesum skal grunnurin tryggja endamálið við sjálvari lógini um vaksnamannaútbúgving og førleikamenning.

Ein annar háttur at fíggja eina vaksnamanna- og eftirútbúgvingarskipan við tí innihaldi sum er skotið upp í hesari frágreiðingini, er við at seta peningin av á fíggjarlógini, ella við einari kombinatión av hesum báðum.

Útbúgvingarstovnar og tey, sum skipa fyri førleikamennandi skeiðsvirksemi, skulu kunna søkja grunnin um fígging og stuðul til at bera kostnað av t.d. undirvísing, skeiðshaldi o.s.fr. Landsstýrismaðurin ger reglur fyri, hvussu slík fígging kann verða latin, og hvørjar treytir skulu galda fyri tey, ið fáa veiting.

Hvussu mong kunnu fara undir eina yrkisútbúgving er tengt at konjunkturunum í samfelagnum. Talið av lærlingum fellur natúrligt í lágkonjunkturum, og fer upp tá tað er hákonjunkturur. Ein førleikamenningargrunnur av slíkum slag skal eisini tryggja eina javna og støðuga tilgongd og menning av læruplássum, og í búskaparliga trongum tíðum byrgja fyri, at ov stórt sveiggj verður í lærlingatilgongdini.

Nevnd, stýri ella ráð við umboðum fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum og formanni, sum landsstýrismaðurin við arbeiðsmarknaðarmálum setur, skal stýra grunninum og hava yvirskipaðu ábyrgdina av rakstrinum hjá grunninum.

Ráðið skal virka fyri at tryggja møguleikar fyri førleikamenning, sum er av týdningi fyri tann einstaka, fyri vinnuna og fyri samfelagið sum heild.

Mælt verður til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum, almennir, kommunalir og privatir arbeiðsgevarar og løntakarar, við samráðingum finna fram til, hvussu útbúgvingargrunnurin verður fíggjaður. Um arbeiðsgevarar og løntakarar gjalda 0,2% í part av øllum lønarútgjaldingum og lønum í grunnin, hevði hetta givið uml. 35 mió. kr. árliga eftir dagsins lønarútgjaldingum (8,956 mia. kr. í 2017). Hetta svarar á leið til tað, ein nýtímans vaksnamannaútbúgvingarskipan verður mett at kosta.



# Kostnaðarmeting

Mett verður, at ein vaksnamannaútbúgvingarskipan við førleikamenning, arbeiðsmarknaðarútbúgvingum, førleikameting og lívlangari vegleiðing og læring kann verða bygd upp eftir hesum fíggjarætlanarleisti:

| Tilmæli | Frágreiðing | Løgt. fíggj. kr. | Førl. grunn. kr. | Íalt kr. |
|---|---|---|---|---|
| Lóg um vaksnamanna-útbúgvingar | Gera uppskot til løgtingslóg um vaksnamannaútbúgvingar | 50.000 | 0 | 50.000 |
| Førleikasamstarv | Skipan, heildarætlan, rakstur og menning | 1.000.000 | 500.000 | 1.500.000 |
| Trípartasamstarv um vaksnamannaútbúgvingar og arbeiðsmarknaðardepil | Skipan, gera heildarætlan, uppskot um førleikapolitikk, ráðgeva og raðfesta útbúgvingartilboð v.m. | 0 | 150.000 | 150.000 |
| Fjølbroyttir og høgligir útbúgvingarmøguleikar | Verandi útbúgvingar skulu dagførast og nýggjar skulu skipast | 1.000.000 | 2.000.000 | 3.000.000 |
| Øll, 25 ár og eldri, skulu vera fevnd av vaksnamanna-útbúgvingarskipanini | At nágreina málbólkin, orða reglur, mannagongdir og kravásetingar | 0 | 100.000 | 100.000 |
| Tilflytarar og bólkar í serstøðu | Tiltøk, skeið, undirvísingartilfar, kunning, heimasíða o.s.fr. | 200.000 | 800.000 | 1.000.000 |
| Lívlong vegleiðing til allar borgarar | Vegleiðaratænasta og portalur | 500.000 | 1.000.000 | 1.500.000 |
| Lønarendurgjald til lærupláss | Endurgjald fyri lønir, sum læruplássini gjalda lærlingum meðan teir eru í skúla | 0 | 15.000.000 | 15.000.000 |
| Útbúgvingarstuðul til vaksin | Samsýningar og stuðul til vaksin 25 ár og eldri sum ískoyti fyri lønarmiss meðan tey eru í útbúgving | 0 | 15.000.000 | 15.000.000 |
| Føroya løgting (játtan) | | *2.750.000* | | 2.750.000 |
| Førleikamenningargrunnur | | | *34.550.000* | |
| **Íalt** | | | | **37.300.000** |

# Samanumtøka

Ynskið er, at hetta álit kann verða brúkt sum ein góð byrjan hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum í felag at seta í verk skipaða vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil í Føroyum.

**Álit um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil!**
Soleiðis ljóðaði yvirskriftin til arbeiðssetningin frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, og hvat kann vera meira hóskandi enn at knýta saman vaksnamannaútbúgvingar, sum í stóran mun eru arbeiðsmarknaðrútbúgvingar, og førleikamenning av starvsfólki á arbeiðsmarknaðinum, og so ein arbeiðsmarknaðardepil, sum skal evna at samskipa, røkja og menna allar tænasturnar, sum so við og við eru komnar afturat og knýttar at arbeiðsmarknaðinum?

**Endamál og bakgrund**
Í 2014 fingu vit lóg um førleikameting, sum er ein av fortreytunum fyri at fara undir vaksnamannaútbúgving.

Í fylgiskjali til samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn (september 2015) verður sagt, *at farið verður í holt við at fyrireika at seta á stovn vaksnamannaútbúgving. Neyðugir tættir í eini tílíkari skipan eru lívslong vegleiðing og førleikameting eins og ymisk sløg av førleikamenning og eftirútbúgving.*

Sum nevnt verður í samgonguskjalinum hjá hesari samgongu, er talan um at fara í holt við at fyrireika at seta á stovn vaksnamannaútbúgving. Tað er júst hetta við at fyrireika, sum hevur verið endamálið við arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum. Arbeiðsbólkurin vísir á ítøkiligar møguleikar, uttan at fara alt ov nógv í smálutirnar. Nøkur ítøkilig ting kunnu setast í verk beinan vegin, onnur mugu fyrireikast betur, áðrenn vit kunnu siga, at vit hava eina nóg fullfíggjaða og effektiva vaksnamannaútbúgvingarskipan.

Við lógini um førleikameting og nú eisini kunngerð um førleikameting ber væl til at fara meira miðvíst og skipað til verka, tá talan er um vaksnamannaútbúgving. Eitt nú verður stórur dentur lagdur á vegleiðarapartin, sum hevur við førleikametingina at gera. Tí er umráðamdi, at allur vegleiðaraparturin verður styrktur, og tað fer at hava jaliga ávirkan út um sjálva førleikametingina.

Hetta er tann meira ítøkiligi parturin av tilmælunum.

Hinvegin er arbeiðsbólkurin ikki so ítøkiligur í sínum tilmælum, tá talan er um at skapa fíggjarligar umstøður hjá vaksnum at fara í útbúgving, ella tá talan er um at staðseta og skipa ein møguligan arbeiðsmarknaðardepil, sum helst skal kjølfestast í einum samstarvi millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, har tað almenna er við.

**Hví skipaða vaksnamannaútbúgving**
Vaksnamannaútbúgving er við til at styrkja búskaparliga haldføruð og vælferðina í samfelagnum, umframt kappingarførið hjá vinnuni og landinum sum heild. Útbúgving og førleikamenning er av stórum týdningi fyri møguleikarnar hjá tí einstaka at taka lut á arbeiðsmarknaði og í samfelagsligum virksemi yvirhøvur, eins og hesi eru av stórum týdningi fyri kappingarførið hjá vinnuni.

Føroyar eru og gerast alsamt tættari knýttar at umheiminum. Altjóðagerðin er ein veruleiki, eisini í Føroyum, hvørt vit ynskja tað ella ikki. Hetta merkir, at krøv verða sett til, hvussu almennu Føroyar skipa seg við regluverki og tænastum til borgaran.

Ein týdningarmikil táttur í at vit sum samfelag skipa okkum samsvarandi teimum samfeløgum, ið vit javnan og oftast samanbera okkum við, er útbúgving og menning. Skulu vit á nakran hátt gera okkum vón um at menna tað føroyska samfelagið til at kunna taka ímóti teimum avbjóðingum, ið altjóðagerðin ber við sær, so krevst at vit hava eitt minst líka høgt útbúgvingarstøði, sum samfeløgini kring okkum hava. Hetta er avgerandi fyri, at samfelagið kann fjølgast og mennast, og ikki koma út fyri hóttafalli, m.a. tá á leikar í alheims búskapinum.

Tað er av alstórum týdningi, at eisini tann vaksna arbeiðsfjøldin, sum fór tíðliga úr skúlanum og út at arbeiða, fær møguleikan at útbúgva seg samsvarandi teimum krøvum, ið arbeiðsmarknaðurin og samfelagið sum heild seta.

Royndir vísa, at vaksnamannalæring og -útbúgving hava stóran týdning fyri arbeiðsmarknaðin sum heild og trivnaðin hjá landsins borgarum. Fyrimunurin við vaksnamannaútbúgving er, at fleiri av landsins borgarum fáa øktan møguleika at ogna sær grundleggjandi førleikar at søkja inn á eina útbúgving ella lærupláss, at endurútbúgva seg og troyta teir útbúgvingarmøguleikar, sum samfelagið bjóðar. Harumframt er vaksnamannaútbúgving við til at lyfta útbúgvingarstøðið, sum er við til at styrkja kappingarførið og búskapin í samfelagnum.

Neyðugt er at gera skipanir, ið veita vaksnum borgarum fíggjarligar umstøður at taka eina útbúgving, umframt at gera skipanir, har vaksin kunnu fáa mett sínar førleikar, sum tey hava vunnið sær í arbeiði, á skeiðum, í frítíðarvirksemi o.s.fr. Slík skipan verður best skipað og tryggjað, tá ið myndugleikar og partarnir á arbeiðsmarknaðinum samstarva um endamálið.

**Arbeiðið at gera álitið**
Í arbeiðinum at gera álitið og at orða tilmælini, hevur dentur verið lagdur á, at støði verður tikið í samstarvinum millum partarnar. Stóri týdningurin av samstarvinum er ikki ein roynd at skúgva ábyrgdina frá myndugleikanum á økinum yvir á privatu partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Stóri týdningurin av samstarvinum skal síggjast í ljósinum av, at allir partar, bæði tað almenna, fakfeløgini og vinnan fáa eitt betri grundarlag at arbeiða fram ímóti felags gagnligum málum.

Tað hevur ikki verið eitt mál í sær sjálvum, at allir partar skulu vera samdir um alt, sum verður umrøtt og tilmælt í álitinum. Álitið er ein samanskriving av ymiskum hugsanum og hugskotum, sum borin eru fram á fundum og í samrøðum, sum hava verið við ymiskar partar, umboðandi felagsskapir og stovnar, ið varða av ymiskum viðurskiftum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hesi eru nevnd á síðu 11 og 12 í álitinum.

Vit hava ikki í nevniverdan mun havt samrøður við útbúgvingarstovnarnar, sum allir eru undirlagdir Mentamálaráðnum, beinleiðis og óbeinleiðis. Í stóran mun verða tað hesir stovnar, sum skulu standa fyri førleikamenningini og útbúgvingini,

ið tey vaksnu sambært nýggju skipanini fara at spyrja eftir. Hesir stovnar hava tí óbeinleiðis verið umboðaðir gjøgnum umboðanina hjá Mentamálaráðnum og lutvíst øðrum stjórnarráðum í arbeiðsbólkinum.

**Hvat kann álitið brúkast til?**
Álitið um vaksnamannaútbúgving og arbeiðsmarknaðardepil skal eisini síggjast sum eitt uppskot til eitt trípartasamstarv um útbúgvingarlig umframt onnur viðkomandi viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum. Álitið kann verða nýtt til at gera ávísar raðfestingar innan alt vaksnamannaútbúgvingarøkið, sum í stóran mun fevnir um allan arbeiðsmarknaðin og tørvin á førleikum í samfelagnum sum heild. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum kunnu brúka áliti sum eitt slag av kveikjandi hugskotum, ið kunnu slóða fyri samstarvi um týdningarmiklar tættir á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum annars.

Álitið setir einki í verk av sær sjálvum. Hóast tilmælini eru ítøkilig, so eru tey samstundis rímiliga yvirskipað. Hetta hevur verið gjørt, so at partarnir ikki skuldu kenna seg ov bundnar at ávísum útsøgnum og niðurstøðum. Tí kunnu tilmælini, um neyðugt, verða viðgjørd framhaldandi við vælvild frá avvarðandi pørtum, áðrenn tey verða sett í verk.

**Samandráttur av innihaldinum**
*Stutt um teir ymisku partarnar av álitinum:*
Fyri at taka saman um innihaldið í álitinum, so lýsir tað í stuttum arbeiðssetningin og hvussu bólkurin hevur arbeitt fram ímóti úrslitinum, sum er hetta álitið. Nomið verður við bakgrund, fortreytir og grundarlag fyri at vaksin fáa sær útbúgving ella verða førleikament, og hvussu útbúgvingarliga støðan í landinum sum heild er. Dentur verður lagdur á at greiða frá týdninginum av, at vaksin hava góðar møguleikar og umstøður at førleikamenna seg, og at hetta er við til at økja um tilvitskuna hjá starvsfólki í mun til sítt starv. Eisini verður nomið við umstøðurnar og møguleikarnar hjá tilflytarum og øðrum bólkum av borgarum, sum á onkran hátt eru í serstøðu.

Ein partur av álitinum fer við at greiða frá og lýsa, hvussu økið vaksnamannaútbúgving verður skipað í hinum Norðurlondunum, samstundis sum greitt verður nærri frá teimum skipanum og møguleikum, sum eru fyri vaksnamannaútbúgving í Føroyum í dag.

*Stutt um tey ymisku tilmælini:*
Tá talan er um tey einstøku tilmælini, ið arbeiðsbólkurin mælir til at fremja, so eru tey skipað við støði í arbeiðssetninginum, har endamálið við arbeiðinum hjá bólkinum verður gjørt ítøkiligt. Tað er at gera uppskot til:

- Karmar um skipaða vaksnamannalæring, -útbúgving og arbeiðsmarknaðardepil
- Hvussu hetta arbeiði verður fyrireikað og skipað sum samstarv millum avvarðandi myndugleikar og partarnar á arbeiðsmarknaðinum
- Hvussu sjálv skipanin skal síggja út
- Hvat vaksnamannaútbúgving skal fevna um
- Hvør skal vera fevndur av skipanini
- Hvussu skipanin við førleikameting og lívlangari vegleiðing kann verða partur av einari vaksnamannaútbúgvingarskipan
- Hvussu skipanin kann verða fíggjað
- Fíggjarligar umstøður hjá vaksnum at fara í útbúgving ella læru, og
- Hvar skipanin kann verða staðsett.

Tey átta tilmælini knýta seg soleiðis afturat teimum 9 uppskotunum, sum arbeiðsbólkurin verður biðin um at gera. Tey átta tilmælini eru nærri lýst á síðunum 63-78 í álitinum:

1. Vaksnamannaútbúgving og førleikamenning verða raðfest politiskt og skipað við lóg (pkt. 1 og 3)
2. Ein førleikasamskipan ella eitt førleikasamstarv, sum skal samskipa vegleiðing, førleikameting og førleikamenning, umframt at ráðgeva í málum, sum hava týdning fyri alt vaksnamannaútbúgvingarøkið og lívlanga læring sum heild, verður skipað (pkt. 2 og 3)
3. Samstarvið um vaksnamannaútbúgving og førleikamenning millum tað almenna og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, verður styrkt og ment við einari heildarætlan um førleikar í samfelagnum (pkt. 2 og 9)
4. Fjølbroyttir og høgligir útbúgvingarmøguleikar skulu standa øllum vaksnum í boði (pkt. 4 og 8)
5. Øll vaksin, 25 ár og eldri, sum hava tørv á útbúgving ella førleikamenning, skulu vera fevnd av skipanini (pkt. 5)
6. Tiltøk at tryggja tilflytarum og bólkum í serstøðu javnbjóðis og betri møguleikar at vera virknir borgarar á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum sum heild, verða sett í verk (pkt. 5)
7. Lívlong vegleiðing verður sett í verk sum eitt yvirskipað tilboð til allar borgarar (pkt. 6)
8. Grunnur at fíggja arbeiðsmarknaðar-, vaksnamanna- og eftirútbúgvingar verður settur á stovn (pkt. 7 og 8).

## Niðurstøða

Sum í so mongum øðrum føri krevst eisini peningur at verða settur av, um vit skulu gera okkum vónir um at lyfta vaksnamannaútbúgvingarøkið samsvarandi tíðarinnar krøvum um førleikar hjá arbeiðandi fjøldini.

Sum skilst í hesum áliti, eru við millumbilum framd ymisk átøk, sum skuldu bøta um og økja tilboðini hjá vaksnum at førleikamennast ella eftirútbúgvast.
Hesi átøk hava ikki munað í nóg stóran mun, og tað kann kanska skyldast, at eingir pengar, og harvið heldur eingin orka er sett av til at fáa økið skipað í trygga legu, og harnæst fáa tað ment og gjørt nóg áhugavert.

Leysliga mett fer tað at kosta einar 35 mió. kr. at skipa vaksnamannaútbúgvingarøkið, so tað samsvarar dagsins krøvum, og um vit ætla at nærkast tí, sum grannalondini hava at bjóða sínum borgarum av tilboðum í sambandi við vaksnamannaútbúgving.

Tann stóra avbjóðingin liggur í at finna ta neyðugu fíggingina. Eingin hevur hug at standa einsamallur við endan, tá tað snýr seg um at fíggja eina vælvirkandi vaksnamannaútbúgvingarskipan, sum í stóran mun eisini fevnir um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar og skeiðvirksemi, og snýr seg um at útvega samfelagnum og vinnuni teir førleikar, sum tørvur er á í dag og frameftir.

Eru partarnir, sum varða av útbúgving og arbeiðsmarknaðarmálum, sinnaðir at seta seg saman og arbeiða fram ímóti eini haldgóðari loysn á hesum týdningarmikla øki, eru vit komin eitt týðandi stig á leiðini.

Vónandi kann hetta álit verða við til at birta upp undir eitt slíkt kærkomið og neyðugt samstarv millum  partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Vegna arbeiðsbólkin
John Dalsgarð, samskipari



# Keldur


Andreassen, I. H., Hovdenak, S. S., & Swahn, E. (2008). *Utdanningsvalg - identitet og karriereveiledning.* Bergen: Fakbokforlaget Vigmostad & Bjørke AS.

Álit (2007): Álit um at endurskoða vegleiðingarskipanina, 10. desember 2007. https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/6060/álit_um_at_endurskoða_vegleiðingarskipanina_-_versjón_1-1.pdf

Bólkauppgáva (2016): Lívlong vegleiðing í Føroyum – ein ávegis ætlan. Við mannagongdum fyri óverksetan á stovnum og í kommunalum økjum. Bólkauppgáva hjá MA lesandi í vegleiðing. Fróðskaparsetur Føroya 2016.

CEDEFOP (2015) Tikið niður frá European Centre for Development of Vocational Training: http://www.cedefop.europa.eu/en/events-and-projects/projects/lifelong-guidance/

Dalskov, Mie. (2009). *Store samfundsøkomomiske gevinster af uddannelse.* Kbh.: Arbejderbevægelsens Erhvervsråd. https://www.ae.dk/files/dokumenter/analyse/ae_store-samfundsoekonomiske-gevinster-af-uddannelse.pdf

Geiger, Tinne (red.) Søren Ehlers, Gun-Britt Wärvik og Anne Larson. (2011). *Effektive strategier for livslang læring i de nordiske lande.* Kbh.: Nordisk Ministerråd.

Green, Ingegerd og Tormod Skjerve. (2017). *Kompetens ur ett arbetslivsperspektiv.* NVL: Nordisk Ministerråd.

Vinther-Jørgensen, Tue et al. (2013). *Uddannelse for voksne: Kortlægning af ligheder og forskelle i ordninger på ISCED 3-niveau for voksne i de nordiske lande, Grønland og Åland samt på Færøerne.* Kbh.: Nordisk Ministerråd.

Wiktorin, Kajsa. (2017). *Inclusion of refugees through non-formal education-Nordic Best Practice.* Nordisk Ministerråd.

ELGPN. (2015). *Guidelines for Policies and Systems Development for Lifelong Guidance: A Reference Framework for the EU and for the Commission.* (E. L. Network, Red.) http://www.elgpn.eu/publications/browse-by-language/english/elgpn-tools-no-6-guidelines-for-policies-and-systems-development-for-lifelong-guidance/

Sharf, R. S. (2013). *Applying Career Development Theory to Counseling.* US: Brooks/Cole Cengage Learning.

Sultana, Ronald G. (2011): Learning career management skills in Europe: a critical review, í *Journal of Education and Work*, Volume 25, 2012 - Issue 2 (http://www.tandfonline.com/toc/cjew20/25/2) – útgivin online 12. juli 2011.

http://www.europarl.europa.eu/RegData/etudes/BRIE/2017/595369/IPOL_BRI%282017%29595369_EN.pdf

Høgnesen, Runa Preeti (2015). *Tilmæli um integratiónspolitikk.* Tórshavnar Kommuna.

*Búskaparfrágreiðing, á heysti 2017.* (2017, sept.) Tórshavn: Búskaparráðið.

*Undersøgelse af danskkundskabers betydning for flygtninges beskæftigelse.* (2017, 23. Feb.). Dansk Flygtningehjælp.

NVL (2017). *Voksenlærerens kompetencer og kompetenceudvikling*, frágreiðing http://nvl.org/Content/Voksenlaererens-kompetencer-og-kompetenceudvikling

Uddannelsesplan 1. (2016). Departementet for Uddannelse, Kultur, Forskning og Kirke. Government of Greenland.

Uddannelsesplan 2. (2017). Departementet for Uddannelse, Kultur, Forskning og Kirke. Government of Greenland.

Europa-Kommissionen. (2006, 23.okt.). *Meddelelse fra kommissionen: Voksenuddannelse, det er aldrig for sent at lære*. Kommissionen for de Europæiske Fællesskaber.

EUR-LEX. (2006, 18.des.). *Europa-parlamentets og rådets henstilling af 18.december 2006 om nøglekompetencer for livslang læring.* (2006/962/EF). http://eur-lex.europa.eu/legal-content/DA/TXT/?uri=LEGISSUM%3Ac11090. (20. nov. 2017).

**Spurnarkanning:**

Útlendingastovan (2017, 03.apríl.) *Immigrants and Faroese Labour Market.* Powered by SurveyMonkey. Gjørd 23. februar 2017.

